| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 198 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 24. apríl 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 70/18-104/18

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málunum nr. 70 til og við nr. 87, av tí at hon møtti kl 19.

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Marius Muller
Sigurð Vang
Bogi Frederiksen
Lars Larsen Black
Tina Johannesen

**LUTTÓKU IKKI:**
Heðin Mortensen

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 199<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 70/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 201 |
| 71/18 | 18/00950-1 | Íbúðarbygging á Frúutrøð | 202 |
| 72/18 | 18/01341-1 | Val av nevndarlimum til Visit Tórshavn | 205 |
| 73/18 | 18/01426-1 | Søla matr.nr. 22aa, Kaldbak. | 207 |
| 74/18 | 18/01427-1 | Søla matr.nr. 22v, Við Krossá 14, Kaldbak. | 209 |
| 75/18 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 211 |
| 76/18 | 17/01881-1 | Ítróttaanlegg – dagføring av gjøldum fyri hallarleigu v.m. | 215 |
| 77/18 | 17/04201-3 | Føroya Symfoniorkestur: Umskipan, samstarv o.a. | 218 |
| 78/18 | 17/03801-1 | Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið | 220 |
| 79/18 | 17/04062-1 | Nýggjar kommunulæknaviðtalur | 224 |
| 80/18 | 16/04312-1 | Skoytubreytin | 229 |
| 81/18 | 17/01122-2 | Víðarimenning av Tórshavnar býarsavni | 237 |
| 82/18 | 17/03883-2 | Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin) | 245 |
| 83/18 | 17/03897-1 | Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum | 252 |
| 84/18 | 15/03409-23 | Müllers Pakkhús – nýtt gólv til miðhæddina (2. hædd) | 259 |
| 85/18 | 18/01311-1 | Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu | 261 |
| 86/18 | 17/03078-3 | Servituttur um tak á matr. nr. 1mæ. Áheitan um kommunurnar góðkenning fyri - sum átalurætthavari - at fáa loyvi til at skifta takið | 264 |
| 87/18 | 18/00786-1 | Tillagan av parkeringsøkinum hjá Havnar Sjónleikarfelag matr. nr. 763, Tórshavn til almenna nýtslu | 267 |
| 88/18 | 14/01828-52 | Útstykking í Nólsoy - nevndarsamtyktir - broyting av byggisamtykt (2006-1856) | 270 |
| 89/18 | 18/00871-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175d, Hotel Føroyar | 281 |
| 90/18 | 18/00308-1 | Niels Finsensgøta / Vaglið einvegis niðan eftir til Sverrisgøtu | 284 |
| 91/18 | 18/01334-2 | Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir | 287 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 92/18 | 18/01173-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 864a, Tórshavn | 289 |
| 93/18 | 18/00908-5 | Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi | 291 |
| 94/18 | 17/01593-1 | Umsókn um samanlegging av vinnustykkjunum á Hjalla matr. nr. 139u og 139t, Hoyvík | 294 |
| 95/18 | 17/03082-2 | Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr. nr. 139f, Hoyvík | 297 |
| 96/18 | 18/01520-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2017 | 300 |
| 97/18 | 18/01521-1 | Framflytingar fyri árið 2017 | 302 |
| 98/18 | 18/01522-1 | Eykajáttan 2018 | 305 |
| 99/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 309 |
| 100/18 | 18/00817-6 | Umsókn um loyvi at byggja undirlendi til framleiðsluøki á Gomlurætt | 311 |
| 101/18 | 17/00760-4 | Fyrispurningur um tyrving av gróti á Velbastað í sambandi við Eystur- og Sandoyartunlar. | 315 |
| 102/18 | 17/02930-1 | Grótið frá Sandoyartunlinum | 320 |
| 103/18 | 17/03303-2 | Hugskot/uppskot um nýtslu av tilfari úr Sandoyartunlinum. | 325 |
| 104/18 | 18/01200-1 | Kanning um økt samstarv millum Kommunalu Brennistøðina og IRF | 329 |

## *70/18 Mál beind í nevndir 2018*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 71/18 Íbúðarbygging á Frúutrøð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 45/18 | 18/00950-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 18/18 | 18/00950-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 79/18 | 18/00950-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 54/18 | 18/00950-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 84/18 | 18/00950-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 111/18 | 18/00950-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 71/18 | 18/00950-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommmunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum, og at hetta skal gerast við býartætting, har byggilendi og tómir bygningar inni í býnum verða gagnnýttir til bústaðir.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við at verandi musikkskúli á Frúutrøð 1 flytur niðan í nýggja Musikkskúlan á Landavegnum við árslok 2018, og verandi læknavirksemi og býargartnari á økinum flyta í onnur høli, hevur umsitingin gjørt uppskot til útboðstilfar av Frúutrøð, matrikkul 645a, í optión. Uppskotið snýr seg um at bjóða lendi við verandi musikkskúla- og læknabygningi út til íbúðarbygging, har ein av treytunum er, at minst helvtin av íbúðunum skulu vera leiguíbúðir, og í minsta lagi 10 av íbúðunum skulu vera eldra- og rørsluvinarligar íbúðir. Av tí at økið liggur miðskeiðis í býnum, er ynskiligt, at fríøkið ella partur av fríøkinum skal vera ein almenn atkomulig park til gagn fyri allan býin.

Uppskotið stuðlar væl undir visjónunum hjá kommununi, og við støði í fjølbroyttum eigaraviðurskiftum av íbúðum, verður lagt upp til búseting við einum breiðum borgaraskara. Harumframt er møguleiki fyri, at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum. Talan verður tískil um býartætting, gagnnýtslu av verandi infrakervi, umframt at gera eitt alment grønt øki/park miðskeiðis í býnum.

Hesin háttur at bjóða eina verkætlan út er ikki royndur fyrr í kommununi. Ætlanin er, at kommunan setur ávísar treytir í útbjóðingartilfarið, og at tey sum bjóða uppá verkætlanina binda seg til at byggja, fíggja og umsita íbúðir og fríøki á økinum.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar. Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 1. ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Ætlanin er at bjóða optiónina/verkætlanina út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión). Í sambandi við eina prækvalifikatión, kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.

Økið, matr. 645a, sum talan er um, fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Havast skal somuleiðis í huga, at tá tosað verður um býartætting, so kann ein av avleiðingunum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram.

Neyðugt verður at skipa matrikkuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út. Hvussu hetta verður gjørt, verður treytað av parkeringsviðurskiftunum á matrikklinum. Í dag eru 41 almenn parkeringspláss á Frúutrøð. Mett verður, at verkætlanin ikki fær nøkta parkeringstørvin við teimum 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til íbúðirnar. Tískil verður tað ein uppgáva hjá kommununi at varðveita og skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.

Áðrenn útbjóðingina av verkætlanini skulu grannar hoyrast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at bjóða lendið á Frúutrøð, matr. 645a, út í optión til íbúðarbygging sambært útbjóðingartreytum, sum fyrisitingin ásetur, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí treyt, at dagføringin av kloakkskipanini verður fíggjað av søluni og at kommunan útvegar sama tal av parkeringsplássum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og mælir býráðnum til at samtykkja málið við teirri treyt, ið nevndin hevur ásett, umframt teirri treyt, at tað bert skal verða loyvt at byggja tríggjar hæddir í økinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum at beina málið aftur í Byggi-og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
19. mars var ein kunnandi fundur um verkætlanina fyri grannum uttanum økið á Frúutrøð. Eftir fundin varð avgjørt at nágreina ymisk viðurskifti í útbjóðingartilfarinum, undir hesum:

- Nágreina treytirnar, sum innkomnu uppskotini skulu lúka (sí pkt. *3.3 Treytir til økið og bygging* í útbjóðingartilfarinum) m.a.:

    - Byggilist
    - Talið av íbúðum
    - Hædd á nýggjum bygningum (sum eru lægri enn verandi bygningur)
    - Tíðarætlan

- Broytt í punktunum sum uppskotini verða dømd eftir (sí Pkt. *3.4 Døming av innkomnum uppskotum* í útbjóðingartilfarinum)
- Broytt tíðarætlan fyri verkætlan eftir undangóðkenning (sí pkt. *4.2 Tíðarætlan fyri verkætlan eftir undangóðkenning)*
- Víðka dómsnevndina við einum granna frá Frúutrøð
- Avgjørt at mæla til at áseta eina samsýning hjá dómsnevndini at ráða yvir, áljóðandi kr. 200.000,-, sum verður javnt býtt millum undangóðkendu tilboðsgevararnar, sum ikki vinna.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at umrøða omanfyristandandi nágreiningar, at taka undir við útbjóðingartilfarinum, og at játta kr. 200.000,00 av konto 6175, fyri síðani at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

Annfinn Brekkstein stemmar blankt

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og mæla býráðnum til at samtykkja málið við tí ískoyti, at í minsta lagi 30 % av íbúðunum skulu markast fólki, ið eru 60 ár og eldri.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atvkøða blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá**.**

# 72/18 Val av nevndarlimum til Visit Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 72/18 | 18/01341-1 |

**UPPRUNIN TIL MÁLIÐ:**

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at fáa eina samstarvsavtalu við Felagið Tórshavn um Visit Tórshavn, sum millum annað hevur við sær broytingar í viðtøkum og nevnd hjá Visit Tórshavn.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Felagið Tórshavn hevur aðalfund 9 mai. 2018 og eftir ætlan skal nýggj nevnd veljast. Kommunan og nevndin í Felagnum Tórshavn eru samd um, at nevndin fyri Visit Tórshavn í størru mun skal avspegla ferðavinnuna.

Í uppskoti til nýggj viðtøkur, stendur millum annað um nevndina:

*"Nevndin telur 5 limir, sum sita fyri 2 ár í senn. Annaðhvørt ár standa 2 nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa 3 limir fyri vali.*

*2 nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og 3 verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi.*

*Teir 2 nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og 2 av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi.*

*3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdur millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.*

*Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir.*

*Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.*

*Fyri hvønn nevndarlim verður tiltakslimur valdur.*

*Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni.*

*Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi 3 limir eru á fundi, harav ein skal vera formaðurin.*

*Á ársaðalfundinum 2018 standa allir nevndarlimir fyri vali. 2 nevndarlimir verða tá valdir fyri 1 ár ta einu ferðina, harav annar skal verða valdur av Tórshavnar kommunu, og 3 nevndarlimir verða valdir fyri 2 ár".*

Kommunan skal velja 2 nevndarlimir. Tað er lutfalsval.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir Býráðnum til at velja 2 nevndarlimir og tiltakslimir fyri Visit Tórshavn.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:**Tikið av skrá.

| | | |
|---|---|---|
| Býráðsfundur<br>24. apríl 2018 | | Blað nr.: 207<br>Formansins merki: |

# 73/18 Søla matr.nr. 22aa, Kaldbak.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 93/18 | 18/01426-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 73/18 | 18/01426-1 |

**Upprunin til málið:** Gomul útstykking í Kaldbak.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí mál 14/01389 samtykti býráðið 14.12.2017 at lýsa grundstykkini í Kaldbak til sølu til mettan marknaðarprís.

Matr.nr. 22aa, sum er til víddar 520 m2, varð mett til kr. 213.980,00

Grundstykkini hava staðið á sølulista hjá Meklaranum BetriHeim.
Boð áljóðandi kr. 200.000,00 er innkomið, og onki mótboð. Meklarin hevur fyribils tikið grundstykkið av sølulista, og bíðar eftir at kommunan tekur avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.** Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Sí omanfyri.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongir.

**Skjøl.** Endalig søluváttan frá Meklara. Kortskjal. Býráðssamtykt 14/01389.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til, at selja stykkið fyri innkomið boð áljóðandi kr. 200.000,00.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:**Einmælt samtykt.

# 74/18 Søla matr.nr. 22v, Við Krossá 14, Kaldbak.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 92/18 | 18/01427-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 74/18 | 18/01427-1 |

**Upprunin til málið:** Gomul útstykking í Kaldbak.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí mál 14/01389. Býráðið samtykti 14.12.2017, at lýsa grundstykkini í Kaldbak til sølu til mettan marknaðarprís.

Matr.nr. 22v, sum er til víddar 544m2, varð mett til kr. 223.856,00

Grundstykkið hevur staðið á sølulista hjá Meklaranum BetriHeim.

Boð áljóðandi kr. 210.000,00 er innkomið, og onki mótboð. Meklarin hevur fyribils tikið grundstykkið av sølulista, og bíðar eftir at kommunan tekur avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.** Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Sí omanfyri.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl.** Endalig søluváttan frá Meklara. Kortskjal. Býráðssamtykt skjal. 14/01389-37

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 210 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til, at selja stykkið fyri innkomikð boð áljóðandi kr. 210.000,00

Fíggjarnevndin 18. apríl 2018: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 75/18 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000m$^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500m$^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500m$^2$ av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 215<br><br>Formansins merki: |

# 76/18 Ítróttaanlegg – dagføring av gjøldum fyri hallarleigu v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 177/17 | 17/01881-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 155/17 | 17/01881-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 168/17 | 17/01881-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 145/18 | 17/01881-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 96/18 | 17/01881-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 76/18 | 17/01881-1 |

**Málslýsing:**

Gjøldini hjá Ítróttaanleggum eru seinast broytt fyri umleið 10 árum síðani. Ávísur partur av tímunum hjá Ítróttaanleggum koma undir skipanina fyri ókeypis hallarleigu, restin kemur undir vanliga skúlanýtslu v.m. ella vera faktureraðir. Í løtuni rindar kontan Ítróttaanleggum 75 kr./tímar fyri hallir og 60 kr./tíman fyri fimleikahallir í sambandi við skipanina fyri ókeypis hallarleigu. Í og við fleiri hallir koma í ár, so koma sum høvuðsregla eisini fleiri ókeypis hallartímar. Gjøldini fyri ókeypis hallarleigu (konta 5365) vera tikin uppaftur í heyst í sambandi við fíggjarætlanina.

Leiðarin á Ítróttaanleggum mælir til fylgjandi broytingar í teimum tímunum, ið vera faktureraðir beinleiðis til tey sum brúka hallirnar:

## Hallir

| | **Høllin á Hálsi** | **Hoyvíkhøllin** | **Badmintonhøllin** | **Finleikarhøllin FIMI** | **Ítróttarhøllin í Kollafirði** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Privat** | 300 kr. / tíma til 450 | 300 kr. / tíma til 450 | 250 kr. / tíma | 300 kr. / tíma til 450 | 300 kr. / tíma til 450 |
| **Sersambond** | 150 kr. / tíma til 250 | 150 kr. / tíma til 250 | 150 kr. / tíma | 150 kr. / tíma til 250 | 150 kr. / tíma til 250 |
| **Ítróttafeløg** | 150 kr. / tíma til 250 | 150 kr. / tíma til 250 | 150 kr. / tíma | 150 kr. / tíma til 250 | 150 kr. / tíma til 250 |
| **Messa** | 6000 kr. / dag til 7500 | 6000 kr. / dag til 7500 | 4000 kr. / dag | | 6000 kr. / dag til 7500 |
| **Dansur** | 10000 kr.til 12500 | 10000 kr.til 12500 | 8.000 kr. til 10000 | | 10000 kr.til 12500 |
| **Dansur við reingerð** | 15000 kr.til 18000 | 15000 kr.til 18.000 | 12000 kr.til 14000 | | 15000 kr.til 18000 |
| **Fundur** | 4000 kr.til 7000 | 4000 kr.til 7000 | 4000 kr. til 6000 | | 4000 kr.til 7000 |
| **Møti** | 6000 kr.til 7.000 | 6000 kr.til 7000 | 3000 kr.til 4000 | | 6000 kr.til 7000 |

**Viðmerking**: upphæddirnar eru galdandi fyri tiltøk, sum ikki brúka óvanliga nógvan hita ella streym. Um tað verður brúktur nógv av hita ella streymi, verða umleið 1.000 kr. til 2.000 kr. lagdar omaná.

## Fimleikahallir

| | **Privat** | **Sersambond** | **Ítróttafelag** |
|---|---|---|---|
| **Allar fimleikahallir** | 100 kr. / tíma til 200 | 60 kr. / tíma til 120 | 60 kr. / tíma. Til 120 |

| |
|---|
| Eindin á Argjavegi/SáF, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Kollafjarðar skúli, Sankta Frans skúli, Skúlin á Argjahamri<br><br>Skúlin við Løgmannabreyt, Høllin á Stórheyggi, Nólsoyar skúli |

Um hesar vera framdar verður mett at inntøkurnar fara at hækka umleið 900 tkr. Mett verður at ávíst prístoygni er, men helst so at eftirspurningurin vil lutfalsliga vera nærum óbroyttur.

Ætlanin er at nýggju prísirnir koma í gildi í seinasta lagi pr. 1. september 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja nevndu broytingar.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Turid Horn og Heðin Mortensen, taka undir til tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir býráðnum frá at samtykkja málið.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti

Fyri atkvøddu
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti**
Nú útbyggingarverkætlanin fyri Høllina á Hálsi er liðug er tørvur á ávísum tillagingum í prísskránni. Leiðari fyri Ítróttaanleggum mælir til fylgjandi broytingar:

- Gjøldini fyri Høllina á Hálsi verða framyvir at skilja sum gjøld fyri ávikavist høll 1 (sunnara) ella høll 2 (norðara).

- Gjaldið fyri at leiga bæði høll 1 og høll 2 til:

Messur verður 11.250 kr
Dans/Konsertir 18.750 kr.
Fundir/møtir 10.500 kr.

umframt at:
- Reingerð eftir dans/konsert 5.500 kr. fyri eina høll og 8250 kr. fyri báðar hallirnar.

umframt at:
- Uppsetan av flytiligu áskoðarapallunum í Høllini á Hálsi verður 2500 kr. fyri hvønn.
Í tann mun leigarin hjálpir til við uppsetanini, kann leiðarin fyri Ítróttaanlegg geva lutfalsligan niðurskurð í gjaldinum.

umframt:
- Verður høll 3 í Høllini á Hálsi (borðtennis, stríðsítrótt) at rokna sum tvær fimleikahallir ávikavist høll 3 a (vestur) og høll 3 (eystur) og fevnd av viðkomandi gjøldum.

Ætlandi koma gjøldini í gildi í seinasta lagi 1. mai 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja nevndu broytingar. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt Samtykt.

# 77/18 Føroya Symfoniorkestur: Umskipan, samstarv o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 142/18 | 17/04201-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 77/18 | 17/04201-3 |

**Upprunin til málið:**
Skriv frá Mentamálaráðnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin er at umskipa Føroya Symfoniorkestur frá at vera ein felagsskapur til at vera ein sjálvsognarstovn og at Tórshavnar kommuna skal vera ein av undirskrivandi stovnarunum.

Sí viðfest um at skipa Føroya Symfoniorkestur sum sjálvsognarstovn – í dag er tað ein felagsskapur. Sum uppleggið til viðtøkur er, er Tórshavnar kommuna rokna sum ein av undirskrivandi stovnarunum.

Í uppskoti er stýri við fýra limum, har MMR velur ein, sum er formaður.

Tórshavnar kommuna skal eftir hesum hava ein lim. Stýrið setur (orkestur)stjóra fyri stovnin. Stýrið kann harumframt seta fastan dirigent og verkætlanarleiðara. Orkesturstjórin mannar formliga orkestrið. Ein 3-manna programmnevnd hevur saman við orkesturstjóranum listaligu leiðsluna av orkestrinum og ger konsertskrá. Í aðra máta virkar hetta í stórum sum stýrið fyri Tjóðpall Føroya, tó at Tjóðpallurin er almennur stovnur.

Viðv. stýrisumboðanini, so er hóskandi at Tórshavnar kommuna hevur fastan stýrislim.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna er ein av førstu stuðlunum hjá Føroya Symfoniorskestri. Árligi rakstrarstuðulin fyri 2018 er 225 tkr. Eisini verður í løtuni viðgjørt hvørt orkestrið skal hava heimstað í nýggja musikkskúlabygninginum tá hann verður liðugur í 2019.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Ikki viðkomandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- Uppskot til viðtøkur
- Notat hjá MMR um málið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka undir við uppskotinum til viðtøkur. Málið verður beint í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá**.**

# 78/18 Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 20.11.2017 | 30/17 | 17/03801-1 |
| 2 Eldranevndin | 08.01.2018 | 37/18 | 17/03801-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 94/18 | 17/03801-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 78/18 | 17/03801-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður til skriv frá Kommunufelagnum dagf. 27. oktober 2017 um at menna og seta í verk talgildu heilsuskipanina Cosmic á øllum eldraøkinum. Í skrivinum heitir Kommunufelagið á kommunurnar um at geva felagnum tilsøgn um, at kommunurnar seta neyðuga peningin av til endamálið, hetta til tess, at felagið kann gera avtalu við Landssjúkrahúsið.

Sum lýst í skrivinum hevur verið tilgongd um at fáa talgildu heilsuskipanina til eldraøkið. Cosmic er í dag talgilda sjúklingajournalskipanin á heilsuøkinum, og av tí at heilsuøkið er tað økið, sum eldraøkið hevur størstan tørv á at samskifta fakliga við um brúkarar, eru fleiri fyrimunir at velja somu skipan.

Tá eldraøkini fara at nýta Cosmic, fer borgarin at uppliva eina betri tænastu, tí samskiftið um hansara viðurskifti millum eldraøkið og heilsuøkið verður meira samanhangandi, tryggari og skjótari. Hetta fer eisini at minka um feilir, ið koma av ógreiðum, ófullfíggjaðum ella skeivum upplýsingum, eins og tíðin at leita fram upplýsingar styttist.
Cosmic er lagað til føroyska heilsuverkið, og mett verður, at hon við bert fáum tillagingum kann brúkast á eldraøkinum. Hetta er tí eisini ein bíligari loysn, enn tað hevði verið at ment eina aðra skipan at nøkta tørvin á røktarpartinum av eldraøkinum.

Í fyrsta lagi er ætlanin, at nøkur starvsfólk í øllum økjum fáa lesi-atgongd til skipanina. Til tað er neyðugt at velja starvsfólk, greina rættindi í mun til fakbólkar, kanna og taka avgerð um og skipa kt-støði og –útgerð, og menna superbrúkarar.

Harumframt skulu skipast fylgibólkar, økið skal lýsast og skjalfestast, og markamót og mannagongdir lýsast og skjalfestast.

Tilgongdin er mett at taka tilsamans 2 ½ ár. Tá verður verandi 3V skipan, ið er ein veitingar- og konteringsskipan, niðurløgd, tí henda skal byggjast inn í Cosmic.

Skipanin skal í ávísan mun lagast til tørvin á eldraøkinum. Tí er ikki ráðiligt at seta fullu nýtsluna av skipanini í verk í øllum økjum samstundis. Ætlanin er tí at byrja við royndarøkjum. Kommunufelagið hevur her mælt til, at royndarøki verða NBH (norðoyggjar) og eitt av heimunum í Tórshavn (Boðanesheimið).

**Kostnaðarmeting 2018-2021**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 221<br><br>Formansins merki: |

| Kostnaður | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2018 | | 2019 | 2020 | 2021 | |
| **Evni** | **Íløla** | **Rakstur** | **Rakstur** | **Rakstur** | **Íløga** | **Rakstur** |
| **Rakstur** | | | | | | |
| Servarar, undirstøðukervi | | 200.000 kr | 200.000 kr | 200.000 kr | | 200.000 kr |
| Applikatiónssupport | | 900.000 kr | 1.500.000 kr | 1.500.000 kr | | 1.500.000 kr |
| Cosmic Licensur | | 500.000 kr | 850.000 kr | 1.150.000 kr | | 1.200.000 kr |
| Linja til Elektron | | 50.000 kr | 50.000 kr | 50.000 kr | | 50.000 kr |
| Verkætlanarleiðsla (KF) | | 900.000 kr | 900.000 kr | 600.000 kr | | 450.000 kr |
| **Rakstur tilsamans** | | **2.550.000 kr** | **3.500.000 kr** | **3.500.000 kr** | | **3.400.000 kr** |
| | | | | | | |
| **Íløgur** | | | | | | |
| Servarar backbone Cosmic | 330.000 kr | | | | 2.000.000 kr | |
| Nova røktarmodul | 600.000 kr | | | | | |
| **Íløgur tilsamans** | **930.000 kr** | | | | | |
| | | | | | | |
| **Allar útreiðslur tilsamans** | | **3.480.000 kr** | **3.500.000 kr** | **3.500.000 kr** | | **5.400.000 kr** |

Kostnaðurin verður býttur millum kommunurnar eftir talinum at borgarum eldri enn 67 ár. Gjaldið fyri Tórshavnar kommunu í 2018 verður eftir hesum kr. 1.320.261 (38%).

Aftrat verða ávísar útreiðslur til starvsfólk í sambandi við upplæring, avloysarar v.m. Fyrisitingin mælir greitt til, at Comsic verður ment og sett í verk til eldraøkið eisini. Arbeitt hevur verið við hesum síðan arbeiðið at yvirtaka eldraøkið byrjaði. Tá fult sett í verk, verður gamla 3V skipanin niðurløgd og árligi kostnaðurin av tí, umleið kr. 300.000, spardur burtur.

Í mun til fíggjartørvin, so er í uppskotinum til fíggjarætlanin 2018 ikki lagt upp fyri hesum. Mett verður neyðugt við nýggjari játtan til endamálið, eisini tí, at talan verður um varandi kostnaðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla eldranevndini til at geva Kommunufelagnum tilsøgn um, at Tórshavnar kommuna tekur lut í ætlanini við Cosmic, og at játtan kr. 1,5 mió verður fingin til vega í fíggjarætlanini 2018 til kontu 2720 Heilsuhúsið.

**Eldranevndin 20. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Nú fíggjarætlanin fyri 2018 er samtykt, kann staðfestast, at eingin játtan er sett av til útvegan av Cosmic til Heilsu- og umsorganartænastuna. Við støði í fíggjarætlanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni fyri 2018 verður mett heldur ikki rúm fyri so stórari upphædd til endamálið uttan stór inntriv í annað virksemi, ið annars er raðfest.

Tí hevur ikki borið til at boða Kommunufelagnum frá tilsøgn um luttøku í verkætlanini.

Sum skilst er Tórshavnar kommuna einasta kommunala øki í landinum, sum ikki verður við í verkætlanini.

Talan er um eina verkætlan, sum fyrisitingingin og fakfólk í eldrarøktini í Tórshavnar kommunu meira enn nakar annar hevur viljað raðfest sum avgerandi partur í trygdini, dygdini og røttu tænastuni til einstaka borgaran.

Sum støðan er, fær Tórshavnar kommuna ikki møguleikan at mynda og tillaga skipanina til tørvin hjá Heilsu- og umsorganartænastuni, sum er nógv tann størsti brúkarin og veitarin av eldrarøkt, umframt at Heilsu- og umsorganartænastan ikki fær lut í talgildu samskiftismøguleikunum við sjúkrahúsverkið og kommunulæknarnar annars, og er hetta stórt afturstig.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla staðiliga til at fáa til vega neyðuga játtan til Cosmic samsvarandi tilmælinum til fundin 20. november 2017.

**Eldranevndin 08. januar 2018:** Tikið til eftirtektar.

**Ískoyti:**
Cosmicverkætlanin er komin nakað í drag, partvís tí enn veður bíða eftir, um TK er partur av verkætlanini. Øll kommunalu samstørvini hava givið tilsøgn og sett pening av til verkætlanina. Ein onnur grund til, at verkætlanin ikki er byrja enn, er at Kommunufelagið er farin at endurskoða víðari framferðarháttin og ger uppskot til verkætlanarleiðslu. Av tí at verkætlanin ikki er farin í gongd sum ætla, kann væntast at kostnaðurin fyri 2018 verður nakað lægri enn fyrst mett. Til ber tó ikki í løtuni at siga hvat munurin vildi verið. Ætlandi kann verkætlanin fara av bakkastokki til heystar og í tí sambandi verður nýggj kostnaðarmeting gjørd.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og Trivnaðarstjórin mæla til at geva Kommunufelagnum tilsøgn um, at Tórshavnar kommuna tekur lut í ætlanini við Cosmic. Tá tíðarætlan og dagførd kostnaðarmeting er fingin til vega verður málið at leggja fyri fíggjarnevnd aftur. Hædd eigur harumframt takast fyri kostnaðinum í fíggjarætlanini fyri 2019.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 79/18 Nýggjar kommunulæknaviðtalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 11.12.2017 | 52/17 | 17/04062-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 318.1/17 | 17/04062-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 08.01.2018 | 3/18 | 17/04062-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 05.02.2018 | 9/18 | 17/04062-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 37/18 | 17/04062-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 64/18 | 17/04062-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 71/18 | 17/04062-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 13.03.2018 | 18/18 | 17/04062-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 24.04.2018 | 21/18 | 17/04062-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 128/18 | 17/04062-1 |
| 11 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 79/18 | 17/04062-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Heilsumálaráðið hevur fráboðað kommununi, at tveir nýggir læknar eru normeraðir til Tórshavnar kommunu at seta skjótast gjørligt.

Kommunan skal í hesum sambandi fáa til vega nýggj læknaviðtaluhøli. Harumframt verður mett, at læknaviðtalurnar í Frúutrøð og Berjabrekku ikki lúka nútíðarkrøv. Talan er sostatt um 6 læknaviðtalur.

Fyrisitingin kannar í løtuni møguleikar fyri at útvega høli at leiga soleiðis, at til ber at savna læknar í t.d. 2 deplum.

Greitt verður nærri frá, hvørjir møguleikarnir eru sum grundarlag fyri støðutakan til víðari tilgongd.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Trivnaðarnevndin 11. desember 2017**: Umrøtt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Trivnaðarnevndin 08. januar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Trivnaðarnevndin 05. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Sum kunnað er um áður, hevur fyrisitingin arbeitt við møguligum leigumáli bygningurin Smyrilsvegur 20 á Hálsi (matr.nr. 1326z) til tess at hýsa seks kommunulæknum.

Støðið undir hesum er, at landsstýrið hevur fráboðað, at tvey nýggj kommunulæknastørv skulu skipast í Tórshavnar kommunu. Harumframt metir fyrisitingin, at viðtalurnar í ávikavist Frúutrøð og Berjabrekku, sum tilsamans fevna um fýra kommunulæknar, ikki longur nøkta nútíðarkrøv til kommunulæknaviðtaluhøli, og tí eiga at verða niðurlagdar.

Harumframt hevur Heilsutrygd biðið kommununa um at veita høli til einar tríggjar kliniskar dietistar. Kommunulækni kann ávísa borgarar til kliniskan dietist, sum Heilsutrygd hevur í starvi. Virksemið hjá klinisku dietistunum fevnir um alt landið, men burtursæð frá Suðuroy virka allir í dag í høvuðsheitum í og út frá ymsum kommunulæknaviðtalum í Havn, men hava ikki nøktandi pláss. Heilsutrygd hevur ynski um, at klinisku dietistarnir eru savnaðir í Havn.

Heilsutrygd hevur eisini biðið um, at smábarnavirksemið hjá Gigni fær høli frá kommununi. Hetta virksemið heldur í dag til í hølum hjá landinum (Kristnastova), ið ikki eru egnaði til virksemið. Sambært tulking frá Heilsumálaráðnum (sí skjal) eiga kommunurnar at bera útreiðslur til høli og útbúna til heilsufrøðingar sambært lógini um fyribyrgjandi heilsukanningar hjá børnum og ungum.

Kommunan hevur við støði í hesum heitt á ráðgeva SNA Arkitektur/Árni Winther Arkitektar um at gera uppskot til innrætting at hýsa øllum teimum omanfyri nevndu endamálunum í bygninginum Smyrilsvegur 20. Eisini hevur kommunan havt samskifti við kommunulæknar og Heilsutrygd um tørvin bæði viðvíkjandi kommunulæknaskipanini, klinisku dietistunum og Gigni.

Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á kommunulæknaøkinum er ásett í *lóg um kommunulæknaskipan*, har tað er ásett, at Heilsutrygd setir kommunulæknar og avloysarar í starv, og at kommunurnar útvega og rinda viðtaluhølir við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan. Krøvini til kommunurnar hesum viðvíkjandi eru so aftur útgreinað í *kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum*.

Við støði í samskiftinum við kommunulæknarnar er greitt, at formliga grundarlagið, her serliga viðvíkjandi kunngerðarkrøvunum um høli, als ikki er í samsvari við faktiska virksemið í fleiri av viðtalunum. Fleiri kommunulæknar hava eitt nú útbúgvingarlækna starvandi í viðtaluni, men lóg og kunngerð fyrihalda seg ikki til økta hølis- og rakstrartørvin, ið hesin hevur við sær. Samstundis er hetta tó við til at betra um tænastuna til borgaran og av størsta týdningi til tess at fáa vega nýggjar kommunulæknar.

Ásannandi ósamsvarið millum formligu krøvini til kommununa sambært kunngerðini og hølistørvin, sum faktiska virksemið í viðtalunum í dag krevur, so hevur kommunan heitt á ráðgevan um at gera uppskot til innrætting, sum í ávísan mun víkir frá kunngerðini, ið her heldur verður sæð sum ásetingar um minstukrøv til viðtalur, fyri á tann hátt betri at kunna nøkta tørvin og ynskini hjá kommunulæknunum til nútíðar viðtalur.

<u>Bygningurin og uppskot til leigusáttmála</u>

Talan er um 2.680 fermetrar stóran bygning. Atkomuviðurskiftini eru góð, parkeringsmøguleikarnir somuleiðis góðir. Sambært ráðgevunum er upprunabygningurin í góðum standi og úr góðum tilfari. Bygningurin hevur gjøgnum tíðina verið brúktur til ymisk endamál, og skal bygningurin hýsa kommunulæknaviðtalum v.m., er neyðugt at skipa

innrættingina øðrvísi, ið eisini hevur við sær ávísar broytingar í installatiónum, umbygging av vesum v.m.

Eitt fyribils uppskot til innrætting og skipan av bygninginum bæði til kommunulæknaviðtalur, høli til klinisku dietistarnar og til heilsufrøðingarnar hjá Gigni er gjørt. Staðfest er, at til ber at skipa seks kommunulæknaviðtalur í bygninginum við nøktandi tali av hølum í part – tríggjar í hvørjari hædd, umframt høli til klinisku dietistarnar og Gigni.

Ráðgevin arbeiðir nú víðari við uppskotinum saman við kommununi, brúkarum og Heilsutrygd. Eitt neyvari projektuppskot góðkent av brúkarum og kostnaðarmeting ætlast latið kommununi at góðkenna umleið 20. apríl. Tá projektið er góðkent skal arbeiðið bjóðast út, og fyrr enn tá ber ikki til at staðfesta endaliga byggikostnaðin. Harumframt kemur kostnaður til útgerð, tól og innbúgv.

Samráðst hevur verið við P/F Betri, ið er eigari av bygninginum, um leigusáttmála, sí hjálagt. Í uppskoti er 15 ára leigusáttmáli, har leigan er kr. 1.100,00 fermeturin um árið. Hetta svarar til mánaðarliga leigu uppá kr. 245.667 u/mvg. Árliga leigan verður javnað við støði í tí seinasta upplýsta brúkaraprístalinum, tó í minsta lagi 1% og í mesta lagi 2,5% um árið.

Í samskiftinum við P/F Betri hevur verið umrøddur møguleikin fyri ískoytisavtalu til leigusáttmálan, har útleigarin í fyrstu atløgu ber kostnaðin av at gera tillagingarnar í bygninginum og at útvega útgerð, tól og innbúgv til virksemið. Tá kostnaðurin er endaliga goldin, rindar kommunan hann aftur við rentu til útleigaran yvir sama tíðarskeið sum leigusáttmálin. Endaligt uppskot til slíka avtalu kann ikki gerast fyrr enn ein ítøkilig kostnaðarmeting er tøk ella tá útboð hevur verið, men metast má neyðugt, at prinsippiel støðutakan til henda leist eigur at verða tikin longu nú, so at til ber at halda fram við fyrireikingunum, harundir neyðug útboð. Alternativ til henda leist er at fíggja ætlanina yvir íløguætlan kommununnar.

<u>Rakstur</u>

Kommunulæknatænastan í Tórshavnar kommunu økist sum omanfyri lýst við tveimum ársverkum. Hædd er ikki tikið fyri hesum á kontu 2210 kommunulæknatænastur í fíggjarætlanini 2018. Hetta hevur við sær øktan fíggjartørv til vanliga raksturin. Leigumálið í sjálvum sær hevur harumframt øktar rakstrarútreiðslur við sær. Hinvegin eigur leigumálið í Berjabrekku at verða sagt upp, og harvið kunnu mótroknast kr. 240.000 í leigugjaldi árliga. Frúutrøð er kommunal ogn.

Mett verður, at økta virksemið og broyttu fortreytirnar annars undir verandi rakstrarjáttan, har tað eisini verður farið úr tveimum bygningum, hevur við sær so mikið stórar broytingar, at játtanin til kontu 2210 kommunulæknatænastur eigur at verða endurskoðað sum liður í neyðugu eykajáttanini fyri inniverandi fíggjarár. Aftrat kemur lutfalsligi kostnaðurin av møguligu ískoytisavtaluni umrødd omanfyri.

Partur av leigumálinum er ætlaður smábarnavirkseminum hjá Gigna. Heilsufrøðiskipanin hevur egnað rakstrarkontu 2211, men fevnir í dag bert um heilsufrøðiskipanina í fólkaskúlunum, sum Gigni eisini stendur fyri, og sum hevur viðtaluhøli í skúlunum. Sum omanfyri lýst er tulkingin, at kommunan eisini eigur at bera útreiðslur til høli og útbúna til allar fyribyrgjandi heilsukanningar hjá børnum og ungum, tvs. eisini teimum undir skúlaaldri. Í sambandi við smábarnavirksemið er talan um uml. 8 starvsfólk. Sambært uppskotinum til innrætting skal Gigni hava nakað undir 200 fermetrar, tó felagsøki og tøknirúm v.m. (kjallarin) undantikið. Hesin partur av leigumálinum eigur at verða bókaður á kontu 2211

heilsufrøðiskipanin samsvarandi lutfalsligu fermetrunum av samlaða leigumálinum, harundir eisini møguligu ískoytisavtaluni umrødd omanfyri. Harumframt skal leggjast upp fyri hægri rakstrarútreiðslum. Eisini henda konta eigur tí at verða endurskoðað sum liður í neyðugari eykajáttan.

**Samanumtikið:**
Til tess at fremja ætlanina skal avgerð takast um hesi viðurskifti:

- Fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála við P/F Betri um bygningin Smyrilsvegur 20, kostnaður kr. 245.667 um mánaðin fyrsta árið

- Uppskot um at gera ískoytisavtalu til leigusáttmálan viðvíkjandi útlegg og afturrindan av byggikostnaði v.m.

- At viðtalurnar í Frúutrøð verða niðurlagdar, tá nýggjar eru tøkar

- At viðtalurnar í Berjabrekku verða niðurlagdar, tá nýggjar eru tøkar, og at leigusáttmálin hesum viðvíkjandi verður uppsagdur

- At konturnar 2210 og 2211 fáa eykajáttan til kostnaðin av leigusáttmálanum, ískoytisavtaluni og broytta raksturin annars.

Harumframt skal støða takast til endaliga projektuppskotið, útboð v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin leggja málið til umrøðu sum grundarlag fyri seinni avgerð, tá samlað kostnaðarmeting og fígging fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Útsett.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Tikið av skrá.

# 80/18 Skoytubreytin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 394/16 | 16/04312-1 |
| 2 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 292/16 | 16/04312-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 305/16 | 16/04312-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 68/17 | 16/04312-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 187/17 | 16/04312-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 168/17 | 16/04312-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 28.09.2017 | 227/17 | 16/04312-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 217/17 | 16/04312-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 212/17 | 16/04312-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 245/17 | 16/04312-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 216/17 | 16/04312-1 |
| 12 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 271/17 | 16/04312-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 27/18 | 16/04312-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 16/04312-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 95/18 | 16/04312-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 121/18 | 16/04312-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 97/18 | 16/04312-1 |
| 18 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 80/18 | 16/04312-1 |
| 19 Býráðsfundur | | | 16/04312-1 |

**Málslýsing:**
Skoytubreytin var fyrstu ferð sett upp í 2011 og hevur síðani verið opin uml. 2 mánaðir á hvørjum ári kring ársskiftið. Ymiskt er, hvussu tað hevur hilnast við rakstrinum, men sum heild góð undirtøka.

Á kontu 5716 Skoytubreyt er ikki tøk fígging til at breytin letur upp hetta tíðarskeiðið.

Útgreining viðv. tørvi á eykajáttan í sambandi við uppseting, rakstur og niðurtøku av skoytubreyt – desember 2016 til og við januar 2017.

Farna tíðarskeið var dagligi raksturin útveittur til privatan veitara. Harumframt eru ymiskar útreiðslur í sambandi við flutning, tilfar vm. Hallarumsitingin (Ítróttaanlegg) hevur ábyrgd av anlegginum. Inntøkurnar frá skoytubreytini fara til kontuna.

Leysliga mett er talan um fylgjandi útreiðslur og inntøkur:

Rakstraravtala, uppseting o.a. kr. 270.000 fyri tíðarskeiðið.

Ravmagnsútreiðslur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.
Atgongumerkjainntøkur mettar til uml. kr. 120-160.000 fyri tíðarskeiðið.

Samlaður fíggjartørvur fyri tíðarskeiðið umleið kr. 270.000 um óvissa viðvíkjandi inntøkum og ravmagni umleið kr. 30.000. Í alt kr. 300.000.

Ikki er endaliga avrátt viðvíkjandi staðseting.

Standurin og tøknin á verandi skoytubreyt er um at vera ótíðarhóskandi, men verður mett at hon kann roynast einaferð enn.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at játta á kontu 5716 Skoytubreyt kr. 300.000 fyri 2016 at fíggja av kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Skoytubreytin er í ringum standi (bæði kølianlegg og slangur), og verður ikki mett ráðiligt at halda fram við verandi anleggi. Mett verður, at hon eigur at verða burturbeind nú, tí goymsluplássið á Hjalla kostar Ítróttaranleggum einar 65 tkr. um árið.

Um ynski er framhaldandi at hava eina skoytubreyt, ber til at velja millum eina líknandi tøkni við nýggjum og betri kølianleggi ella eina sonevnda íslíkisbreyt (kunstísbreyt). Ein breyt á 20 m x 30 m (uml. 600 m$^2$) og annað tilhoyr, kostar leysliga mett (ref. prísir) uml. 1.000 tkr. Niðanfyri er leinkja til íslíkisbreyt https://drive.google.com/file/d/0B44uDuymJfBeeTEtRmdiVWx5Y0E/view

Peningur er ikki settur av til endamálið, og má um so er raðfestast í 2017 ella seinni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Ítróttaanlegg kann burturbeina gomlu skoytibreytina.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Ynski er sett fram at fáa eina skoytubreyt aftur í býin til komandi vetur. Í hesum sambandi eru tveir høvuðsspurningar at greiða.

Tann fyrri er ein møgulig staðseting, ið eisini ger av, hvussu stór breytin kann vera. Farnu tvey árini hevur hon staðið á Vaglinum, og áðrenn tað nøkur ár í garðinum við Finsen (fyrrv. kommunuskúlagarðurin) og á Skálatrøð. Fylgjandi møguleikar eru hugsandi til komandi staðseting.

- Vaglið
- Skálatrøð
- Í Gundadali við Gundadalshøllina (tó har er ein avbjóðing viðv. plássi og atkomu í sambandi við komandi útbygging av Tórsvølli)

- Í Gundadali á parkeringsøkinum við Ovara vøll

Á flestu av hesum støðunum vilja vera ávísar ella størri avbjóðingar. Harumframt er spurningur, hvat umhvørvi breytin skal vera partur av. Farnu árini hevur breytin vanliga verið opin í desember og januar á hvørjum vetri.

Annar spurningurin er kostnaðurin. Fyribils metingar eru, at ein vanlig breyt við ektaðum ísi, umframt ymiska útgerð vil kosta umleið 1.000 tkr. og somuleiðis ein íslíkisbreyt. Fremsti fyrimunurin við íslíkisbreyt er, at hon ikki brúkar streym, men kannað eigur at verða, hvussu ein slík roynist ella upplivist um so er, at ynskið er at útvega eina slíka.

Umframt løgukostna er eisini neyðugt við ávísari nettojáttan til raksturin, tí higartil hava gjøldini ikki dekkað allan raksturin og uppseting, tó so, at helst ber til at hækka gjøldini nakað uttan at tað vil ávirka eftirspurningin hjá brúkarunum stórvegis.

Skal nýggj breyt verða tøk at taka í nýtslu síðst í november, skal berast skjótt at.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a) at taka støðu til, um nýggj skoytubreyt skal fáast til vega, og um so er, at taka støðu til fíggingina av hesum
b) at umrøða møguliga staðsetingar og beina tann spurningin til byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við at fáa til vega nýggja skoytibreyt, at staðseta hana í miðbýnum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Tað eru avmarkaðir møguleikar í miðbýnum í mun til staðseting til skoytubreyt og stødd.

Í sambandi við framtíðar býarplanlegging av býnum, kundi skoytubreytin verið hugsað inn sum ein liður í eini langtíðarloysn, t.d. sum ein partur av torginum í Vágsbotni ella á Skálatrøð, tá Tjóðleikhúsið gerst aktuelt. Staðsetingin á Vaglinum seinnu árini hevur eisini verið væl móttikin av brúkarum.

Niðanfyristandandi uppskot leggja upp til skoytubreytir, ið lættliga kunnu setast upp og takast niður aftur. Staðsetingar kunnu roynast, so funnið verður fram til bestu langtíðarloysnina at staðseta eina skoytubreyt, antin um talan er um eina loysn í miðbýnum ella í sambandi við eina møguliga multihøll.

Í sambandi við spurningin um møguliga staðseting av skoytubreytini, er býarskipanardeildin komin fram til tríggjar møguleikar, umframt at víst verður á nøkur alternativ, sí kortskjal journal nr. 16/04312-7:

**Vágsbotnur**
Torgið í Vágsbotni er ein liður í miðbýarætlanini, og tað er væl hugsandi, at ein skoytubreyt kann gerast ein støðug (vetrar)loysn í sambandi við eina dagføring av verandi skipan á økinum. Økið liggur í hjartanum í miðbýnum og við trappuni sum áskoðarpláss og kaffistovunum út eftir bryggjukantinum er hetta ein eyðsæð staðseting í mun til býarplanleggingina og býarlívið. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 m$^2$, og kundi staðsetingin verið roynd sum ein fyribils verkætlan í sambandi við dagføringina av verandi skipan á økinum.

**Vaglið**
Her hevur skoytubreytin staðið áður, og hevur tað riggað væl, hóast hendinga mótmæli er komið um at handlar missa viðskiftafólk. Pláss er fyri eini skoytubreyt áleið 400 $m^2$.

**Við Bókhandilin**
Triðja uppskotið er at staðseta eina skoytubreyt millum Tinghúsvøllin og Bókhandilin. Henda loysnin er ikki roynd áður, men økið liggur eisini í hjartanum í miðbýnum og kann virka fyri, at skoytubreytin gerst sjónlig í býarmyndini og tískil virkar dragandi fyri fólk til gongu. Pláss er fyri eini skoytuberyt áleið 250-350 $m^2$.

Harafturat ber til at vísa á nakrar alternativar staðsetingar:
- **Skálatrøð,** óavmarkað stødd. Uml. 400 $m^2$
- **Frúutrøð,** økið liggur ikki í miðbýnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 500 $m^2$
- **á Glasheyggi,** ikki mitt í býnum, men eitt uppskot til staðseting, har breytin helst kann standa longri enn á Vaglinum, um tørvur er á tí, uml. 400 $m^2$

Í øllum uppskotunum omanfyri skulu atlit takast til ferðslu og parkering.

Viðmerkjast skal, at øll uppskotini á kortskjalinum eru vegleiðandi og kunnu tillagast økið.

**Skjøl:**
Uppskot um staðseting til skoytubreyt 16/04312-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja staðsetingina í Vágsbotni ella at vísa á eina av útvaldu staðsetingunum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at fáa staðsetingina í Vágsbotni betur lýsta, at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti.**
Gjørdar eru ávísar forkanningar viðv. møguleikum fyri keypi og leigu av eini skoytubreyt við ísi. Ymiskar tekniskar loysnir eru møguligar. Eitt nú við gummislangum ella alurørum í sjálvari ísskoytubreytini, umframt kølikompressara. Aðra útgerð til breytina eigur Ítróttaanlegg longu frá undanfarnu skoytubreyt. Veljast kann eisini at keypa bandar, ið eru gjørdir til endamálið ella brúka ta sjálvgjørdu loysnina, ið Ítróttaanlegg hevur gjørt og brúkt higartil. Ávís sparing er í tí.

Vegna knappa tíð verður mett frægast at leiga eina skoytubreyt (stødd umleið 20 m x 25 m) og kunnu so fyrireikingar verða gjørdar til at fyrireika keyp av eini skoytubreyt til sesongina 2018/19. Til ber bæði til at keypa eina nýggja breyt og brúktar.

Fyri leigu av eini breyt, umframt flutning, tilgerð av lendinum undir breytini og uppseting v.m. verður mett neyðugt við eini játtan á uml. 600 tkr. Roynt verður at fáa til vega tvey tilboð uppá leigu av skoytubreyt.

Keyp er eisini møguligt og krevur tá eina játtan á tils. umleið 2 mio.kr.

Fígging er sum er ikki tøk á konto 5716 Skoytubreytin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leiga eina ísskoytubreyt til sesongina 2017/18 og í hesum sambandi játta kr. 600.000 til kontu 5716 skoytubreyt.

Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til játta kr. 600.000 av kontu 20910 aðrar inntøkur til kontu 5716 skoytubreyt

**Mentamálanevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, mæla til at skoytubreytin heldur verður keypt enn leiga og at finna eina endaliga staðseting til eina framtíðar skoytubreyt í miðbýnum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum i mentamálanevndini og vísir á, at leigan av skoytubreyt ikki er boðin út.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini 28. september 2017, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

Ímóti atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Eftir at umsitingin hevur kannað Vágsbotn sum uppskot til staðseting av skoytubreyt, eru fleiri upplýsingar at taka atlit til.

Umboð frá teknisku deild og vegadeildini halda sum nú er ikki, at Vágsbotnur er ein egnað staðseting til skoytubreyt í ár, hetta eisini orsakað av stuttum skotbrái til skoytubreytin skal setast upp.

Víst verður á, at hæddarmunurin frá lægsta punkti við Kallkyn til hægsta punkt við Mylnugøtu er 75 cm. Ein uppfylling fyri at fáa alt økið uppá 380 $m^2$ vatnrætt kemur at krevja uml. 250 $m^3$ av fyllu ella svarandi til 20 billess.

Tilfarið verður lánt frá goymsluni hjá Tórshavnar kommunu við Oyggjarvegin, síðani lessað/koyrt oman til Vágsbotn og planerað út og trumlað. Tá breytin skal takast niður aftur, verður tilfarið grivið uppaftur og koyrt á goymsluna aftur. Vegadeildin metir, at hetta kemur at kosta umleið kr. 50.000. Afturat hesum arbeiði skulu kantar byggjast kring økið, sum heldur fylluna.

Afturat omanfyri nevndu avbjóðingum við Vágsbotni sum uppskot til skoytubreyt kunnu nevnast:
- Avbjóðingar kunnu standast av, at vegabrunnurin, sum tekur tað mesta av yvirflatuvatni í økinum, fer í fylluna.
- Tvær ljósmastrar skulu flytast ella takast burtur.
- Ferðslan skal umleggjast.
- Nólsoyar Páll kemur at standa við ísi upp til knøini.
- Streymveitingin á økinum er í løtuni ikki nøktandi til eina skoytubreyt, sum krevur 160 KW.

Umsitingin metir tí, at besta loysnin til at staðseta skoytubreytina hendan veturin er á Vaglinum. Parkeringsplássini verða rættaði upp við skervi, soleiðis at breytin verður vatnrætt.

Samstundis kann umsitingin arbeiða víðari við at staðseta skoytubreytina í Vágsbotni næsta vetur sum eina fyribils ella varandi loysn. Hetta kann gerast í sambandi við miðbýarætlanina, sum endurskoðar Vágsbotn bæði við atliti til torgið, ferðslu og skipan av økinum sum heild.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tekniska deild og vegadeildin hava verið inni yvir málið og viðgjørt staðsetingina í Vágsbotni í mun til streym, ferðslu og onnur viðkomandi viðurskifti.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðkenna staðsetingina á Vaglinum, har hon áður hevur verið staðsett, at umsitingin arbeiðir víðari við verkætlanini at staðseta eina skoytubreyt í Vágsbotni í sambandi við miðbýarætlanina og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
<u>Reglugerð fyri skoytubreytina</u>
Fyri greiðari og betri kundatænastu á skoytubreytini hevur umsitingin saman við Ítróttaanleggum gjørt uppskot til reglugerð fyri brúk av skoytubreytini. Sí hjálagt uppskot. Ætlanin er at fáa eftirmett tilboðið og reglugerðina tá henda sesongin er farin.

Skoytubreyt sesongina 2018/19
Av tí at leiga ella keyp tekur tíð at fyrireika er ynskiligt stundisliga at fara undir tilgongdina um hvør loysn skal brúkast komandi sesong og um staðseting av breytini. Umsitingin vil á fundinum greiða nærri frá kostnaðarmetingin fyri á.v.v. keyp og leigu av eini skoytubreyt og onnur rakstrarviðurskifti og fígging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at samtykkja uppskotið til reglugerð fyri skoytubreytina
b). at umrøða frágreiðingina um møguliga skoytubreyt fyri komandi sesong við atliti til at umsitingin kemur við tilmæli til fundin 7. feb. 2018.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við reglugerðini. Pkt. b varð umrøtt og samtykt at beina spurningum um staðseting í byggi- og býarskipanarnevndina.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Fyri at útvega og reka eina skoytubreyt komandi sesong er neyðugt at fáa greiði á nøkrum spurningum longu nú. Herundir viðv. staðseting, hvørt ein breyt skal leigast ella keypast umframt fígging av hesum.

Hesaferð er hugsað at breytin skal vera virkin frá umleið fyrst í november til medio januar, hetta tí at áhugin tykist vera størstur í byrjani av vetrinum.

Staðfestast kann at skal tilboðið vera aftur komandi sesong er neyðugt við eini eykajáttan í 2018, umframt fígging til møguligt keyp av eini breyt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til møguliga eykafígging í 2018 til tess at leiga ella keypa eina skoytubreyt, ella at taka ein støðg í tænastuni til sesongina 2019/20.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at heita á umsitingina um at seta upp hóskandi valmøguleikar.

**Ískoyti**
Í verandi støðu er ikki avgerð tikin um aðrar møguligar staðsetingar til komandi sesong. Av tí at tíðin gongur undan og fyri at fáa greiði á fígging og um ynski heldur er at keypa eina breyt er neyðugt at taka eina støðu í mai-juni.

Tí verður tikið útgangsstøði í fall ein breyt skal vera til komandi sesong at hon aftur verður á Vaglinum. Vegna avbjóðingar við at fáa lendið heilt slætt, er frægast at nýta somu tøkni eins og higartil t.v.s. EPDM gummislangur við kølara v.m.

Tá ein meiri varandi staðseting er fingin, hevði verið meiri ynskilig við nýggjari tøkni við alurørum, men sum krevur eitt slættari lendi. Ætlandi verður breytin aftur umleið 25 m x 20 m. Ætlandi verða minst 2 veitarir spurdir um leigu av breytini. Eisini er ætlanin at bjóða raksturin av breytini út til minst 2 veitarar.

Fyri leigu av eini breyt, umframt flutning, tilgerð av lendinum undir breytini, uppseting, rakstur í 2018 (nov-des.) verður mett neyðugt við eini nettojáttan á uml. 750 tkr. Í verandi støðu eru umleið 480 tkr. tøkar, men meirnýtslan í 2017 var umleið 150 tkr. Sostatt er nettotørvurin fyri 2018 umleið 420 tkr.

Á fundinum verður játtanartørvurin og teknisku loysnirnar nærri greinaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at leiga eina ísskoytubreyt til sesongina 2018/19 og í hesum sambandi játta kr. 420.000 til kontu 5716 skoytubreyt. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta tær írestandi 420.000 kr. av konto 90210 sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 81/18 Víðarimenning av Tórshavnar býarsavni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 71/17 | 17/01122-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 136/17 | 17/01122-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 202/17 | 17/01122-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 298/17 | 17/01122-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 262/17 | 17/01122-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 11/18 | 17/01122-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 68/18 | 17/01122-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 36/18 | 17/01122-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 94/18 | 17/01122-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 144/18 | 17/01122-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 98/18 | 17/01122-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 81/18 | 17/01122-2 |

**Málslýsing:**

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu er orðað viðv. Tórshavnar býarsavni v.m.:

"Tórshavnar býarsavn skal koma í trygga legu, eins og fornminnisframsýningin hjá Søvnum Landsins eigur at koma nærri miðbýnum. Hetta hevði gjørt savnið munandi meira atkomuligt, bæði fyri føroyingar og útlendsk ferðafólk. Samgongan fer at arbeiða fyri, at Müllers Pakkhús verður sjóvinnusavn, sum lýsir sterka søguliga tilknýtið millum Havnina og havið."

Býarsavnið virkar sbrt. viðtøkum seinast broyttar av Tórshavnar býráð 11. september 2008 og góðkendar av landsstýriskvinnuni í mentamálum 10. november 2008. Reglugerðin er hjáløgd.

Endamálið er m.a.:

a) at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst er í løgtingslóg um friðing av føstum fornminnum og bygningum.

b) at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum. Føroya Fornminnissavn skal góðkenna útgrevstraræetlanina og geva útgrevstrarloyvi.

c) at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til søguligar hendingar.

d) at hava í hondum savnan at staðarnøvnum og munnliga goymdum søgnminnum og hava hetta tilfar greitt til vitskapliga gransking.

e) at savna saman mest møguligt tilfar av øllum, ið viðvíkur Tórshavn, so allir tættir av Havnar søgu kunnu verða skrivaðir, og um neyðugt at skipa fyri, at hon verður skrivað.

f) Savnið kann útvega sær fígging til verkætlanir uttaneftir. Landskassin hevur tó ikki endurgjaldsskyldu fyri útreiðslur savnsins, ið verða fíggjaðar á henda hátt.

Tórshavnar býarsavn er skipað sum kommunalur stovnur undir mentamáladeildini, og savnvørðurin (starvið ósett p.t.) vísir fyrisitingarliga til leiðaran á mentamáladeildini.
Játtanin til býarsavnið er á kontu 5510 Tórshavnar Býarsavn og er í 2017 1.166 tkr. Í nøkur ár er kontan í stóran mun nýtt til at skriva Havnar søgu. Tann verkætlanin verður ætlandi liðug í heyst, tá 6. bind verður liðugt og útgivið.

Í løtuni er fíggjarætlanin hjá sjálvum Býarsavninum (uttan arbeiðið við Havnar søgu) umleið 90 tkr. Goymslan er í leigaðum hølum í Slættanesgøtu, harumframt eru útreiðslur til el, gjøld fyri alarmar og telefonlinju til alarmar. Ein lítil upphædd verður sett av til keyp av lutum.  Søvn Landsins endurrinda savninum sambært bygdasavnslógini 60% av góðkendum rakstrarútreiðslum. Endurgjaldið hevur seinastu árini verið umleið 55 tkr. og verður flutt kommununi, tá roknskapur er sendur inn.

Virksemið hjá Tórshavnar Býarsavni hevur verið avmarkað síðan 2009. Einki savnsstarvsfólk er beinleiðis knýtt at savninum, fyri uttan teir báðar søgufrøðingarnar, ið skriva Havnar Søgu. Mentamáladeildin umsitur savnið/goymsluna og avgreiðir tað, sum er neyðugt viðvíkjandi savninum mótvegis Søvnum Landsins og annars áhugaðum borgarum.  Fólk venda sær av og á til deildina um lutir, tey vilja lata ella selja savninum. Eisini eru fyrispurningar um at síggja eitthvørt á goymsluni.

Onnur søvn í kommununi
Bygdasøvn eru í Kollafirði og í Nólsoy. Bæði eru skipað sum sjálvsognarstovnar. Kollafjarðar Bygdarsavn fær árligan stuðul frá kommununi eftir umsókn.

Praktikklesandi
Sum liður í fyrireikingunum av størri virksemi innan savnsøkið er avtala gjørt við Fróðskaparsetrið um, at lesandi á masterstigi innan søgu kemur í 3 mánaða praktikk frá september - november 2017 og kemur at gera greiningar viðv. innihaldi og skipan av einum nýmótans býarsavni.

Savnið hjá Birgari Johannessen
Víst verður til málið um stuðul til býarsavnið hjá honum. Hann ynskir, at Tórshavnar Kommuna yvirtekur savnið hjá honum í heyst uttan viðurlag. Avtalað er, at farið verður undir at skráseta lutirnar í savninum í summar. Ætlandi verður farið undir arbeiðið, so skjótt tað er greitt viðv. skrásetingarskipan.

Skráseting
Arbeitt verður við at gerast partur av skrásetingarskipan hjá Søvnum landsins.

Høli
Býarsavnið hevur í verandi støðu ongi framsýningarhøli. Hølistørvurin er knýttur at hvat fyri vavi virksemi skal hava. Nærri greiningar verða gjørdar av hesum samsvarandi tilgongdini sum lýst omanfyri.

Rakstrarískoyti frá Tjóðsavninum
Sbrt. galdandi savnslóg t.e. § 4, stk. 2 í bygdasavnslógini rindar landið fyri 60% av góðkendum rakstrarútreiðslur til slík søvn.

Tjóðsavnið nærri býnum
Savnið hevur sum heild verið í eini rembingartíð. Ætlanin er at fara í dialog við Tjóðsavnið fyri at avklára viðv. teirra framtíðarætlanum og í hvønn mun tað kunnu vera samvirknaðir millum ætlaða virksemi hjá Tórshavnar býarsavni og Tjóðsavninum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). At taka støðu til yvirtøku av savnslutunum í savninum hjá Birgari Johannessen.
b). At umrøða hinar staklutirnar í málinum við atliti til, at umsitingin ger nærri tilmæli um ítøkiligu viðurskiftini til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við punkt a) og punkt b) umrøtt.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Ískoyti:**
Umsitingin er byrjað upp á innleiðandi samskifti við Tjóðsavnið um hetta mál. Herundir er spurningurin umrøddur um stuðul frá landinum til virksemi sbrt. § 4, stk. 1 og 2 í lógini um bygdasøvn. (Ll. Nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentanarsøguligum týdningi, við seinni broyting).

Har er ásett:
*§ 4. Landið letur góðkendum bygdasavni í studningi 60% av rakstrarútreiðslunum.*
*2. stk. Upp í hesar verður roknað: Samsýning til starvsfólk, keyp av gripum, røkt av fornminnum, hiti, ljós, reingerð, innbúgv, leiga av høli o.t. ella renta og avskriving av bygningum, savnið hevur, tá tikið verður við, at landið letur 50% í studningi til keyp ella bygging av savnshúsum og til keyp av jarðføstum fornminnum og bygningum, ið kunnu góðtakast sum fornminni.*
---
Játtanin til Tórshavnar býarsavn hevur farnu árini ligið millum uml. 650 – 1400 tkr. Nettojáttanin í 2017 er 1166 tkr. Sum lýst í málinum og samtykt av nevndini er ætlanin komandi ár og árini framyvir at menna virksemið í Tórshavnar býarsavni.

Nærri frágreiðing og tilmæli kemur ætlandi til fundin í september. Við atliti til at landið kann uppfylla sína lógarásettu skyldu um at rinda 60% av rakstrarútreiðslunum, er neyðugt, at Tórshavnar kommuna longu nú søkir um stuðul til fíggjarárið 2018, tí annars verður tað ov seint í mun til fíggjarætlanartilgongdina hjá landsstýrinum.

Í hesum sambandi hevði verið hóskandi at ásett, hvørja upphædd kommunan hevur í hyggju at játta til endamálið í 2018. Eitt boð er uml. 800-1000 tkr. í nettojáttan.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at áseta, hvørja upphædd ætlanin er at játta til Tórshavnar býarsavn í 2018, og at hetta verður grundarlagið fyri umsókn til landið.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Samtykt at ætlaða upphæddin verður kr. 800.000.

**Ískoyti:**

**Ískoyti:**
Seinastu mánaðirnar hevur mentamáladeildin arbeitt við víðari menning av Tórshavnar Býarsavni. Meginparturin av lutunum á savninum hjá Birgari Johannessen er skrásettur, og Tórshavnar kommuna fer at yvirtaka savnið í seinasta lagi um ársskiftið. Starvsfólk á deildini hava verið uttanlands og kunnað seg um ymisk søvn í Danmark, Finnlandi, Noregi og Íslandi og fingið frágreiðingar og tilfar sum íblástur til arbeiðið, og ein starvslesandi er byrjað, sum næstu tríggjar mánaðirnar m.a. fer at arbeiða við hesum máli.

Umráðandi er at fáa gongd á savnsvirksemið sum skjótast. Tað kann gerast við í fyrsta umfari at hava eina ella fleiri framsýningar, sum eru avmarkaðar í vavi, t.d. við at velja eitt stutt tíðarskeið ella ávíst avmarkað evni at viðgera, sum er ein væl kendur leistur innan savnsvirksemi í Norðurlondum. Soleiðis sær borgarin í kommununi, at virksemi er á savninum.

Í sambandi við stovnsetan av savnsvirkseminum er hóskandi at viðgera fylgjandi spurningar:

<u>Staðseting av savninum – fyribils hølir og varandi loysnir</u>:
Í løtuni hevur Tórshavnar Býarsavn einki framsýningarhøli, og hildið verður, at savnið sum skjótast eigur at seta eina framsýning upp við lutum, savnið eigur. Til endamálið er ikki neyðugt við so ógvuliga stórum høli, eitt dømi kundi verið í parti av hølum hjá Býarbókasavninum. Møguleiki er eisini at hava sonevndar pop-up framsýningar í Müllers Pakkhúsi, og grannahúsini Skeiva Pakkhús eru eisini ein møguleiki, har kommunan møguliga kundi leigað eina hædd til sjóvinnusavn.

Á Frúutrøð verða á vári 2019 møguleikar fyri varandi søvnum, t.d. í bygninginum, har Tórshavnar Musikkskúli heldur til, og læknamiðstøðin á Frúutrøð kundi eisini verið tikin við, tá/um læknaviðtalan flytir í onnur hølir. Skúlabygningurin í Fr. Petersens gøtu, sum í løtuni hýsir næmingum í Skúlanum á Fløtum, verður tøkur, tá nýggi Skúlin á fløtum er liðugur í 2020. Bygningurin verður mettur at vera væl egnaður til framsýningar, tó serliga til eitt samansett framtíðar lista- og býarsavn, har kommunan kundi havt skiftandi framsýningar.

<u>Slag av framsýningum</u>:
Tað er ymiskt, hvussu býarsøvn skipa sínar framsýningar. Umframt at sýna lutir fram og hava frágreiðingar á skeltum eru óteljandi møguleikar við tí tøkni, sum er til taks og sum flestu søvn nýta so ella so. Flestu søvn hava eina blanding av øllum, so sum myndir, lutir, eftirgjørd modell, kort og tekningar við frágreiðingum, sum kunnu spælast av sum eitt nú ljóðupptøkur ella upplestur, og harumframt skíggjar við myndum, filmum, ljóðupptøkum osfr. Tað merkir, at tað ikki altíð eru so nógvir lutir á eini framsýning, og sostatt krevur hon ikki altíð nógv pláss.

<u>Egnar framsýningar</u>:
Tórshavnar býarsavn hevur eina goymslu, umleið 100 m$^2$, í leigaðum hølum, har savnið hevur nakrar lutir frá sjóvinnu og fiskiskapi, sum eru lutfalsliga gamlir. Tá handilin hjá Katrinu Christiansen gavst, keypti kommunan ein part av vørugoymsluni, har ein partur var gamalt tilfar. Nakrir lutir eru á goymsluni, sum einstaklingar hava latið savninum. Afturat hesum kemur savnið hjá Birgari Johannessen, sum serliga fevnir um tíðina frá 1950'unum og frameftir. Býarsavnið eigur eisini myndir og nøkur skjøl.
Við hesum ber til at seta framsýningar upp. Talan kann bæði verða um fastar sýningar og skiftandi sýningar eftir evni/tema og í sambandi við hendingar og aðrar umstøður. Sonevndu pop-up sýningar eru eisini ein møguleiki.

<u>Nøkur hugskot til evnisframsýningar</u>: Havnarkvinnur, Konubrot, Kvinnumóti ella hattamóti, Kvinnumóti í 1960-árunum, Handilslívið í Havn, Endurskapan av Kondittarínum, Tónleikur, Rokksavn, Sjónleikamentan, Havnar Sjónleikarfelagið fyllir 100 ár í 2018, Vinnuvirksemi, Vinnuvirksemi á Vestaru bryggju í 1960 árunum, Tórsgøta sum vinnugøta í fyrru helvt av 20. øld. Grafiskt prent., t.d. sodavatnsetikettir, Skúlaskapur/skúlasøgan, Trúarlív, Rúsdrekkamentan, Havnin undir krígnum, At vera barn og ung í Havn, Bygdirnar í kommununi.

Eitt framtíðar sjóvinnusavn kann skipast sum ein føst framsýning saman við ávísum tíðaravmarkaðum framsýningum.
Við vaksandi ferðavinnu er ein ítøkiligur møguleiki fyri nógvum vitjandi, og hetta kann verða grundarlag fyri at taka framsýningar fram eftir tørvi ella at skipa tær við ymiskum evnum, ið knýta seg at okkara fiskivinnu- og sjóvinnusøgu.

Onnur søvn í kommununi:
Í Nólsoy er savnið Húsini við Brunn hjá Nólsoyar Fornminnisfelag, og arbeitt verður við einum savni um Ova Joensen, sála. Í Kollafirði er Kollafjarðar Bygdarsavn, sum Kollafjarðar Fornminnisfelag rekur. Ein hugsan er, at hesi í framtíðini verða samskipað undir Tórshavnar Býarsavni saman við møguligum øðrum søvnum í kommununi.

Aðrar verkætlanir:
Kommunan fær av og á hugskot frá fólki um verkætlanir á savns- og mentanarøkinum. Nevnast kann royndarverkætlanin "Hans Andriasar hús", sum fer fram í húsunum undir Pisuvarða 2, har skaldið Hans Andrias Djurhuus og konan Petra búðu. Tvey fólk úr Havnar Sjónleikarfelag taka av og á ímóti skúlaflokkum, vísa teimum húsini og greiða frá.

Eitt uppskot er um verkætlan í kirkjugarðinum undir Svínaryggi, Hon snýr seg um at seta QR-kotur við gamlar gravir, so fólk fáa upplýsingar um tey, sum liggja har. Støða er ikki tikin til, um kommunan fer undir verkætlanina.

Onnur sýna fram:
Hugsanin er, at Tjóðsavn Føroya fær høvi at seta framsýningar upp í hølum hjá Býarsavninum, t.d. 2-3 um árið. Í løtuni verður arbeitt við einum máli í Økisnevndini um Kirkjubø, sum Tjóðsavnið er partur av. Tjóðsavnið letur tekst og layout, meðan Tórshavnar kommuna stuðlar við prenti og grafiskum arbeiði. Ein tílíkur samstarvsháttur kundi eisini verið hugsandi fyri onnur søvn í Føroyum.

Yvirskipað verður arbeitt fram ímóti, at Býarsavnið skal fáa ein meir samskipandi leiklut í sambandi við at miðla okkara mentanararv. Ætlanin er at samstarva við Byggi- og Býarskipanardeildina í verkætlanum um miðling av mentanararvi í býnum, eitt nú í sambandi við ítøkiligu verkætlanina at endurskapa fiskastykkið yviri við Strond.

Tiltøk: Ætlanin er at skipa fyri kvøldsetu í oktober, har vit ynskja at koma í samband við borgaran og eggja fólki til at lata savninum viðkomandi lutir til savnið.

Innsavning og móttøka av lutum:
Býarsavnið fer at hava støðuga innsavning av lutum frá eldri og nýggjari tíðum og samtíðini. Móttøkan skal stýrast og skipast væl í sambandi við skráseting og goymsluviðurskifti, og dentur verður lagdur á, at savnið ikki eigur ov nógvar lutir av sama slag ella slíkar, sum fleiri onnur søvn í landinum hava.

Starvsfólk: Ætlanin er, at tvey starvsfólk verða knýtt at savninum, t.e. ein samanseting av fólki í føstum starvi og freelansarum, ið kunnu røkja uppgávuna innan fyri ásetta fíggjarkarm.

Tíðarætlan: Miðað verður ímóti, at fyrsta framsýningin letur upp tíðliga í 2018.

Kostnaður: Støða skal takast til, um atgongugjald skal rindast fyri at vitja framsýningar hjá Býarsavninum. Mest sannlíkt er, at einki gjald verður tikið, tí talan er um mentanarmiðling, upplýsing og kunning. Tað er eitt sindur ymiskt við atgongugjaldi í øðrum norðurlendskum

býarsøvnum, umleið helvt um helvt, hvør tekur gjald ella ikki. Hildið verður, at inntøkan frá atgongumerkjum er lítil í mun til starvsfólkaútreiðslur, umsiting o.t.

Heimasíða: Tórshavnar býarsavn eigur at hava sína egnu heimasíðu. Síðan skal kunna um søvn, framsýningarhøli og hølir knýtt at Býarsavninum, og serliga við atliti til skiftandi framsýningar og høli hjá Býarsavninum. Hugsað eigur at verða um, at savnið kann vera líka nógv virtuelt sum fysiskt. Á síðuni verður kunnað um mentanararv í kommununi, t.d. um ymisk hús, so sum Hans Andriasar hús, Degns hús, Sloans hús, Móttøkuhúsið osfr. Ynskiligt er at talgilda Havnar søgu og gera hana tøka á netinum.

Á fundinum koma umboð fyri umsitingina at sýna dømi um framsýningar og søvn í Norðurlondum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at umsitingin fer undir stigvísa íverksetan av Tórshavnar Býarsavni.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við íverksetan av Tórshavnar Býarsavni mælir mentamáladeildin til, at fylgjandi evni verða viðgjørd:

Hølisviðurskifti: Frammanfyri eru nevnd ymisk høli, sum kunnu nýtast til framsýningar. Nýtt er, at gamli realskúlin, har Heilsuhúsið í løtuni heldur til, verður tøkur um ársskiftið. Mett verður, at bygningurin, sum í sjálvum sær er varðveitingarverdur og hevur góða staðseting í miðbýnum, kundi verið brúktur til savnsvirksemi heilt ella lutvíst. Á fundinum verður framlagt dømi um møguliga disponering av hølunum.

Fígging/starvsfólk: Fíggjarætlanin 2018 verður væntandi á 1,4 mill. kr., tá roknað við, at landið kemur við umleið 0,6 mió.kr. (hetta er tó óvist enn!). Ætlanin er, at í mesta lagi helvtin av játtanini verður nýtt til starvsfólk. Hugsanin er, at tað skulu vera tvey hálvtíðarstørv at býta millum ein søgufrøðing og eitt samskiftis- og/ella miðlafólk. Harumframt skal eitt fjórðingsstarv tilskilast umsjón og vegleiðing. Ein partur av arbeiðnum við framsýningum verður keyptur uttanífrá.

Endalig fíggjarætlan fyri Býarsavnið verður send Tjóðsavninum í seinasta lagi 1. desember. Hetta er í sambandi við stuðul frá landinum sambært lóg um bygdasøvn.

Framsýningar: Ætlanin er at skipa savnið við einari fastari framsýning, skiftandi framsýningum við ymiskum evnum umframt uppihaldsrúmi við kafe og sølubúð, sum tilskilað omanfyri.

Atgongd: Skotið verður upp ikki at taka atgongugjald fyri at vitja framsýningarnar, hetta er vanligt í fleiri norðurlondum.

Mánakvøldið 13. november 2017 skipar kommunan ætlandi fyri almennum temakvøldi í Auluni í Finsen um Tórshavnar Býarsavn, har øll hava møguleika at koma við hugskotum og uppskotum til virksemið hjá savninum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera omanfyri standandi.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlanum og beina málið um realskúlan sum savn í fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**.
13. november 2017 skipaði kommunan fyri evniskvøldið í Auluni í Finsen um Tórshavnar býarsavn. Umleið 120 fólk møttu og var bæði talan um framløgu og orðaskifti har borgarir fingu høvi at seta fram uppskot og viðmerkja. Í hjálagda skjalið sæst samandráttur av innkomnu uppskotunum. Í heyst var gjørd ein spurnakanning av spyr.fo um savnsvirksemi. Úrlitið verður framlagt umframt listi yvir serligu uppskotini frá teimum sum luttóku í kanningini.

Á fundinum verður somuleiðis greitt frá status í tilgongdini, herundir viðv. hølisviðurskiftum, yvirtøka av savninum hjá Birgari Johannessen, lýsing eftir starvsfólki, samskifti við mentamálaráðið/Tjóðsavnið um stuðul, heimasíðu v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at viðgera uppskotini frá borgarunum um framtíðar virksemi hjá býarsavninum við atliti til at umsiting heldur fram við fyrireikingunum av býarsavninum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Starvslýsing eftir leiðara
Sum liður í fyrireikingunum er nú gjørt uppskot til starvslýsing fyri komandi leiðara og savnsvørð á savninum. Sí uppskot til starvslýsing.

Umsitingin hevur til uppgávu at lýsa og fremja slík mál, men er ynski í hesum føri, at nevndin kann gera sær hugsanir um vavi og innihaldið í starvinum. Starvið verður ikki sett fyrrenn nærri er greitt viðv. fíggjarætlanini fyri 2018.

Fíggjarætlan 2018
Enn er ikki avklároing komin við Mentamálaráðið/Tjóðsavnið um teirra fígging sbrt. galdandi lóggávu. Fundur er á politiskum stigi seinni í feb. og kemur tá væntandi ein avkláring.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at staðsfesta lýsingina og at beina málið í fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini við teirri broyting, at talan er um starv, ið er normerað til ¾ tíð.

**Ískoyti**
Sambært avtalu við Birgar Johannessen um yvirtøku av savninum (sí mál 15/04166), er avhendingarskjal klárt at undirskriva, sí hjálagda skjal. Yvirtøkan fevnir um á leið 1000 lutir, ið allir eru skrásettir.

Sbrt. ætlan kemur Birgar Johannessen at reka savnið fram til og við mai 2018 tá savnið endaliga er latið Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu avtalu við Birgar Johannessen.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
5. mars 2018 fekk kommunan hjálagda svar frá Tjóðsavninum viðv. stuðli sbrt. Bygdasavnslógini (17/04004-2). Í skrivinum brúkar Tjóðsavnið hugtak nevnt 'Góðkend fíggjarætlan' og fyriheldur seg ikki til at kommunan við støði í lógini hevði ætlað at havt eina samlaða fíggjarætlan á uml. 2.000 tkr. Harav TK rindar 40% og landið 60% sum ásett í lógini. Játtanin frá Tjóðsavninum er uml. 18% av tí sum lógir ásetur. Hetta er ein ónøktandi støða. Kommunan hevur í mars verið á fundi við Mentamálaráðið og gjørt vart við málið um stuðul til Tórshavnar býarsavn. Tá var ikki greitt hvat játtanin fór at vera.

Kommunan hevur biðið um eitt yvirlit yvir játtanina, ið einstøku søvnini fáa í mun til teirra bruttofíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda mótmæli til Mentamálaráðið um játtanina. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 82/18 Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 308/17 | 17/03883-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 3/18 | 17/03883-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 58/18 | 17/03883-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.02.2018 | 70/18 | 17/03883-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 90/18 | 17/03883-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 129/18 | 17/03883-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 150/18 | 17/03883-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 130/18 | 17/03883-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 82/18 | 17/03883-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 09.05.2018 | 165/18 | 17/03883-2 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá skúlastjóranum í Skúlanum á Fløtum um, hvussu høli í skúlanum kunnu skipast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í oktober var dialogfundur millum leiðsluna í Skúlanum á Fløtum og umboð fyri mentamáladeildina. Eitt evni á fundinum var hølisviðurskiftini. Skúlin á Fløtum húsast í hesum seks eindum: í Kongagøtu (garðinum hjá Frk. Cohr), í Fríðrik Petersens gøtu, við Landavegin, á Frælsinum/Handan Á, á Argjavegi og í Gundadali.

Frá februar 2018 fer ein stova at vanta í í Gundadali, tí skúlin skal úr gamla húsinum hjá Fótbóltssambandinum. Í gamla húsinum er ein 8. flokkur, tað er ikki pláss fyri honum í hølunum, sum verða leigað í bygninginum hjá Fótbóltssambandinum.

Næmingatalið í komandi 9. 8. og 6. árgangi. er ov høgt. Hesir árgangir hava verið fýra spor, tá skúlarnir vórðu lagdir saman og so koma tvey spor aftrat úr Sankta Frans skúla, sostatt er neyðugt við hølum til ávikavist fýra og seks flokkar í hesum árgangum.

Tað er tørvur á einum høli á uml. 20 $m^2$ í veghædd til Litir í Leiki, tí tað riggar ikki so væl, at frítíðarskúli og Litir í Leiki hava tað eina fyribilshølið í Kongagøtu í felag, tí har eru stór og dýr ljóðføri inni.

Sum er, er skúlin á  nógvum matriklum, so tað er ikki ein loysn at finna høli aðrastaðni enn, har skúlin er framman undan. Skúlin hevur víst á møguleikan at fáa Realskúlan aftur, nú Heilsuhúsið flytur haðani.

Skúlastjórin hevur sent uppskot um eina loysn. Sambært hesum uppskoti, fær Skúlin á Fløtum  Realskúlan, og hann verður so brúktur til 3. flokk, og soleiðis verður øll grunddeildin savnað í Kongagøtu. Í hesum bygningi er eisini pláss fyri virkseminum hjá Litum í Leiki, sum nú er í tí eina fyribilshølinum í garðinum hjá frk. Cohr. Um forskúli verður stovnaður skúlaárið 2019/2020 hevði kanska borið til, at hann var í Realskúlanum saman við fyrsta flokki. Men ivasamt er, um tað er nóg gott pláss til tríggjar flokkar aftrat í bygninginum.

Um bert ein árgangur verður í Realskúlanum, so er pláss til annað virksemi eisini t.d. býarsavn.

Um skúlin fær ein part av Realskúlanum, soleiðis at pláss er fyri einum árgangi og Litum í Leiki har, so ber til at flyta úr Gundadali og siga leigumálið upp. Sambært leigusáttmálanum kann leigumálið tó í fyrsta lagi sigast upp til 01.04.2019.

Skúlin metir ikki, at tað er so umráðandi, at fótbóltsflokkarnir hava høli í Gundadali, tí tað er gott busssamband og lætt at koma aftur og fram í sambandi við undirvísing og venjing á vøllunum í Gundadali.

Útreiðslurnar til leigu fyri hølini í Gundadali eru 24.540 kr. um mánaðin. Um tað ber til at siga leigumálið upp til juli 2018, so kann skúlin byrja at flyta, tá skrivligu próvtøkurnar eru síðst í mai og flyta útgerð og innbúgv úr hølunum. Skíggjar og talvur verða so settar upp í Kongagøtu, og neyðugt er ikki við nýíløgu til útgerð og innbúgv.

Skúlin og frítíðarskúlin hava skrivstovu í Móttøkuhúsinim, og heilsufrøðingurin hevur eisini høli har. Um skúlin fær høli í Realskúlanum, ber væntandi til at flyta úr Móttøkuhúsinum. Skrivstovurnar kunnu kanska vera á loftinum og heilsufrøðingurin í somu hølum, sum hann var í, tá skúlin var í Realskúlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

Foreldraumboðini í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum taka undir við uppskotinum hjá skúlaleiðsluni, at Skúlin á Fløtum fær Realskúlan at ráða yvir, og umboðini heita í teldubrævið dagfest 11. desember 2017 á Tórshavnar kommunu at bera so bandi, at tað ber til at savna grunddeildina í miðbýnum.

Í teldubrævinum frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum stendur m.a. "Tað sum vit meta vera serliga átrokandi í hesum uppskoti er, at skúlin fær hølini í Realskúlanum saman við bygningunum í Kongagøtu at ráða yvir.
Vit meta, at tað er neyðugt at savna alla innskúlingina og tilboðini, ið eru tengd at henni, á einum stað.
Her hugsa vit um frítíðarskúlan, ein møguligan komandi forskúla, Litir í Leiki og at 1.-3.fl. ið náturliga hoyra saman, eru staðsettir saman."

Umsitingin metir ikki, at Realskúlin er egnaður til ein árgang á tríggjar flokkar umframt forskúla og mælir tí frá at skipa forskúla har.

3. flokkur skúlaárið 2018/2019 var í eindini á Frælsinum í fyrsta flokki, er fluttur í eindina Kongagøtu hetta skúlaárið og skal so flyta aftur næsta skúlaár, um skúlin ikki fær høli í Realskúlanum. Um so verður, verður skúlin á somu matriklum um nú, og 3. flokkur fer so væntandi í eindina í Fríðrik Petersensgøtu.

Uttan mun til hvat annað virksemi verður í Realskúlanum er umráðandi, at Litir í Leiki fær eitt høli í bygninginum, og hølið má vera í veghædd.

Tá 8. F skal úr gamla FSF húsinum í vár, flytur hann í eindina á Frælsinum. Tað er ikki besta loysnin, tí har verður hann saman við miðdeildini, tað sum er eftir av hesum skúlaárinum.

Um Skúlin á Fløtum fær Realskúlan, eru tveir møguleikar. Annar er at siga leigumálið við Fótbóltssambandið upp, og hin er, at skúlin fer úr eindin í Fríðrik Petersensgøtu, sum so kann brúkast til okkurt annað virksemi. Verður leigumálið sagt upp, so verða skúlaárið 2018/2019 fýra flokkar í eindini í Fríðrik Petersensgøtu. Tað verða ítróttaflokkarnir, sum verða tveir 8. flokkar og tveir 9. flokkar. Hinir flokkarnir í hesum árgangum verða antin í eindini á Frælsinum ella í eindini á Argjavegi. Skúlin hevur ikki tikið endaliga støðu til tað enn.

Til tess at fremja hesa ætlan, er neyðugt við ávísum tillagingum í bygninginum. Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03897 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða ætlanina við skúla í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**

Síðan seinasta fund er komin teldupostur frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum við áheitan at lata Skúlan á Fløtum hava økið við Kongagøtu og Realskúlan í tvey ár afturat. Teldupostur dagfestur 24. januar 2018 við áheitanini er hjálagdur.

Umsitingin vísir til mál um bráðfeingis plásstørv á dagstovnøkinum j.nr. 17/03897, har avgjørt er, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leik hjá Skúlanum á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata nevndini skrivið til kunningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Útsett.

**Mentamálanevndin 08. februar 2018:** Samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan fyri at hýsa 3. flokki í Skúlanum á Fløtum í umhvørvinum við Kongagøtu og Finsen.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað møguleikan at finna onnur høli í nánd av Skúlanum í Kongagøtu, soleiðis at øll grunddeildin í Skúlanum á Fløtum kann verða á einum stað.

Hølini í kjallaranum í Finsen út móti Tórsgøtu, sum eru ætlað til café, eru ikki tikin í nýtslu enn. (Tekning er hjáløgd). Har eru nøkur arbeiði, sum ikki eru liðug, t.d. ljós, el-stikk, radiatorar, partur av gólvinum og okkurt er eftir at mála. Samskifti er við Bústaðir um, at hesi arbeiðið verða gjørd. Haraftrat verður neyðugt at gera skilaveggir í café-økinum – ein við dupulthurð, ið býtir høli í tvey og ein út móti gongini. Hølini til undirvísing mugu lúka vanlig krøv til ljóðviðurskifti.

Um møguligt verður at leiga hesi høli til Skúlan á Fløtum, er neyðugt, at skúlin eisini fær høli 1.01 í Realskúlanum til undirvísing.

Ætlanin er, at tveir flokkar verða í Finsen og ein í Realskúlanum, og at Litir í Leiki kunnu so haraftrat brúka 1.01, tá flokkurin ikki brúkar tað hølið, og haraftrat gomlu sangstovuna í Finsen.

Í kjallaranum í Finsen verða tvey flokshøli (café-økið verður býtt sundur til tvey flokshøli), og gongin verður brúkt til felagsøki. Høvuðsinngongdin verður í tunlinum undir Auluni í Finsen, og hølið, sum er avmerkt til starvsfólk verður brúkt til bólka- og samrøðurúm. Hølið sum er avmerkt til inngongd til sunnaru stovuna.

Hølini mugu vera klár til undirvísing 15. august í 2018. Innbúgv og kt-útbúnaður skal bíleggjast. Veitingartíðin er uml. tríggjar mánaðir og uppsetingin eini tvær vikur, sostatt er neyðugt, at hølini eru klár 1. august.

Skúlin útvegar innbúgv og talvur til hølini í Realskúlanum og talvur til hølini í Finsen. Tórshavnar kommuna útvegar innbúgv, amboð og gardinur til flokshølini í Finsen, innbúgv til karnapparnar, mottir og gaderobu við inngongdina. Kostnaðarmetingin fyri hetta er 300.000 kr.

Leigan fyri kjallaran í Finsen verður ætlandi greið innan medio mars. Ætlandi skal møguliga leigumálið byrja 1. juli 2018.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 næmingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at næmingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Næmingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

_c. Triði flokkur í Finsen_
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

_Annað_
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

## 83/18 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 306/17 | 17/03897-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 2/18 | 17/03897-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 36/18 | 17/03897-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 29/18 | 17/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 18/18 | 17/03897-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 149/18 | 17/03897-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 129/18 | 17/03897-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 83/18 | 17/03897-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talið av nýføðingum í 2016 í Tórshavnar kommunu var 21% hægri enn í 2015 (52 børn). Undanfarnu 5-6 árini hevur kommunan tillagað plásskapasitetin til eitt alsamt lækkandi barnatal við tað, at dagrøktarskipanin og virksemið í dagstovninum Vípan eru niðurløgd hesi árini.

Nú er øvugta støða, og tí hevur umsitingin í 2016 og 2017 arbeitt við ymsum loysnum til tess at tryggja øllum pláss. Í vár eru fingin áleið 30 vøggustovupláss, í leigaðum hølum, og við at fremja eina útbygging í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Vegna framhaldandi tørv, hevur umsitingin arbeitt við øðrum loysnum. Til skúlabyrjan 2017/18 er frítíðarskúlin í Hornabø fluttur til felagseind í Kongagøtu, (sí mál 17/00817 Felagseind við skúla og frítíðarskúla í Kongagøtu) fyri á tann hátt at fáa nýggja vøggustovu í Hornabø. Sostatt eru bæði í Kongagøtu og í Hornabø gjørdar tillagingar, soleiðis at tað passar til givna virksemið.

Umframt hesi átøk, hava dagstovnar í kommununi tillagað stovnsins virksemi til tess, at teir hava kunnað tikið fleiri vøggustovubørn inn so hvørt í 2017. Tískil eru so gott sum eingi tøk pláss á dagstovnunum í kommununi.

Snarskivan, ið umsitur plássávísingina, hevur nú boðað barna- og ungdómsdeildini frá, at tørvur er á dagstovnaplássum, bæði vøggustovu- og barnagarðsplássum frá ársskifti 2017/18 at rokna, hetta serliga vegna tilflyting til kommununa. Í løtuni standa 26 børn á bíðilista til vøggustovu, umframt 10 systkinapør, sum ynskja pláss á sama stovni. Harumframt koma fleiri á lista til eftirfylgjandi mánaðirnar.

Stovnarnir eru sum omanfyri nevnt longu fullir. Til tess at tryggja øllum á bíðilista pláss, verður neyðugt at útvega høli - skjótast. Veitir kommunan ikki pláss, kann Almannaverkið sbrt. forsorgarlógini veita foreldrum
fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, men álagt er kommununi at endurrinda landskassanum hesar útreiðslur. Fyri stakan forsyrgjara vil talan verða um kr. 15.674 um mðr.

Ynskiligt er, at loysnin, sum nú skal finnast, er ein varandi ella langtíðarloysn skilt á tann hátt, at tað er ikki haldbart at leiga og innrætta høli fyri stutta tíð í senn, so sum tað var gjørt í

Kirkjustovu frá januar til juni 2017. Hetta er kostnaðarmikið, og haraftrat er torført at fáa starvsfólk til dagstovnaøkið yvirhøvur og uppaftur torførari til eitt so stutt tíðarskeið.

Stutttíðarloysnir hava eisini tann vansa, at vøggustovubørn skulu flyta umhvørvið og kvetta relatiónir við vaksin, sum  tey hava kent í 6 mðr. til aftur at skapa nýggjar relatiónir, tá tey vera flutt.

Umsitingin er farin í gongd við at finna høli.

Eitt uppskot kundi verið vøggustova og barnagarður í gamla realskúlanum. Í umhvørvinum í Kongagøtu eru góðir møguleikar til útivirksemi, bæði spælipláss í garðinum við Móttøkuhúsinum og spæliplássi í Grasagarði, umframt at tað virksemið, sum er ætlað fyri fimleikahøllina í Finsen, gagnligt fyri dagstovnatilboðið.

Virksemið í felagseindini í Kongagøtu kann eisini verða til gagns fyri vøggustovu- og barnagarðsvirksemi. Tað eru gjørdar tillagingar til frítíðarskúla virksemi í húsinum hjá Frk. Chor, sum eisini kann verða til gagns fyri dagstovnatilboðið fyrrapartin av degnum.

Fyrimunur er, at kommunan eigur bygningin og tískil er eingin leiga, men hølini skulu klárgerast, og óvist er, hvat tað kostar.

Aðrar loysnir kundi verið sethús, men tann marknaðurin er ikki lættur at koma framat í løtuni uttan stóran kostnað.

Undir øllum umstøðum verður neyðugt at útvega fígging, so at kommunan kann veita neyðugu plássini og ansingina, alternativt veita endurgjald fyri vantandi barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini boða nevndini frá plásstørvi og harvið fíggjartørvi til høli og rakstur, evt. endurgjald fyri vantandi barnaansing sbrt forsorgarlógini, og at umsitingin arbeiðir við loysnum at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Dags dato er tørvur á 46 vøggustovuplássum og 17 barnagarðsplássum pr. 1. februar 2018.

Sum lýst omanfyri til fundin 29. november 2017 er arbeitt við at fáa til vega bráðfeingispláss og meira varandi loysnir.

Bráðfeingis ber til at skipa eina fyribils vøggustovu í gamla skúlanum á Hvítanesi. Har kunnu fáast til vega 10-12 pláss. Hetta er roynt áður, og ætlanin er, at leiðslan í Birkilund tekur sær av tilboðnum, ið er skjót at seta í verk. Staðbundna nevndin á Hvítanesi hevur givið samtykki til ætlanina treytað av, at ljósviðurskifti kring skúlan verða fingin í rættlag, at tað er væl frámerkt, hvar bilar til og frá skúlanum skulu parkera í bygdini, og at skelti verða sett upp í bygdini um, at ansa eftir børnum, ið spæla.

Harumframt verður stovnurin í Hornabø, sum byrjaði í august 2017, fyltur skjótari enn ætlað, so har verða 10-12 børn tikin inn.

<u>Realskúlin</u>
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um at skipa part av gamla realskúlanum til dagstovn sum ein varandi miðbýarstovn, har hugsanin er, at hesin flytur og verður skipaður í skúlanum í Kongagøtu, tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Seinastu árini hava ov fá pláss verið í miðbýnum. Staðsetingin er tískil góð í mun til afturvendandi tørvin á fleiri plássum í miðbýnum.

Við ávísum tillagingum kann realskúlin gerast dagstovnur við ml. 30-54 plássum alt eftir, hvussu stóran part av bygninginum, ið brúktur verður til endamálið, og hvussu samansetingin ml. vøggustovu- og barnagarðsbørn er.

Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03883 Skúlin á Fløtum hølisviðurskifti (Realskúlin).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða ætlanina við dagstovni í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt og nevndin tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini at skipa Realskúlan til dagstovn.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina frá undanfarna nevndarfundi. Víst verður somuleiðis til uppskot um fígging at gera realskúlan kláran til dagstovn, mál 17/03656.

Í løtuni verða neyvari kostnaðarmetingar gjørdar við støði í tilboðsprísum. Ætlandi flytur Heilsuhúsið út komandi vikurnar soleiðis, at partur av realskúlanum kann takast í nýtslu sum dagstovnur umleið hálvan februar. Restin av realskúlanum verður tikin í nýtslu, tá allur bygningurin er tøkur og so hvørt tillagingarnar eru gjørdar. Harumframt verða høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum.

Til tess at kunna seta tillagingararbeiðini í gongd, og til tess at kommunan kann bjóða foreldrum nýggju plássini út, er neyðugt at staðfesta endaliga, at dagstovnur skal skipast í realskúlanum.

Nærri yvirlit yvir, hvussu aktuelli plásstørvurin verður loystur, verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er framvegis støðugt trýst á kommununa um at veita fleiri dagstovnapláss. Hóast fleiri tillagingar eru gjørdar og aðrar ávegis soleiðis, at fleiri pláss eru komin á dagstovnaøkinum, so er avbjóðingin ikki bast, um hugt verður fram til várið 2019.

Við nýútvegaðu plássunum í gamla realskúlanum kann væntast, at tey, ið d.d. eru á bíðilista, fáa bjóðað pláss til ynsktu tíð í august 2018, hetta tó treytað av, at allur bygningurin verður nýttur til dagstovnavirksemi.

Hetta loysir bráðfeingisavbjóðingina til august, men eingi pláss eru frá september. Vanliga mynstrið er, at ml. 60 og 90 børn leggjast aftrat tíðarskeiðið september-mai.

Vísandi til ætlanina, at Skúlin á Fløtum flytur úr brúna skúla í Fríðriks Petersensgøtu (sí mál 17/03883), er møguleiki at brúka bygningin til dagstovn frá sumrinum ella so skjótt til ber at hava bygningin kláran. Mett verður, at hetta er góður “buffari” at fylla upp so hvørt tørvur er á dagstovnaplássum tíðarskeiðið fram móti jólum alt eftir, hvussu nógv børn rúmast har.

Alneyðugt er tó eisini at taka avgerð um meira framtíðartryggjaðar loysnir, so henda bráðfeingisstøða, har nýggjar fyribilsloysnir er einasti handlimøguleiki, ikki gerst vanliga støðan.

Í fyrireikingararbeiðinum til talgildu plássupptøkuskipanina, sum fer at geva umsitingini munandi betri møguleika at staðfesta plásstørv mánaðir fram í tíðina, og í arbeiðinum at gagnnýta møguliga tøkan plásskapasitet á dagstovnaøkinum, hava barna- og ungdómsdeildin og húsaumsitingin pláss-skrásett allar stovnar og stovur. Hetta er gjørt eisini í mun til nýggju bygningskunngerðina, sum vísir á minsta mark fyri fermetrum til hvørt barn á dagstovni/stovu, og í mun til námsfrøðiligt viðmæli um bólkastødd av børnum í dagstovnaaldri.

Henda gjøgnumgongd vísir, at onkrir stovnar hava heldur stórt barnatal, meðan aðrir kunnu rúma fleiri børnum, verða ávísar tillagingar gjørdar. Henda støða, har onkrir stovnar skulu hava færri børn enn í dag, eigur at takast við, tá ið samlaði plásstørvurin verður viðgjørdur. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

Niðanfyri verður víst á loysnir:

1. Til tess at basa bráðfeingistørvin, ið er, og sum aftur kemur á heysti 2018:
    - At allur gamli realskúlin verður nýttur til dagstovnavirksemi. Realskúlin hevur í løtuni 21 pláss. Tá allar tillagingarnar eru lidnar, rúmast bygningurin í mesta lagi 68 børnum, hetta veldst um samansetingina av vøggustovu- og barnagarðsbørnum.
    - At brúni skúli verður tillagaður og nýttur til dagstovnavirsemi frá heysti 2018. Í løtuni verður kannað, hvussu nógvum børnum, ið brúni skúli kann rúma, hvat krevst av tillagingum, og hvat tað verður mett at kosta, men roknast kann helst við trimum stovum. Eisini verður kannað, hvørt bygningurin er egnaður sum ein varandi loysn, ella um hetta er at meta sum ein fyribilsloysn.
    - At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribils loysn. Loysnin er á Hvítanesi er væl umtókt og kann halda fram uttan stórvegis tiltøk.

2. Til tess at fáa til vega fleiri pláss við at tillaga innrætting á nøkrum stovnum:
    - At arbeitt verður víðari við uppskotunum um tillagingar í innrætting.
    - At avbjóðingin, ið ávísir stovnar hava við barnatalinum, verður umrødd og atlit tikið til tað yvir tíð, harundir ávís býlingshús og Kurla.

Sum omanfyri lýst eru allir verandi dagstovnar gjøgnumgingnir av barna- og ungdómsdeildini og húsaumsitingini til at meta um, á hvørjum stovni tað ber til at gera tillagingar í innrætting, so stovnurin kann rúma fleiri børnum. Burturúr hesum eru komin ymisk uppskot uppá tillagingar at økja plásskapasitetin. Fyrimunur við hesum er, at einstaka rakstrarstaðið fær betri rakstrargrundarlag, og at bygningarnir verða fullnýttir við nýggjum varandi plássum, heldur enn at økja um talið av bygningum/rakstrarstøðum.

Enn vantar at kostnaðarmeta uppskotini, sum aftur er grundarlag fyri eini raðfesting, har hetta loysir seg best. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

3. Til tess at framtíðartryggja plásskapasitetin við út- og nýbygging, har tað eisini verða fingin til vega nýggj varandi pláss (íløgur):
   - At arbeiða víðari við uppskotum um at byggja út ávísar dagstovnar.
   - At arbeiða víðari við uppskoti um at byggja nýggjan og størri dagstovn á Argjum í staðin fyri verandi dagstovnin á Argjum.
   - At arbeiða víðari við uppskoti at tillaga Skúlan í Kongagøtu til varandi miðbýarstovn, tá bygningurin verður tøkur summarið 2020.

Nýggj varandi pláss er fortreyt fyri, at tað støðugt skal bera til at veita foreldrum plásstrygd. Harumframt er tað fortreyt fyri endurnýggjan av ótíðarhóskandi plássum, har antin bygningurin eigur at verða saneraður sum dagstovnur ella er ikki egnaður á annan hátt.

Uppskot fyriliggur uppá útbygging av dagstovninum á Hamrinum á Argjum. Treytað av, at nýtt lendi verður lagt aftrat verandi grundøki, kann fáast ein vøggustova og eina barnagarðsstova afturat. Kostnaðarmeting uttan lendiskeyp er nakað yvir kr. 10 mió. Til ber eisini at byggja dagstovnin í Maritugøtu út við einum vognrúmi, sum leysgevur annað høli á stovninum til 10 nýggj vøggustovupláss. Hetta uppskot er ikki kostnaðarmett enn. Metast má, at eisini aðrir stovnar við fyrimuni kunnu byggjast út, og eigur hetta at verða kannað ítøkiliga beinanvegin, íroknað kostnaðarmeting og raðfesting.

Mentamálanevndin hevur áður fingið lagt fram uppskot til nýggjan og væl størri dagstovn á Argjum (mál 17/03943) lutvíst til at endurnýggja ótíðarhóskandi stovnspláss/bygning og til at útvega uml. 40 pláss fleiri (samlaður plásskapasitetur sbrt. uppskotinum 112). Kostnaður uml. kr. 35 mió. Til ber ikki einki at gera, tí verandi stovnur krevur stórar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020 og flutt verður úr skúlanum í Kongagøtu, er uppskot, at bygningurin verður gjørdur um til dagstovn at koma í staðin fyri realskúlan, sum ætlandi er fyribilsloysn. Mett verður, at bygningurin rúmar 100-120 børnum alt eftir samansetingini av vøggustovu- og barnagarðsbørnum. Fyrimunur er, at bygningurin rúmar øllum børnunum í realskúlanum umframt t.d. Kurlu ella brúna skúla, verða hesi niðurløgd. Bygningurin í Kongagøtu er nýggjur og í góðum standi, og mett verður ikki neyðugt við stórum tillagingum.

Fyrimunur við hesum uppskoti er, at kommunan sleppur undan íløgu í nýggjan dagstovn, ið ikki verður minni enn tær kr. 35 mió, sum nýggi dagstovnurin á Argjum verður mettur at kosta, og mett verður ikki sannlíkt, at kommunan byggir tveir stovnar við uml. 100 plássum í senn, hóast plásstørv.

<u>Fíggjartørvur:</u>
Til tess støðugt at fáa til vega nýggj pláss, tað verið seg við smærri tillagingum í innrætting, útbyggingum og nýbyggingum, er neyðugt at raðfesta fígging til endamálið bæði í rakstri og íløgum. Umsitingin kemur við neyvari greining av tørvi, so hvørt uppskotini verða kostnaðarmett og raðfest. Roknast kann við nýggjum fíggjartørvi í inniverandi ári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
- At allur realskúlin verður dagstovnur í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21.
- At brúni skúli verður dagstovnur frá august 2018 í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21, og at umsitingin ger neyvari meting um kostnað at gera bygningin kláran til dagstovn at leggja aftur fyri nevndina.

- At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribilsloysn.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at samtykkja:

- At umsitingin leggur fram neyvari raðfesting av tillagingarmøguleikum í innrætting á dagstovnum, har tað verður mett at hava fyrimun at økja plásskapasitetin.
- At heimild verður latin umsitingini at fáa til vega ítøkilig og kostnaðarmett uppskot til útbyggingar av verandi stovnum.
- At prinsipiell støða verður tikin til uppskotið, sum lagt er fram um bygging av nýggjum og størri dagstovni á Argjum, og at fáa fígging til vega í langtíðaríløguætlanini.
- At taka prinsipiella støðu til, at skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til varandi dagstovn eftir summarið 2020, og at umsitingin fær heimild at fyrireika ætlanina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teim fyrstu seks tilmælunum, og at fara undir eina tilgongd at avgera, hvat skúlabygningurin í Kongagøtu skal brúkast til.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

## 84/18 Müllers Pakkhús – nýtt gólv til miðhæddina (2. hædd)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 76/18 | 15/03409-23 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 56/18 | 15/03409-23 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 84/18 | 15/03409-23 |

**Málslýsing:**
Í 2015 varð farið undir at leggja nýtt gólv á miðhæddina í Müllers Pakkhúsi. Játtaðar vóru kr. 2.582.000 til endamálið. Byggingin hevði við sær krav um byggiloyvi, tí nýtslan broyttist frá at fevna um goymslurúm til almenna nýtslu. Í byggiloyvinum vórðu krøv sett til brunatrygdina, sum gjørdu, at verkætlanin gjørdist dýrari, og tískil varð í 2016 játtað í alt kr. 3.900.000 aftrat fyri at fáa umvælingarnar lidnar, soleiðis at endaliga byggiloyvið og nýtsluloyvið kundu útskrivast.

Av tí at talan er um ein gamlan bygning, bygdur í 1890-árunum, lýkur hann ikki nútímans reglur og ásetingar sambært bygningskunngerðini, og eru tí serskildar loysnir gjørdar fyri at loysa byggi- og brunaviðurskiftini. Loysnirnar vóru treytaðar av góðkenningum frá m.a. Dansk Sprinkler Teknik og skjalprógvan frá verkfrøðingi, og hevur verið nógv eykaarbeiði í sambandi við at fáa endaligu góðkenningarnar. Eyka arbeiðið hevur havt við sær eina meirnýtslu á løgukontuni kr. 303.516 pr. árslok 2017.

Leigusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Lions Club varð undirskrivaður fyri meira enn einum ári síðani, har virksemið hjá Lions Club skal halda til í einum av glasrúmunum á ovastu hæddini, umframt at teir við jøvnum millumbili fáa høvi at nýta fullu hæddina til tiltøk.

Bygningurin kann sum er ikki takast í nýtslu, tí enn vantar nakað av arbeiði í sambandi við umvælingarnar. Áðrenn endaliga byggi- og nýtsluloyvið kann útskrivast, er neyðugt:

- at gera styrkingar av konstruktiónini á miðhæddini, har víst verður á tvinnar loysnir. Ein timburloysn við skrábondum kann gerast fyri kr. 130.000, meðan ein loysn við stáldragarum og sjónligum jarnboltum kann gerast fyri áleið kr. 300.000 (kostnaðarmeting). Hæddin á miðhæddini er ein avbjóðing, og tískil vil ein timburloysn taka nakað av hæddini, meðan ein loysn við stáldragarum vil skemma bygningina.
- liðugtgerð av el arbeiði og góðkenning frá SEV.
- innbúgv til (glas)fundarhølini á ovastu hæddini, har talan er um tvey borð, stólar og ljós (fýra lampur). Ynskiligt er, at innbúgvið gerst ein partur av bygninginum, og vórðu gomlu hurðarnar í goymsluklivunum á ovastu hæddini varðveittar við tí endamáli at tær kunnu endurnýtast til tvey borð (snikkaraarbeiði).
- skelting og liðugtgerð (krøv eru til brunaskelti v.m.). Talan er um snøklar, sum t.d. brunamáling av einum einkultum vatnrøri v.m.

Verkætlanin varð byrjað uttan fulla fígging, og eru umvælingarnar gjørdar, so hvørt avbjóðingarnar hava víst seg. Áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu er neyðugt at gera seinastu umvælingarnar. Kostnaðurin av hesum er mettur at verða áleið kr. 300.000, tá er roknað við eini timburloysn í sambandi við styrkingarnar av kontruktiónini á miðhæddini.

Aftrat kemur so meirnýtslan á kr. 303.516, tvs. í alt kr. 600.000 at játta á kontu 5375 Müllers Pakkhús.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 600.000 av konto 6175 til kontu 5375 Müllers Pakkhús at gera seinastu umvælingarnar, soleiðis at endaliga byggi- og nýtsluloyvið kunnu útskrivast og bygningurin takast í nýtslu, og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 600.000 av konto 6175 til konto 5375 Müllers Pakkhús sum eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 85/18 Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 72/18 | 18/01311-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 93/18 | 18/01311-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 09.05.2018 | 169/18 | 18/01311-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 85/18 | 18/01311-1 |

**Upprunin til málið:**
Fyrispurningar og skrivligar áheitanir um hvørjar reglur eru galdandi fyri tey vitjandi í kirkjugørðunum, serliga um viðurskifti við koyring og parkering av akførum inni í kirkjugarðinum.

Fleiri áheitanir frá leiðandi gravarum um skilaleysa koyring inni á kirkjugarðinum. Kærur frá vitjandi, sum ikki longur hava frítt at koyra inni í gørðunum.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Leingi hevur verið tørvur á at gera nakrar reglur fyri, hvussu tey vitjandi á kirkjugørðunum skulu fyrihalda seg.

Uppskot til reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu:

**Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Tórshavnar kommunu**

1. Kirkjugarðurin er vígdur friðarstaður, sum eingin má órógva.

2. Gingið eigur bert at verða á kirkjugarðsgøtunum, og har, sum ikki er grivið.

3. Smábørn eiga ikki at vera í kirkjugarðinum uttan við vaksnum, sum hava ábyrgdina av teimum. Børn mugu ikki spæla á kirkjugarðinum.

4. Fólk, sum vitja inni í kirkjugarðinum, skulu lata portur væl aftur eftir sær.

5. Hundar skulu ikki koma inn í kirkjugarðin og annar fenaður heldur ikki.

6. Á kirkjugarðsgøtum og vegum má eingin koyra, undantikið akfør hjá kommununi ella onnur, sum hava fingið serligt loyvi frá kirkjugarðsumsitingini (leiðandi gravara). Barnavognar og avlamistól undantikin.

7. Ikki er loyvt at arbeiða á kirkjugarðinum ella við gravir meðan jarðarferð er. Harumframt eisini sunnu- og halgidagar, og áðrenn sólarris og aftaná sólsetur yrkadagar. Um summarið ikki aftaná kl. 20.00.

8. At klúgva um girðingar ella hegn er ikki loyvt.

9. Garðar, hegn, stik, gróðursetingar, minnismerki, gravsteinar ella annað skal hava frið.

10. Nummarspjøldur við gravirnar eru ogn hjá kirkjugarðinum, og mugu tey hvørki flytast ella burturbeinast av teimum, ið eiga og røkja gravirnar.

11. Burturkast, gamlir kransar, lok og rusk skal koyrast í ruskíløtini.

12. Starvsfólk á kirkjugørðunum hava skyldu at gera vart við brot á hesar reglur og gravarfriðin sum heild á kirkjugørðunum.

13. Brot á reglurnar kann revsast við bót, umframt møguliga revsiábyrgd.

14. Býráðið kann broyta og Føroya Stiftsstjórn skal samtykkja, áðrenn broytingar verða settar í gildi.

*Tórshavnar kommuna, tann 1. mai 2018*

Samband
Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin
Gravaraskrivstovan í Vika 2

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Skipan av QR kotu um kortskipanina við gravum.

Gravaraskrivstovan og gravarin umsita og útinna, geva boð/loyvi og taka ímóti og svara kærum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrispurningur í máli nr. 18/00340 um viðurskifti við fráseting av bilum og parkering inni í kirkjugarðinum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki

**Umhvørvisárin**
At tað verður minni luftdálking inni á kirkjugørðunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamálanevndin og staðbundnu nevndirnar skulu kunnast

**Skjøl**
Eingi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | x | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 263 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at taka undir við uppskotinum um reglugerð, at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina og staðbundnu nevndirnar til kunningar og viðmerkingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at seinna helvt av pkt. 3 «Børn mugu ikki spæla á kirkjugarðinum» verður tikið úr reglugerðini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Hallu Samuelsen um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

# 86/18 Servituttur um tak á matr. nr. 1mæ. Áheitan um kommunurnar góðkenning fyri - sum átalurætthavari - at fáa loyvi til at skifta takið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 193/17 | 17/03078-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 308/17 | 17/03078-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 58/18 | 17/03078-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 101/18 | 17/03078-3 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 86/18 | 17/03078-3 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá borgara.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sakførarin hjá eigarunum av matr. nr. 1mæ, millum Gilja 17, Hoyvík, ynskir at kommunan sum átalurætthavari góðkennir annað slag av taki, har tað í skeytinum er ásett, at tekjan skal vera av "asbestfríum rukkueternitti". Átalurætturin er lýstur á øll randarhúsini millum Gilja.

Orsøkin til ynski um at sleppa undan hesum taki er, at takið er sera vánaligt, og er longu skift tvær ferðir síðan bygt varð í 1989, og nú má skiftast aftur fyri triðju ferð, tí tekjan fer í upploysn. Sama er galdandi fyri aðrar grannar, sum eisini hava skift tekjuna fleiri ferðir. Eigarin heldur ikki tað kann vera rætt at tað í einum servitutti frá 1980-unum skal vera ásett, at eigarin er bundin til at halda seg til hesar vánaligu takplátur, sum ikki hevur nakað endamál fyri eigararnar av randarhúsunum millum Gilja, men bert fyri veitararnar av hesum vánaligu plátunum.

Um loyvi verður givið at sleppa undan ásetingini í servituttinum verður víst á takplátur av rukkualuminium við sinusprofilum, sum eru lættari at skifta, eru haldgóðar og fáast í ymiskum litum. Í umsóknini verður víst á, at tað ikki eru ásetingar um lit á takinum í servituttinum, sum tí kunnu málast, sum eigararnir halda best. Tað heldur eigarin kundi verið ásett, soleiðis at tað á randarhúsunum verður ein litur, sum eigararnir millum Gilja kundu hildið seg til.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um randarhúsini millum Gilja, har øll húsini hava somu tøk, sum er Eternit B6. Takið, ið víst verður á myndini, sum eigarin kemur við sum alternativ, líkist ikki tøkunum sum eru á randarhúsunum. Tað eru onnur sum hava randarhús millum Gilja sum hava spurt kommununa munnliga um tey kundu skift til annað slag av taki og hava fingið at vita frá kommununi at tað kunnu tey ikki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ynski um at góðkenna annað slag av taki enn tað sum er lýst í servituttinum.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Viðmerkingar frá Býarskipanardeildini**
Virðislønta randarhúsbyggingin í 1990 árunum var ein roynd at byggja tættari bústaðir, har tann einstaki keyparin kundi byggja sjálvur og seta sín dám á innan fyri felags karmar. Henda byggingin vísir eina fína javnvág millum fría valið hjá hvørjum einstakum eigara av innrætting, tilfari og litum og so felags heildina, sum støddir, tekjur og samanbyggingar. Um eigarar fáa loyvi at skifta tekjurnar, broytist heildarmyndin og tann samanhangur sum er frá fyrsta til seinasta hús í røðini.

**Skjøl**
viðheft er skriv við myndum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**
Tað er trupult at siga um tað kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa í sambandi við at onnur ikki hava fingið loyvi til tað sama.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla frá at ganga umsóknini á møti viðvíkjandi slag av tekju, vísandi til at hendan skeytisásetingin ger at randarhúsini halda eina linja og ger at alt virkar sum ein heild.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, mælir til at ganga umsóknini á møti.

Helena D. á Neystabø luttók ikki i viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at kanna, um tað finnast onnur, líknandi tøk við betri góðsku, ið samstundis tryggja, at randarhúsini halda eina linju og at tey virka sum ein heild.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað eftir, um tað eru onnur tøk sum líkjast eternit B6 takplátum.
Plannja sinus 51 aluminiums takplátur hava sama profil og kunnu fáast í sama liti sum ásettu takplátur. Eisini hevur umsitingin spurt seg fyri hjá seljara, um eternit B6 plátur eru dygdargóðar og haldgóðar, men hildið verður ikki at dygdin er nóg góð.

**Tilmæli:**

Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um kommunan skal loyva at omanfyri nevndu aluminiums plátur verða brúktar og um málið skal sendast til eigarafelagið til hoyringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at halda fast við samtyktina hjá byggi- og býarskipanarnevndini 08. november 2017.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

Fíggjarnevndin 18. apríl 2018: Fíggjarnevndin er sinnað at víkja frá servituttinum, við teirri treyt at sami litur og profilur eru í takinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 87/18 Tillagan av parkeringsøkinum hjá Havnar Sjónleikarfelag matr. nr. 763, Tórshavn til almenna nýtslu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 11/18 | 18/00786-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 83/18 | 18/00786-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 87/18 | 18/00786-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við at kommunan hevur samtykt at víðka tíðaravmarkaða parkeringsøkið í miðbýnum Havn, og harvið veita fleiri búgvum parkeringsloyvir mál nr. 17/02781, hevur kommunan brúk fyri fleiri skipaðum parkeringsplássum í miðbýnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í nógv ár hava borgarar og vitjandi brúkt parkeringsøkið matrikul 763, sum Havnar Sjónleikarafelag er eigari av, til almenna nýtslu. Nevndin í Havnar Sjónleikarafelag hevur munnliga avtalu við kommununa, at kommunan kann brúka og skipa parkeringsøkið, um Havnar Sjónleikarafelag fær 2 parkeringspláss til egna nýtslu.

Eftir at skúlastovubingjurnar vóru niðurtiknar í 2015, hevur parkeringsøkið verið ógvuliga óskipað, jarnpláta liggur yvir stórt hol og ein gomul gittarmastur við ongum ljósi, er parkeringskeltis haldari.

Umsitingin heldur, at nú er eitt gott høvi at fáa skipaði viðurskiftir á hesum parkeringsøki við m.a. asfaltering og avmerkjan av básum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Uppskot er gjørt til ein sáttmála um nýtslusamstarv við Havnar Sjónleikarafelag um parkeringsøkið, sí sáttmála undir skjøl.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í dag er parkeringsøkið ikki upplýst, í hesum sambandi hevur gøtuljósdeildin ætlanir um at uppseta tvey gøtuljós.
Ruskspann verður eisini uppsett á økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin viðmerking

**Skjøl**
Kort av parkeringsøkinum við Sjónleikarahúsið 18/00786-2, staðseting av 16 parkeringsbásum, gøtuljósum, vegristum og parkeringsskelti.

Uppskot um avtalu við Havnar Sjónleikarafelag um parkeringsøki 18/00786-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**

Asfaltering og merking verða fíggjað av rakstrinum

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk 169.400 | Dkk |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 169.400 | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk 150.000 | | | | 8112 | Asfalt (rakstur) | | | |
| Dkk 19.400 | | | | 8113 | Ferðsla (rakstur) | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**

Býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til, at gjørd verður avtala við Havnar Sjónleikarafelag um nýtslusamstarv av parkeringsøkinum við Sjónleikarhúsið, og at klárgeran av arbeiðinum verður fíggjað av rakstrarkonto. 8112 og 8113, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

## 88/18 Útstykking í Nólsoy - nevndarsamtyktir - broyting av byggisamtykt (2006-1856)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 125/15 | 14/01828-52 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 153/15 | 14/01828-52 |
| 3 Nólsoyarnevndin | 08.09.2015 | 6/15 | 14/01828-52 |
| 4 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 190/15 | 14/01828-52 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.10.2015 | 217/15 | 14/01828-52 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2016 | 23/16 | 14/01828-52 |
| 7 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 171/17 | 14/01828-52 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2017 | 139/17 | 14/01828-52 |
| 9 Nólsoyarnevndin | 20.06.2017 | 3/17 | 14/01828-52 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 161/17 | 14/01828-52 |
| 11 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 42/17 | 14/01828-52 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 179/17 | 14/01828-52 |
| 13 Nólsoyarnevndin | 18.09.2017 | 6/17 | 14/01828-52 |
| 14 Fíggjarnevndin | 07.09.2017 | 177/17 | 14/01828-52 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 201/17 | 14/01828-52 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.09.2017 | 184/17 | 14/01828-52 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.09.2017 | 218/17 | 14/01828-52 |
| 18 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 215/17 | 14/01828-52 |
| 19 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 215/17 | 14/01828-52 |
| 20 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 63/17 | 14/01828-52 |
| 21 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 269/17 | 14/01828-52 |
| 22 Nólsoyarnevndin | 14.11.2017 | 7/17 | 14/01828-52 |
| 23 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 272/17 | 14/01828-52 |
| 24 Nólsoyarnevndin | 05.04.2018 | 3/18 | 14/01828-52 |
| 25 Tekniska nevnd | 10.04.2018 | 24/18 | 14/01828-52 |
| 26 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 83/18 | 14/01828-52 |
| 27 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 103/18 | 14/01828-52 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 113/18 | 14/01828-52 |
| 29 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 88/18 | 14/01828-52 |
| 30 Nólsoyarnevndin | 29.08.2018 | 5/18 | 14/01828-52 |

**Málslýsing**:
Av tí at fólk í Nólsoy hava spurt seg fyri hjá kommununi um grundstykki og hava fingið at vita, at eingin útstykking verður framd í bræði, vilja staðbundnu limirnir hava greitt at vita, hvørjar ætlanir kommunan hevur hesum viðvíkjandi.

Eisini vilja teir vita, hvussu er við ætlanini um randarhús og um til ber at keypa grundstykki uttan fyri hesa ætlan.

**Nólsoyarnevndin 13. juni 2006:** Nevndin mælir plandeildini til at gera eina útstykkingarætlan fyri økið, sum liggur oman fyri barnagarðin.

Kommunan eigur lendið, matr. nr. 159e.

**Ískoyti:**
Málið liggur í byggi- og býarskipanardeildini.

**Nólsoyarnevndin 12. september 2006:** Kunna varð um, at málið kemur fyri á fyrst komandi fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Í byggisamtyktini fyri Nólsoy, kapittul IV § 18. øki A:Sethús stendur:

*Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 m$^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 m$^2$, tó í minsta lagi 320 m$^2$ fyri serhús (einhúskishús) og 260 m$^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki*.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at útstykking verður samtykt sambært korti nr. 2006-1856/3 og send út til projekteringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað projekteringina av útstykkingini út. Sí hjálagt yvirlit yvir innkomin tilboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin koma við tilmæli til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 15. januar 2007:** Nevndin samtykti at mæla til at taka av lægsta tilboðnum frá HMP konsult.

Harumframt mælti nevndin til at leggja málið fyri fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og leggja út fyri kostnaðin.

**Ískoyti:**
HMP hevur gjørt projekt til útstykkingina og gjørt útbjóðingartilfar. Aftaná projektgransking er projektið klárt at bjóða út. Sambært fyribils kostnaðarmeting verður samlaði kostnaðurin:

Við neyðugar vegaføring: 2.447.374 kr. u/mvg svarandi til 2.600.334 kr. v.mvg. Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 600,00.
Við samlað vegaføring:3.550.766 kr. u/mvg svarandi til 3.772.688 kr.v mvg.
(Sí skjal nr.1 og 2). Fermetraprísur fyri grundstykkini kemur við hesi loysn at verða uml. kr. 850,00.

**Tilmæli:**
Býararkitektin og tekniski stjórin mæla til at velja uppskot nr.1 og at bjóða arbeiðið við útstykkingini út sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, soleiðis at fyriliggjandi útstykkingarætlan rindar um helvtina av vegaføringini í uppskoti 1. Heitt verður á umsitingina um at fáa til vega útstykkingarætlan eystanfyri vegin, og at javna írestandi útleggi á hana. Harumframt mælti nevndin at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Ásannandi at prísurin pr.m² verður rættiliga høgur eftir verandi útstykkingarætlan, hevur umsitingin gjørt broytingaruppskot til ætlanina, soleiðis at grundstykkir verða báðumegin vegin. Eitt vanligt grundstykki á uml. 450 m² og 14 grundstykki á min. 260 m² verður soleiðis lagt afturat verandi uppskot. Hetta krevur tó at byggisamtyktin verður broytt og at kommunan ognar sær uml. 2650 m² av festijørð fra Føroya Jarðagrunni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broyttu útstykkingar ætlan sambært kortskjal nr. 2, og at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjal 1 og at byggi- og býarskipanarnevndin mælir fíggjarnevndini til at søkja Jarðargrunnin um keyp av 1400 m² av matr. nr 108 a, 1250 m² av matr.nr.107a og Vatnfelagið um keyp av matr.164 sum er 12 m².

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at taka upp samráðingar um keyp av økjunum.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2007:** Skrivarin kunnaði um verkætlanina og tíðarætlan.

**Nólsoyarnevndin 27. november 2007:** Michael Jacobæus kunnaði um verkætlania.

Trupulleikar eru við helling av vegnum, sum samstundis merkir eitt grundstykki minni. Hetta kemur eisini, at ávirka tíðarætlanina. Arbeitt verður víðari við verkætlanini.

Frá tí at verkætlanin verður sett í verk, gongur umleið 1 ár til stykkini eru klár.

**Ískoyti:**
Í sambandi við útstykkingina hevur nólsoyarnevndin gjørt vart við at peningarstovnarnir ikki fara at fíggja sethúsabygging í oynni við tann metta m² prís. Umsitingin hevur minkað um útreiðslurnar til útstykkingina við at:

1. at taka verandi gongubreyt burtur projektinum
2. at býta útreiðslurnar til útstykkingina út á komandi útstykking eystanfyri og økini sum sambært byggisamtyktini er lagt út til stovnar og svimjuhøll.
3. at fíggja íbinding til verandi vegkervi yvir eina aðrari konto.

Soleiðis verður útreiðslan pr. m² minkað niður í 352,33 kr. pr m². Haraftrat skal leggjast íbindingargjald, grundprís og mvg, og verður fermetraprísurin tá mettur til tilsamans umleið 560 kr./m².

Víst verður til skjøl nr. 2006-1856/25 og 26.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna uppskotið hjá umsitingini og at góðkenna tekniska prosjektið, og at arbeiði síðani verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Byggi- og býarskipanarnevndin og tekniska nevnd 26. mai 2008:** Nevndirnar samtyktu at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 27. mai 2008:** Kunnað varð um málið.

**Nólsoyarnevndin 4. september 2008:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Nýtt:**
Mælt verður til at býta útreiðslurnar til umlegging av verandi vegur millum útstykkingina og konto 11. (sí hjálagt skjal nr. 2006-1856/32 "Kostnaðarmeting" og skjal nr. 2006-1856/33 Umlegging av verandi vegur/útreiðslur pr.m$^2$.

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Nólsoyarnevndin 2. desember 2008:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur latið gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina, og 5 bjóðandi luttóku í útbjóðingini. 4 boð eru komin inn.

| | |
|---|---|
| Articon | 4.185.149 kr. |
| J&K Petersen | 5.391.947 kr. |
| Samtakið Hansen og Jacobsen | 6.182.898 kr. |
| Sp/f Andrias Berg | 4.663.805 kr. |

Lægsta boð er hjá Articon. Av tí at prísurin fyri grót ikki er innroknaður í tilboðsupphæddina, skal leggjast 33.000 kr. fyri keyp av gróti. Samlaða tilboðsupphæddin verður soleiðis 4.218.149 kr. Hjálagt er útrokning av samlaða fíggjartørvinum, sum er 5.508.806,59 kr. íroknað mvg, projekteringsútreiðslur, v.m. (Skjal nr. 2006-1856-38). Samanborið við kostnaðarmetingina (skjal nr. 2006-1856/32 "Kostnaðarmeting") er tað ein meirútreiðsla upp á 32.452 kr. svarandi til 2 kr. pr. m$^2$ í samlaðu útstykkingini (sí skjal nr. 2006-1856/37).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við lægsta tilboðnum og at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játta 5.508.810 kr.til ger av útstykkingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. desember 2008:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina, kommunustjóran og miðfyrisitingarstjóran, um at staðfesta aktuella tørvin á grundstykkjum í Nólsoy, áðrenn støða verður tikin til tilboðini.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at lýsa í bløðunum at kommunan ætlar at gera útstykking í Nólsoy, og at møguligir keyparar biðjast boða Tórshavnar kommunu frá áhuga at keypa grundstykki.

**Nólsoyarnevndin 17. februar 2009:** Kunnað varð um útstykkingina, serliga tillutanina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at annulera byggibúningina, men at eini umsøkjarin, sum gjørdi vart við seg, fær møguleika at keypa grundstykki, og kemur at luttaka í heildarætlanini.

**Nólsoyarnevndin 2. mars 2010**: Nevndin umrøddi møguleikan fyri bústaðarskyldu í Nólsoy.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndarlimur biður um málið á skrá**.**

Annfinn Brekkstein ynskir umrøðu og møguliga støðutakan til sølu av grundstykkjum í Nólsoy. Uppskotið er at selja grundstykkini í Nólsoy fyri kr. 100.000 og at kommunan játtar fígging av restupphæddini, sum vantar í kostprísi. Grundgevingin er, at mett verður ikki, at tað ber til at sleppa av við stykkini fyri núverandi prís.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Umrøtt.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Nólsoyarnevndin 08. september 2015:** Umsitingin setir seg í samband við Bústaðir.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt yvirlit yvir møguleikan at lækka prísin á útstykkinginum í Nólsoy.
Birita Wardum, býararkitektur, kemur inn at greiða frá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mælir til at arbeiða víðari við málinum og beina málið í býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at arbeiða víðari við alternativi 4 í uppskoti til útstykkingarætlan, j.nr. 14/01828-56.

Tekniski stjórin ella býararkitekturin kemur at kunna um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur latið gera annað øðrvísi útstykkingaruppskot í Nólsoy (Alternativ 4).
Sambært bíðilistanum hjá Tórshavnar kommunu, er eingin skrivaður upp til grundstykki í Nólsoy.
Ein áhugabólkur úr Nólsoy hevur havt samband við kommununa um at skipa fyri íbúðarbygging í Nólsoy í staðin fyri útstykking til sethús, tí trupult er at fáa fígging til at byggja sethús í Nólsoy.
Umsitingin hevur tosað við Bústaðir um møguleikan fyri, at Bústaðir kunnu fara undir at byggja leigubústaðir í Nólsoy. Bústaðir eru áhugaðir, og verður í næstum farið undir at, kannað møguleikarnar fyri samstarvi um eina íbúðarverkætlan.

Tekniski stjórin og býararkitekturin kunna nevndina um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Minnilutin, sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin biðja um at fáa málið á skrá komandi býráðsfund týsdagin 20. Juni 2017.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ynskið um at gera 5 grundstykki eystan fyri barnagarðin úti í Nólsoy byggibúgvin, hevur umsitingin hugt eftir uppskoti 3, sí skjalið *5 grundstykkir.pdf*, sum varð gjørt í sambandi við uppruna útstykkingarætlanina til sethúsabygging. Grundstykkini, sum eru partur av matr. 159e, liggja í sethúsaøki (A) í almennu byggisamtyktini og eru 500 m$^2$ til støddar.

Fyri at verkætlanin kann bjóðast út, verður biðið um heimild til at gera prosjekt liðugt til útbjóðing.

**Skjøl:**
- *5 grundstykkir.pdf, j.nr. 14/01828-56*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararitekturin mæla til at játta kr. 50.000 av konto 6475 til at gera prosjekt liðugt til útbjóðing og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 20. juni 2017:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Táverandi Nólsoyar kommuna lat gera ein útstykkingarveg undir Bøbrekku á matr. nr. 159e, Nólsoy.
Í sambandi við útstykkingina í Nólsoy, hevur umsitingin kannað verandi støðu á staðnum. Staðfest er, at talan er um eina grovplanering av einum umleið 5 m breiðum vegi, undir Bøbrekku, sum gongur frá Válavegi niðan við vesturmarkinum av matr. nr. 159e og eystur yvir ímóti vesturmarkinum av matr. nr. 16 og oman í Eyggjargøtu, Nólsoy.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eitt uppskot til eina útstykkingarætlan á 5 grundøkir á umleið 500 m$^2$ hvørt, har atkomuvegurin verður 5 m breiður við bakkantsteini og 1 m strípaðari gongubreyt.
Ætlanin er at dagføra part av vegnum undir Bøbrekku við tekniskum installatiónum sum fyrireiking til, at tvey grundøkir at verða vestanfyri, og trý eystanfyri undir Bøbrekku, sum gongur niðan við vesturmarkinum av matr. nr. 159e, Nólsoy.

Tekniska fyrisiting hevur gjørt eitt høvuðsprosjekt og útbóðingartilfar klárt til útbjóðingar og eina samlaða kostnaðarmeting B.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 17/02280/1 Tekningar
TK j. nr. 17/02282/1 Útbjóðingartilfar
TK j. nr. 17/02286/1 Byggimálsfrágreiðing
TK j. nr. 17/02287/1 Arbeiðsfrágreiðing
TK j. nr. 17/02858/1 Kostnaðarmeting HVÚ
TK j. nr. 17/02858/2 Samlað kostnaðarmeting B

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, virkandi býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við teknisku verkætlanini, og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð millum tveir lokalar arbeiðstakarar. Málið verður at leggja fyri aftur til endaliga støðutakan, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 07. september 2017:** Tikið av skrá.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 18. september 2017:** Nevndin ynskir at fáa bústaðarskyldu knýtt at teimum 5 stykkunum í nýggju útstykkingini.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin hevur skipað fyri útbjóðing sum innbodna lisitatión millum tveir arbeiðstakarar, H. V. Lützen P/f og Maskingrevstur v/Frank Hellisdal Sp/f.
Lisitatión var hildin á digitala prosjektportalinum iBinder 19. september kl. 14.00.
H. V. Lützen hevði lægra tilboðið.

**Tilboðini vóru hesi:**

| | |
|---|---|
| Hans Vilhelm Lützen P/f | kr. 1.858.815,- íroknað fordeilingslista B(T) |
| | **kr. 1.489.935,- uttan fordeilingslista B(T)** |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal Sp/f | kr. 2.087.200,- íroknað fordeilingslista B(T) |
| | **kr. 1.715.050,- uttan fordeilingslista B(T)** |

**Kostnaðarætlan:**
Tekniska fyrisitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarætlan áljóðandi kr. 1.100.278,- grundað á tilboð frá Maskingrevstur við uppskoti um sparingar.

**Viðkomandi skjøl í málinum:**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02283/1 | Tilboð frá H. V. Lützen |
| TK j. nr. 17/02283/2 | Tilboð frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal |
| TK j. nr. 17/02283/3 | Lisitatiónsprotokoll |
| TK j. nr. 17/02858/6 | Uppskot til sparingar grundað á tilboð frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal |
| TK j. nr. 17/02858/7 | Kostnaðarætlan A grundað á tilboð frá Maskingrevstur við uppskoti um sparingar |
| TK j. nr. 17/02858/10 | Innanhýsis notat_Kostnaðaryvirlit fyri hvørt grundøki sær |
| TK j. nr. 17/02280/1 | Matrikulplanur |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægra tilboðnum frá Maskingrevstur við tillagingum og sparingum áljóðandi kr. 910.477,- uttan fordeilingslista B(T) og fíggja áljóðandi kr. 1.100.278,- til verkætlanina av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, góðkenna matrikulplanin, viðmæla sundurbýtið av útstykkingini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. september 2017:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við báðar teir bjóðandi út frá innkomnu tilboðunum. Í fyrstu og aðru samráðingarrundu var Maskingrevstur lægstur.
Triðja samráðingarrunda innibar, at arbeiðstakarin veitir handverkara- og arbeiðs- og maskintímar, og at Tórshavnar kommuna veitir tilfar sum grót og tekniskar installatiónir og flyting av til fari út til Nólsoyar sum byggiharraveiting. Eisini er verkætlanin gjørd einklari fyri at fáa kostnaðin niður. Eitt dømi er at gera eina felags leiðingsgrøv í staðin fyri tvær leiðingsgravir í báðum vegasíðum.

**Kostnaðarætlan:**
Tilboðið frá H. V. Lützen uppá handverkara-, arbeiðs- og maskintímar er áljóðandi kr. 400.000,-. Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarætlan A við triðju samráðingarrundu við H. V. Lützen sum grundarlag áljóðandi kr. 750.000,- íroknað matrikulering og mvg men tó uttan asfaltering, prosjektering og eftirlit.

**Viðkomandi skjøl í málinum:**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02858/12 | Uppskot til sparingar grundað á tilboðið frá H. V. Lützen uppá arbeiðs-, handverkara- og maskintímar, og at TK veitir tilfar sum byggiharraveiting |
| TK j. nr. 17/03305/4 | PLYNG_Udstykning på matr. nr. 159e, Nólsoy_Opdateret tilbud på materialer |
| TK j. nr. 17/03305/5 | Tilboð frá Lastkran v/Erling Dam uppá at flyta 300 m3 av tilfari frá Hundsarabotni og út til Nólsoyar |
| TK j. nr. 17/02858/13 | Kostnaðarætlan A_HVA_Dagfest 27102017_PAP |

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti:**

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 750.000,- |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 200.000,- |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato 27.10.2017 | Dato 19.03.2018 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Viðmerking:**
Grundstykkjasølan skal fíggja verkætlanina.

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka av lægra tilboðnum uppá arbeiðs- og handverkaraútreiðslur og maskintímar frá H.V. Lützen við tillagingum og sparingum áljóðandi kr. 400.000,-, og loyva byggiharraveitingum áljóðandi kr. 350.000,-, ella samlað áljóðandi kr. 750.000,- til verkætlanina av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, verkætlan L64010, heimila umsitingini at gera arbeiðssáttmála við H. V. Lützen, góðkenna matrikulplanin, viðmæla sundurbýtið av útstykkingini og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fíggjarleiðarin mæla til at verkætlanin verður fíggja av ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjunum í árinum.

**Nólsoyarnevndin 14. november 2017:** Nevndin tekur undir við tilmælinum og ynskir framhaldandi at fáa bústaðarskyldu knýtt at teimum 5 stykkunum í nýggju útstykkingini.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lutakast hevur verið av teimum 5 grundøkjunum 23. mars 2018 í Posthúskjallaranum. 7 ítøkiligir keyparar vóru til grundøkini, 2 fingu tí ikki tillutað grundøki. Tey 5 grundøkini eru merkt við nr. 1, 3, 4, 5, og 6, og tey tvey, sum ætlanin er at leggja aftur at, eru merkt við nr. 7 og 8 á dagførda matrikulplaninum.

Av tí at eftirspurningurin er so stórur, hevur umsitingin gjørt eina heildarætlan fyri alla útstykkingina á matr. nr. 159e, 107d og 108a. Víst verður til dagførdan matrikulplan, sí TK j. nr. 17/02280-2.

Hædd er tikin fyri, at til ber at víðka útstykkingina uttan at fara at grava í vegnum sum nú verður dagførdur aftur.

Matr. nr. 107d og 108a er ogn hjá Føroya Jarðargrunni. Økið omanfyri vegin undir Bøbrekku er nakað bratt, og tískil verður hildið betri at fara longur eystur við grundøkjunum, og nýta vestara økið til fríøki.

Neyðugt er at fara í samráðingar við arbeiðstakarin um at víðka arbeiðstøkuna av 5 grundøkjum til 7 grundøkir.

**Matrikuler viðurskifti**
Tórshavnar kommuna eigur undirlendið undir teimum tveimum grundøkjunum sum ætlanin er at leggja afturat (nr. 7 og 8). Skal øll útstykkingar ætlanin fremjast, má kommunan ogna sær part av matr. nr. 107d og 108a.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 17/02280-3 Matrikulplanur_03042018_PAP

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at góðtaka nýggja matrikulplanin og at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við arbeiðstakaran um at víðka arbeiðstøkuna av teimum 5 grundøkjunum til at fevna um 7 grundøkir, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Nólsoyarnevndin 05. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðstakarin hevur latið kommununi eitt tilboð áljóðandi kr. 180.000,00 uttan mvg í arbeiðsløn fyri at gera 2 grundstykkir afturat, sum víst á nýggja matrikulplaninum j.nr. 17/02280-3.
Samlaði kostnaðurin fyri at gera 2 grundstykkir aftur verður kr. 300.000,- alt íroknað, sambært kostnaðarætlan A, sí j.nr. 17/02858/14.
Søluprísurin fyri grundstykkini kann verða kr. 165.000 pr/stk., sum er tað sama sum fyri tey fyrstu 5 grundstykkini, sum eru útlutaði.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/02280-3 | Matrikulplanur_03042018_PAP |
| TK j. nr. 17/03305-6 | Tilboð frá H. V. Lützen |
| TK j. nr. 17/02858-14 | Kostnaðarætlan A |

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til:
- at góðtaka nýggja matrikulplanin og at víðka arbeiðstøkuna við 2 grundøkjum, soleiðis at tað íalt verða gjørd 7 grundøkir.
- at taka av ískoytistilboðnum frá H.V. Lützen, um at gera 2 grundstykkir afturat, áljóðandi kr. 191.250,- v/6,25% mvg.
- at tilfar o.a. verður byggiharraveiting, fyri íalt kr. 108.750,- v/6,25% mvg.
- at arbeiðið, fyri íalt kr. 300.000,- v/6,25% mvg verður fíggjað av íløgukontoini fyri útstykkingar, deild 6475, verkætlan L64010.
  at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 280 |
| | Formansins merki: |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 89/18 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175d, Hotel Føroyar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 36/18 | 18/00871-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 62/18 | 18/00871-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 65/18 | 18/00871-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 89/18 | 18/00871-1 |

**Upprunin til málið:**
P/F Gist og Vist hevur sent umsókn um at útbyggja Hotel Føroyar sambært kortskjali *Tekningar frá Búsetur (18/00871-2)*.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ætlanin frá umsøkjara er at byrja bygging av vesturlonini á vári 2018 og av eysturlonini á vári 2019. Brunaskipanin verður bundin uppí verandi ABA skipan, sama er við øðrum viðurskiftum so sum reinsiverk, ventilatión, hitaskipan, v.m.
Við útbyggingini eystur- og vestureftir fær hotellið uml. 80 kømur afturat, og nýggj parkeringspláss eru eisini við í ætlanini.

Byggiloyvi verða útskrivaði treytað av, at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt, soleiðis at C2 økið verður víðkað til at fevna um nýggju bygningarnir. Fyri at byggisamtyktin kann broytast er neyðugt at søla av lendinum verður framd, og er umsøkjarin kunnaður um at seta seg í samband við Búnaðarstovuna og at málið hevur skund nú ætlanin er at byrja bygging í vár.
Uppskotið til broyting av byggisamtykt er sýnt á kortskjali *Hotel Føroyar – eftir broyting (18/00871-2)*.
Vestanfyri verður C2 økið víðkað við omanfyri 1000 $m^2$, meðan eystanfyri verður víðkað við omanfyri 4000 $m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 1175d er í umráðispartinum C2 í 3. grundumráði og er 39.647 $m^2$ til víddar og veglutur er 1.242 $m^2$.

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhølum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum, og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t.*
2. *Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrliga avmarkað øki.*
3. *Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.*
4. *Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,5.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar viðmerkingar

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongar viðmerkingar

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**
Ongar viðmerkingar

**Umhvørvisárin**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
*Tekningar frá Búsetur (18/00871-2)*
*Hotel Føroyar – fyri broyting (18/00871-2)*
*Hotel Føroyar – eftir broyting (18/00871-2)*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at ganga umsóknini á møti, soleiðis at almenna byggisamtyktin hjá Tórshavnar kommunu fyri matr. nr. 1175d verður broytt samsvarandi kortskjalinum, ið sýnir broytingina, treytað av, at søla av lendinum verður framd, at øll neyðug viðurskifti eru komin í rættlag í sambandi við útstykkingina og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Nýggir upplýsingar eru í sambandi við omanfyri standandi broyting. Umsøkjarin hevur fingið aðrar ætlanir, grundað á, at ein trafostøð hjá SEV stendur á økinum eystanvert, sum ikki kann flytast. Tískil er ætlanin at minka um víðkanina eystanfyri og leggja 12 kømur afturat vestanfyri. Broytingin er sýnd á viðfestu kortskjølum.

**Skjøl:**
*Tekningar frá Búsetur (18/00871-2)*
*Hotel Føroyar – fyri broyting (18/00871-2)*
*Hotel Føroyar – eftir broyting (18/00871-2)*

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna broytingarnar av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu við Hotel Føroyar sum sýndar á kortskjølunum, treytað av at søla av

lendinum verður framd, at øll neyðug viðurskifti eru komin í rættlag í sambandi við útstykkingina og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 90/18 Niels Finsensgøta / Vaglið einvegis niðan eftir til Sverrisgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 07.02.2018 | 2/18 | 18/00308-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 8/18 | 18/00308-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 10.04.2018 | 22/18 | 18/00308-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 90/18 | 18/00308-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við at skoytivøllurin er staðsettur á Vaglinum, hava ferðsluviðurskiftini á Vaglinum og Niels Finsens gøtu verið frammi.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sum eina roynd, nú skoytivøllurin hevur virka í eina tíð, er niðasti parturin av Niels Finsens gøtu, frá Mylnugøtu og niðan til Sverrisgøtu lýstur sum einvegis niðaneftir.

Ætlanin er nú at henda broyting skal gerast varandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ferðslulógin

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í sambandi við broytingina, skal vegauppmerkingar, uppsetan av skeltum og tillagingar gerast við vegamótið Vaglið/Mylnugøta.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eingi

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**
18/00308-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Umhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | 150.000 | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Nevndin skal taka støðu í málinum.

**Ferðslunevndin 07. februar 2018:** Ferðslunevndin mælir til at lýsa niðasta part av Niels Finsens gøtu, frá Mylnugøtu og niðan til Sverrisgøtu sum einvegis niðaneftir. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Uppskot er gjørt, har hýruvognarnir verða fluttir yvir um, móti Tinghúsvøllinum, og verandi p-básar verða tiknir burtur. Sí uppskot 18/00308-4.
Arbeiðið við kantsteinum og asfalti verður fíggjað av rakstrinum kt. 8110 vegir og 8112 asfalt.

Býarskipanardeildin skal gera eina endaliga loysn í sambandi við fríðkan og at samskipa økið.

**Tilmæli:**
Býararverkfrøðingurin mælir til at taka undir við ferðslunevndini.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum og at senda málið til hoyringar hjá hýruvognsfeløgunum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at ferðslan verður alt ov ógreið.

**Ískoyti:**
Hoyringsskriv varð sent hýruvognsfeløgunum 7. mars 2018. Svarfreistin var úti 25. mars 2018 og einki svar var tá komið. Eftirfylgjandi er tó komið eitt hoyringssvar frá AUTO, har hesi mæla frá, at hýruvognar bert skula koyra niðan gjøgnum gongugøtuna, serliga við atliti at trygdini, tí nógv fólk er savnað har á náttartíð. Umsitingin metir tó, at upptøkan hjá hýruvognum av ferðafólki á náttartíð serliga er í Steinatúni, har hýruvognarnir tá hava støðlapláss. Tó ber til at hava ferðsluna oman og niðan frá Vaglinum, tó at hetta fer at avmarka møguleikarnar at gagnnýta økið til torg.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at halda fast í upprunaliga tilmælið.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass, samtykti at skipa ferðsluna sambært uppskoti Vaglið 2.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um samtyktina hjá meirilutanum í teknisku nevnd, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Turið Horn, Bergun Kass og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddi: Halla Samuelsen.

# 91/18 Gera ymisk átøk undir Kongavarða, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.04.2018 | 21/18 | 18/01334-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 114/18 | 18/01334-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 91/18 | 18/01334-2 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við søluna av grundøkjum undir Kongavarða, er partur av sølupeninginum oyramerktur til at gera ymiskar manglar og ábøtur í økinum. Áheitan er komin frá eigarafelagnum undir Kongavarða, um ymisk ítøkilig átøk.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk ið ynski er um at fáa gjørd eru: Asfaltering og at fáa gongu- og súkklubreyt gjørda frá innkoyringini til býlingin og inn. Eisini skulu gerast 36 parkeringspláss inni frá vegnum. Spælipláss, sum eigarafelagið skal standa fyri at gera, skal gerast eystanfyri íbúðarblokkarnar, alt sambært uppskot 18/01334-1.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Kommunan hevur selt part, uml. 5500 $m^2$, av matr. nr. 255 a fyri 3 mill. Ætlanin er at brúka hesa upphædd til omanfyri nevndu átøk. Peningurin er tøkur á kt. 6175

Raðfesting er gjørd fyri tøka peningin, ið er kr. 3.000.000,-.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | nei | nei | nei | Nei |
| Umhvørvisavleiðingar | nei | nei | nei | nei |
| Sosialar avleiðingar | | | ja | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | ja | nei | nei | nei |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at peningurin verður brúktur av kt. 6175 at gera asfaltarbeiðið liðugt, at gera 36 P-básar og veita stuðul til at gera spælipláss eystan fyri verandi íbúðarblokkar.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 92/18 Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 864a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 68/18 | 18/01173-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 92/18 | 18/01173-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt útstykking á matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g og 864h við Dalavegin, Tórshavn. Av tí at tey flestu grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$ til støddar, skal serstøk byggisamtykt gerast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samlaða víddin á útstykkingini er uml. 6900 $m^2$. Søkt er um at útstykkja 12 grundstykkir – 9 til stakhús og 3 við møguleika fyri at byggja tvíhús. Harumframt er fríøki, gøtusamband, felags p-pláss og øki til reinsiverk.

Grundstykkini verða millum 400-700 $m^2$ til støddar og fríøkið verður uml. 700 $m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/03444 – Útstykking á matr. nr. 864a, við Dalavegin í Tórshavn

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt við Dalavegin og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 93/18 Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 73/18 | 18/00908-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 94/18 | 18/00908-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 110/18 | 18/00908-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | | | 18/00908-5 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 93/18 | 18/00908-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við skrivi 22.03.2017 søkir Christian Andreasen, advokatur, vegna P/f Salmon Protein um, at felagið fær til keyps umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík.

Ætlanin er at nýta stykkið til bygging av einum biogass anleggi, sum skal taka ímóti úrdráttum frá alivinnuni, sambært teimum reglum, sum eru galdandi fyri alivinnuna viðvíkjandi burturbeining av lívrunnum tilfari, og tøðum frá føroyskum bóndum.

Burtur úr tilfarinum, sum verður viðgjørt/avgassað, verður útvunnin hiti, sum skal latast til Fjarhitafelagið, umframt at veita streym til SEV.

Samstundis er ætlanin, at bøndur skulu fáa latna tilfarið aftur sum avgassað tøð. Hetta gevur bóndum møguleika fyri at taða oftari, og uttan at taðingin hevur við sær keðilig umhvørvisárin, sum annars er galdandi fyri taðing við vanligum tøðum.

Við at byggja nevnda biogassanlegg fáa alarar tann fyrimun, at teir sleppa av við lívrunnið burturkast, samstundis sum bøndur sleppa av við sítt avfall.

Bygging av einum slíkum anleggi er fult í tráð við ætlanina hjá landi og kommununum at útvinna mest møguligt av grønari orku, samstundis sum hetta tiltak vil verða til stóran frama fyri umhvørvið sum heild.

Umsøkjarin ynskir at fáa grundøkið til keyps fyri ein keypspening sum svarar til kostprísin.

Um neyðugt er at broyta byggisamtyktina, fyri at byggja nevnda anlegg á økinum, verður samstundis biðið um, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Matr. nr. 139b á Skarðshjalla liggur í umráðispartinum B8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar sambært kap. 4, §15 eru:

- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisflokkur 6: Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi. Kunnu staðsetast í størri ídnaðarøki, har fráleiki til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum

eru størri maskin- og betongvirkir, sláturvirkir og asfaltvirkir. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 300 metrar.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 139b, sum umsøkjarin biður um at fáa til keyps, er innasta økið á Skarðshjalla.
Biðið verður um at fáa 20.000 m² og er tað alt økið sum er eftir innanfyri tað síðstu útstykkingina á Skarðshjalla.

Skal kommunan selja økið til P/f Salmon Protein, so krevur tað loyvi frá Landsstýrinum, tí talan er um eitt øki sum er størri enn 300 m², sum verður selt uttan útboð.

Í staðin fyri at selja, so kann kommunan geva felagnum optión uppá økið í eitt tíðarskeið. Soleiðis tryggjar kommunan sær, at um biogass anleggið ikki verður bygt, so kemur kommunan framhaldandi at ráða yvir økinum, sum kann latast til bygging av nýggjari brennistøð ella annað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Eitt øki skal eisini finnast til at byggja eina nýggja framtíðar brennistøð, møguliga fyri alla Føroyar, sum eisini kann lata hita til Fjarhitafelagið og møguliga streym til SEV.

Um økið á Skarðshjalla verður latið til biogass anlegg, so skal eitt annað øki finnast til nýggja brennistøð, tað kundi verið á Ovara Hjalla.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Av tí at onki projekt fyriliggur, so ber ikki til at siga um ætlanin krevur frávik/lættar frá ásetingunum.

Umsóknin er helst í tráð við ásetingarnar fyri økið, men tað skal kannast nærri, tá fleiri upplýsingar fyriliggja.

Skal biogass anlegg byggjast á staðnum, so er talan um eitt kap. 5 virki, sum krevur umhvørvisgóðkenning.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 6

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tórshavnar kommuna eigur lendið sum søkt verður um.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Býarskipanardeildin:**
Í sambandi við ídnaðarvirksemið á Skarðshjalla, so er skilagott at staðseta eitt nýtt biogass anlegg innast á økinum, hetta eisini í sambandi við eina møguliga útbygging/flyting av brennistøðini, ið somuleiðis er eyðsædd at verða staðsett tætt við biogass anleggið. Eftir ætlan verður ídnaðarøkið á Hjalla víðkað omanfyri verandi virksemið, ið leggur upp til fleiri grundøki og møguleikar til vinnu og ídnað.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**

Tá myndugleikaprojekt fyriliggur, skal málið sendast til:
- Umhvørvisstovuna í sambandi við umhvørvisgóðkenning
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Umsókn frá Christian Andreasen, j.nr. 18/00908-2

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
at kommunan gevur P/f Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík, til staðseting av nýggjum biogass verki.
at optiónin verður treytað av, at áðrenn endaligt keyp ferð fram, skal tilsøgn um byggiloyvi fyriliggja, umframt avtala um veiting av framleiddari orku, m.a. til fjarhitafelagið.
at beina málið í fíggjarnevndina, til at áseta aðrar treytir, m.a. um kostnað og tíðarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og geva P/F Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík við omanfyristandandi treytum og til kostnað, ið verður at áseta við støði í kostnaðinum av teirri byggibúning, sum er gjørd á lendinum. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 94/18 Umsókn um samanlegging av vinnustykkjunum á Hjalla matr. nr. 139u og 139t, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2017 | 124/17 | 17/01593-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 106/18 | 17/01593-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 94/18 | 17/01593-1 |

**Lýsing av málinum – saman**
Keypari er til vinnustykkini á Hjalla, sum hevur ætlan um at leggja stykkini saman til eitt og byggja ein bygning á samlaða stykkið.

Áðrenn keyparin undirskrivar keypsskeytið, ynskir hann at tryggja seg, og biður kommununa um at seta ein servitutt í skeytið um at tað er loyvt eigaranum at leggja stykkini saman til ein matrikul.

Kommunan er ikki myndugleiki í matrikulviðurskiftinum, men kann geva eina undan góðkenning til umsøkjaran, soleiðis at hann veit um kommunan fer at viðmæla umsóknina, tá hann hevur søkt Umhvørvisstovuna um samanlegging.

Stykkini eru til støddar:

- Matr. 139u er umleið 1613 fermetrar til støddar
- Matr. 139t er umleið 1742 fermetrar til støddar

Keypsskeytið er ikki skrivað til hansara, tí hann vil vita, áðrenn hann keypir, um hann kann fáa loyvi til at leggja stykkini saman til eitt stykki.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. grundumráði**
1 Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3 Bygging skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella hóskiligar partar av økinum.

4 Byggistigið má ikki fara upp um 0,5

5 Rúmmálið á húsunum má ikki fara upp um 3,0 m$^3$ fyri hvønn m$^2$ av grundstykkinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

Einki frávik

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 4-6

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar fíggjarligar bindingar fyri kommununa

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Viðmerkingar frá býarskipanardeildini:

Mett verður býarskipanarliga at tað ikki er so heppi at stykkini verða løgd saman fyri at byggja ein stóran bygning á báðum stykkjunum. Hetta grundað á, at so kann hugsast at samlaða byggingin í økinum verður misjøvn á at líta.

Viðmerking frá Løgdeildini:
Talan er um eitt vinnuøki – og eigur at bera til at laga seg eftir tørvinum hjá keyparanum í ein mun – soleiðis at økið kann brúkast til keyparans endamál. Onkrir keyparar hava brúk fyri heilt stórum stykkjum, meðan aðrir hava brúk fyri heilt smáum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar frá øðrum myndugleika.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, vísandi til at talan er um eitt vinnuøki har tað eigur at bera til at laga seg til tørvin hjá keyparum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**
Advokatur hjá keyparanum hevur boðað frá, at keyparin ynskir at keypa matr.nr. 139u og 139t, við teirri treyt, at stykkini verða løgd saman. Keyparin kennir seg ótryggan við, um stykkini kunnu leggjast saman ella ikki, og vil helst, at kommunan avgreiðir samanleggingina, áðrenn stykkini verða skeytað honum. Advokaturin mælir til eina loysn, har keyparin keypir stykkini tá hesi eru samanløgd og at keypspeningurin kemur at standa á klientkonto hjá advokati, higartil at samanløgdu stykkini eru tinglýst í keyparans navni uttan præjudiserandi rættarviðmerkingar.

Umboð fyri stjórnarskrivstovuna mæla til eina loysn sum umfatar, at keyparin keypir stykkini og undirskrivar skeytini uppá bæði stykkini beinanvegin. Í hesum skeytunum, bindur kommunan seg til at taka grundstykkini innaftur, um ikki matrikulstovan góðtekur samanlegging av stykkjunum. Møgulig afturtøka er so eisini treytað av, at grundstykkini framvegis liggja óbygd. Tað kann viðmerkjast at advokatur keyparans góðtekur hesa mannagongd.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til, at kommunan selir grundstykkini við treytum, sí málslýsing.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 95/18 Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr. nr. 139f, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2017 | 189/17 | 17/03082-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 82/18 | 17/03082-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 102/18 | 17/03082-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 107/18 | 17/03082-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 95/18 | 17/03082-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umhvørvisstovan biður um ummæli til at sundurbýta matr. 139f Vinnuøkið á Hjalla til trý grundøkir.

Matr. 139f er 5037 fermetrar til støddar.
Søkt verður um at sundurbýta matr. 139f soleiðis, at hvørt stykkið verður umleið 1679 fermetrar til støddar.
Stykkini, sum liggja uppat matr. 139f, eru umleið 2200 fermetrar.
Tað er tinglýst í skeytið, "grein 6 stykki j", í 2008 at stykkið ikki kann sundurbýtast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum B8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**§ 15. Ásetingar fyri umráðispart B8 í 3. grundumráði**
1 Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

2 Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3 Bygging skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella hóskiligar partar av økinum.

4 Byggistigið má ikki fara upp um 0,5

5 Rúmmálið á húsunum má ikki fara upp um 3,0 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum

6 Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 13 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir verða hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki mál sum hevur týdning fyri málið

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki frávik til málið

**Umhvørvisárin**

**Fíggjarlig viðurskifti**

Ongar fíggjarligar bindingar fyri kommununa

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni j. nr 17/03082/1
Kort úr Bentley 17/03082/3
Skeyti j.nr. 17/03082/4

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi –og umhvørvisdeildini viðmæla ikki at sundurbýta matr. 139f til trý stykkir, sum søkt er um, vísandi til at tað er tinglýst í skeyti, at matr. 139f ikki kann sundurbýtast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin tekur upp samráðingar við umsøkjaran.

**Ískoyti**:
Nýggj umsókn er komin frá Umhvørvisstovuni um at sundurbýta matr. 137f til tvey stykkir í staðin fyri trý, sum fyrr var søkt um.

Advokaturin hjá umsøkjaranum hevur verið inni á fundi, hann vil hava málið fyri nevnd av nýggjum, hann er komin við nýggjum upplýsingum.

Teir eru komnir við einum gomlum korti, sum vísir at stykkið var tvey vinnustykkir og hava teir fingið tey samanløgd í 1997, áðrenn teir keyptu stykkið, einki er at finna í journal hesum viðvíkjandi, teir vístu eisini á, at grannastykkini eru smá umleið 2000 til 2500 $m^2$ hvørt stykkið.

Teir vísa á, at stykkini vóru ávikavíst 2.420 fermetrar og 2.435 fermetrar ella í alt 4.855.

Tá tey stykkini seinni vóru løgd saman í eitt samlað stykkið, var tað Tórshavnar kommuna sum tók avgerð um at tað skuldi verða eitt stykki, áðrenn sølan bleiv framd.

Sum fyrr lýst í málinum er ein servituttur tinglýstur á matr. 139f, at matrikulin ikki kann sundurbýtast aftur til tvey stykkir, kommunan hevur átalurættin til servituttin, søkt verður um at fáa servituttin avlýstan.

Í sambandi við at matrikuleringin bleiv framd er víddin økt nakað, upp til 5.037 fermetrar.
Nú søkja teir Umhvørvisstovuna um at sundurbýta vinnustykkið aftur til tvey eins stór stykkir.

Eigarin skal bera allan kostnaðin til allar leiðingar og matrikuleringina í sambandi við sundurbýtið.

**Tilmæli:**
Leiðarin á byggi- og býarskipanardeildini mælir nevndini til at viðgera málið av nýggjum og viðmæla at stykkið matr. 139f verður sundurbýtt í tvey vinnustykkir, at eigarin ber allan

kostnaðin av leiðingum og matrikuleringini, at servitutturin verður avlýstur og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

# 96/18 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 122/18 | 18/01520-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 96/18 | 18/01520-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna ársroknskapin fyri 2017.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 302<br><br>Formansins merki: |

# 97/18 Framflytingar fyri árið 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 123/18 | 18/01521-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 97/18 | 18/01521-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 18/01521-1 |

**Upprunin til málið:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. Í sambandi við at roknskapurin fyri 2017 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2018. Samlaða framflytingin fyri rakstur er 5,4 mió. kr. netto og ikki nýttar íløgujáttanir at flyta fram eru 322,9 mió. kr.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 303<br>Formansins merki: |

Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting 5,4 mió. kr. netto, til rakstur og 78,9 mió.kr. til íløgur.

Fyri Tórshavnar Havn mæla kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin harumframt til at flyta fram 244,0 til íløgur.

Stjórnin mælir til fylgjandi broytingar í framflytingum:

| | **Flytast á:** | | | **Fíggjast av:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Navn** | **Upphædd** | **Deild** | **Navn** | **Upphædd** |
| **§1** | | | | | |
| 1313 | Tekniska fyrisitingin | **1.000** | 6111 | Leiga traðir og økir | **1000** |
| **§2** | | | | | |
| 2210 | Kommunulæknatænnastur | **406** | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | **406** |
| 2721 | Røktartænastur | **5.623** | 2720 | Heilsuhúsið | **2436** |
| | | | 2722 | Tilboð | **1836** |
| | | | 2730 | Fyrisiting | **59** |
| | | | 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | **756** |
| | | | 2750 | Ansingarsamsýning | **536** |
| **§3** | | | | | |
| 3213 | Systkinaavsláttur | **431** | 3216 | Verkætlanir á ungdómsøkinum | **431** |
| **§4** | | | | | |
| 4126 | Forskúli til Lítlaskúla | **23** | 3144 | Frítíðarskúli til Lítlaskúla | **23** |
| **§5** | | | | | |
| 5716 | Skoytubreyt | **148** | 5710 | Uttandura vallir | **148** |
| 5717 | Ítróttaranlegg | **201** | 5710 | Uttandura vallir | **201** |
| **§6** | | | | | |
| 6510 | Kirkjugarðar | **422** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **422** |
| 6611 | Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk | **237** | 6610 | Umhvørvistiltøk o.a. | **237** |
| 6810 | Kloakkir o.a. | **216** | 6811 | Áir, yvirflatuvatn og veitir | **216** |
| 8111 | Reinhald | **257** | 6610 | Umhvørvistiltøk o.a. | **257** |
| 8113 | Ferðsla | **159** | 6211 | Aðrar útreiðslur fríðkan | **159** |
| 8114 | Kavarudding | **1.000** | 8110 | Vegir o.a. | **600** |
| 8114 | Kavarudding | | 6811 | Áir, yvirflatuvatn og veitir | **400** |
| **§7** | | | | | |
| 7110 | Renovatión | **1.000** | 7510 | Bussleiðin ella meirinntøkur | **1.000** |

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, sum eykajáttan, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 305<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 98/18 Eykajáttan 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 124/18 | 18/01522-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 131/18 | 18/01522-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 98/18 | 18/01522-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 18/01522-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☐

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Tikið av skrá.

**Málslýsing:**
Tøkur peningur í Tórshavnar kommunu var við ársskifti 231 mió. kr. Tilráðingin er, at kommunan hevur eitt minsta gjaldførið á 80 mió. kr. Orsøkin til økta gjaldføri eru fleiri. Í ársroknskapinum 2017 kann staðfestast, at skattainntøkurnar eru hægri enn mett í fíggjarætlanini. Játtan at flyta fram er fyri løgur 78 mió. kr. og fyri rakstur 5,4 mió. kr. 50 mió. kr. av innistandandi eru ætlaðar at fíggja íløgur í 2018. Mett verður eisini at kommunan fær inntøku vegna sølu av grundøkjum í árinum. Tøkur peningur, tá árið er gjørt upp er mettur at verða 29,3 mió. kr. sum kunnu ráðast yvir. Fleiri rakstrarstøð eru við manglandi fígging og kann tøkið peningurin nýtast til fígging av hesum.

**Tænastumannaeftirlønir**
Játtanin fer til eftirlønir hjá fyrrverandi borgarstjórum og tænastamanna settum starvsfólkum. Um viðkomandi er deyður, til avvarðandi teirra, sum tá sambært lóg hava rætt til eftirløn. Fleiri fólk enn ætlað í fíggjarætlanini hava fingið tænastamannaeftirløn. Játtanin var 3 mió. kr., útgoldið var 3,5 mió. kr.

**Naina**
Sambært løgtingslóg nr. 18 frá 9. apríl 1964 um raksturin av Hvíldarheiminum Naina rindar kommunan tann partin av rakstrinum, sum ikki verður goldin við játtan á fíggjarløgtingslógini og av Heilsutrygd, í mun til dagarnar, íbúgvar í kommununi hava verið á heiminum.

Kontan hevur haft hall síðani 2014. Játtanin hevur verið í millum 1,6 og 1,9 mió. kr. um árið, meðan raksturin hevur verið í millum 2 og 2,3 mió. kr. Játtanin til Hvíldarheimið Naina er 2018 2 mió. kr.

**NSR**
Játtanin var til útreiðslur til Námsfrøðiliga Sálarfrøðiliga Ráðgeving (Sernám). Málsøkið var burturav landsins, men av tí at mett var, at tað var eitt framstig fyri tænastustigið, játtaði kommunan at gjalda fyri vanligan skrivstovurakstur og løn til ein skrivara. Mentamálaráðið yvirtók allar rakstrarútreiðslur pr. 1. januar 2015, síðani hevur rakstrarstaði ikki haft nakra játtan og stavar hallið frá 2014.

**Renovatión**
Kommunala Brennistøðin hevur til endamáls at røkja kommununnar uppgávur og skyldur í sambandi við burturkast. Meirnýtslan í 2017 stavar í høvuðsheitum frá eldsbruna í ruskgoymsluni, og viðførdi skaða á bygning, herundir vindeygu, hurðar og el-installatiónir, umframt at kranin gjørdist vrak. Um eykajáttan ikki verður givin fer tað at ganga út yvir virksemi á brennistøðini í 2018.

**Lønarbroytingar**
Lagt var upp fyri eini lønarhækkan á 2% í fíggjarætlanini fyri 2018. Gongdin í sáttmálasamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, fyri sáttmálar sum gingu út 30/9-2017, hevur á nøkrum økjum viðført umfatandi lønarhækkingar. Ramman hevur verið 2,3% fyrra árið og 2,5% seinna árið. Útgangsstøði var at man skuldi samráðast í krónum og í nøkrum samráðingum er man farin burtur frá hesum til at samráðast um prosentir. Avleiðingin er at lønarhækkanin fyri lægri lønir er hægri í prosentum, enn fyri tær hægru lønirnar. Tórshavnar kommuna hevur nógv starvsfólk í lægra lønarbólkinum.

Nýggi sáttmálin millum Fíggjamálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar viðførdi stórar broytingar, bæði strukturelt og ein høga lønarhækkan hjá landinum. Samráðingarnar á kommunala økinum eru lidnar og liggja lønarbroytingarnar á einum væl hægri støði enn tikið var hædd fyri í fíggjarætlanini.
Lønarhækkanin er sera ymisk fyri tey ymisku feløgini. Út frá teimum sáttmálum sum eru undirskrivaðir og frá innanhýsis tølum er greitt, at lønarhækkanin fer at vera væl meira enn 2% og væl meira enn ramman var upprunaliga. Mælt verður tí til at leggja upp fyri lønar broytingum við 5 mió. kr.

**Læknahøli**
Játtanin er til útreiðslur sambært løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulækna skipan við seinni broytingum. Sambært lógini er tað ábyrgd kommununnar at útvega og rinda viðtaluhøli við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknarnar og bera útreiðslurnar av rakstri og viðlíkahaldi. Eisini skal kommunan útvega frían bústað til frítíðar- og langtíðaravloysarar.

Heilsumálaráðið hevur fráboðað kommununi, at tveir nýggir læknar eru normeraðir til Tórshavnar kommunu at seta skjótast gjørligt. Kommunan skal í hesum sambandi fáa til vega nýggj læknaviðtaluhøli. Neyðugur peningur er ikki settur av til endamálið í fíggjarætlanini fyri 2018.

**Ansingarpláss**
Játtanin er til vantandi ansingarpláss í kommununi uml. 46 vøggustovu- og 17 barnagarðspláss. Harafturat er neyðugt at fíggja 3 mió. kr. við sparingini orsakað av verkfallinum.

**Løgur barnaansing**
Játtanin skal brúkast til at fáa fleiri dagstovnapláss, harundir tillagingarnar av realskúlanum.

**Aðrar útreiðslur**
Hendan konta er til óvæntaðar inntøkur og útreiðslur. Kontan hevði eitt hall á 704 t.kr. Játtanin til aðrar útreiðslur í 2018 er sostatt við framfluttum 1,75 mió. kr. 2,8 mió. kr. er játtaðar til serstaka viku fyri tímalønt. Í árinum væntast harumframt øktar útreiðslur til løgfrøðiligar tænastur m.a. í sambandi við fleiri byggimál.

**Karlamagnusarbreyt**
Neyðugt er at bøta um viðurskiftini á Karlamagnusarbreyt. Sambært skeytinum hevur kommunan ymiskar skyldur. 3,7 mió. kr. eru ætlaðar asfaltering af felagsøkjunum sambært skjeytum, ferðslutrygdarviðurskiftir, parkeringspláss og annað. Neyðugt verður eisini at peningur verður settur av til endamálið á fíggjarætlanini í 2019.

**Byggi- og umhvørvisdeildin**
Talið av starvsfólkum á byggideildini hevur verið tað sama í nógv ár. Í januar 2017 kom nýggj bygningskunngerð (BK17), sum krevur nógv meira av byggimálsviðgerðini enn áður, eisini er øll brunateknisk málsviðgerð flutt til kommunurnar at umsita.

Hesi seinastu árini er talið av byggimálum, fyrispurningar og øðrum nógv vaksið. Í 2015 var talið av givnum byggiloyvum uml. 200 og seinastu 2 árini hevur hetta talið verið uml. 300, sum er ein øking uppá uml. 40%.

Skal kommunan framhaldandi kunna bjóða eina góða og skjóta tænastu til okkara borgarar, so er neyðugt at seta fleiri starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini.

**Talgildu Føroyar**
Løgtingið hevur samtykt verklagslógina um Talgildu Føroyar. Við lógini verður mett at vit fáa eitt betri og virkisførari Føroyar. Landið hevur sett 90 mió.kr. til endamálið næstu árini og ynskir í hesum sambandi eitt samstarv við m.a. kommunurnar.

Samlaða fíggjarætlanin fyri verkætlanina er 150 mió. kr. Harav er býtið millum týðandi áhugapartarnar ætlað soleiðis : landi 60 %, kommunur 17% og sponsorar 23% Lagt er upp til, at allar kommunur rinda lutfalsliga, tað vil siga eftir fólkatali. Fyri Tórshavnar kommunu merkir hettar eitt árligt gjald á uml. 3,5 mió. kr. næstu 3 árini.

**Fyribyrgjandi verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið**
Játtaðar verða kr. 1 mió til kontu 2460 stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið. Sambært nýggjum leiðreglum fyri kontuna er endamálið við játtanini at stuðla undir fyribyrgjandi og heilsumennandi verkætlanum, tiltøkum, átøkum og tilboðum innan almanna- og heilsuøkið, sum kunnu vera borgarum og virkisøkjum kommununnar til gagns bæði í stutttíðar- og langtíðarhøpi.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at tøki peningurin verður nýttur til at fíggja niðanfyri standandi rakstrarstøð við manglandi fígging soleiðis:

| | |
|---|---|
| Tænastumannaeftirlønir | 546.000 |
| Naina | 1.516.000 |
| NSR | 197.000 |
| Renovatión | 1.700.000 |
| Lønarbroytingar | 5.000.000 |
| Læknahøli | 3.000.000 |
| Ansingarpláss | 2.000.000 |
| Løgur barnaansing | 2.000.000 |
| Aðrar útreiðslur | 4.841.000 |
| Karlamagnussarbreyt | 3.700.000 |
| Byggi- og umhvørvisdeildin | 300.000 |
| Talgildu Føroyar | 3.500.000 |
| Fyribyrgjandi verkætlanir | 1.000.000 |
| | 29.300.000 |

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 309 |
| | Formansins merki: |

# 99/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

# 100/18 Umsókn um loyvi at byggja undirlendi til framleiðsluøki á Gomlurætt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 76/18 | 18/00817-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 97/18 | 18/00817-6 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.04.2018 | 6/18 | 18/00817-6 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.04.2018 | 110/18 | 18/00817-6 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 100/18 | 18/00817-6 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn er komin frá J&K Petersen, dagfest 15. februar 2018, har søkt verður um at loyvi til at fylla upp og gera undirlendi til vinnuøki norðanfyri verandi havnaøki á Gomlurætt,

Ætlanin er at gera eina avtalu við Tunnilsfelagið um at fáa uml. 600.000 $m^3$ av grótinum sum kemur frá Sandoyartunlinum, svarandi til uml. 60% av øllum grótinum sum kemur upp hesumegin.

Økið skal brúkast til vinnuøki/framleiðslubygningar, m.a. til alivinnuna.

J&K Petersen hevur drúgvar royndir við annlegsarbeiðum, herundir gerð av havnaløgum og meta teir seg kunna fremja eina verkætlan á dygdargóðan og fyri náttúruna og umhvørvið skynsaman hátt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Verandi Gamlarætt og økið sum ætlanin er at fylla út, liggja í øki K í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað og Kirkjubø. Økið er lagt út sum landbúnaðarøki.

Neyðugt er at broyta byggisamtyktina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um at brúka helvtina av grótinum frá Sandoyar tunlinum, sum er næstan 1 mió. kubikkmetrar av gróti. Tað svarar til 31.000 lastbilar ella ein 70 m høgur klossi, fyltur upp á allan Tórsvøll. Grótið skal verða flutt sum minst.

<u>Borgarafundur var hildin á Velbastað 20.03.2018</u>
Annika Olsen legði fyri við m.a. at siga, at grótið er eitt stórt tilfangi, tað kann nýtast til planering, vegagerð, ítróttarøki, ídnaðarøk og bakkaverjur.

Teitur Samuelsen greiddi frá teirra ætlan at tyrva grótið í tveimum økjum, við sunnaru omankoyring frá Landsvegnum til Velbastað, at brúka til dyrkingarlendi.

Bjørn Paturson greiddi frá teirra ætlan, at fylla landið uppaftur sum náttúran hevur tikið frá Kirkjubø millum Kirkjubøshólman og landið "Kirkjubøfløtan" har fáast kunnu 65.000 + 62.000 fermetrar hvør síni megin hólman.

Søren Yde frá Holscher Nordberg Architects løgdu fram eitt hugskotskatalog, við uppskotum um hvat grótið kann brúkast til. Herundir nýggj bústaðarøki og ymisk grøn øki í náttúruni.

Stein Olvur Petersen greiddi frá teirra ætlan at fylla upp norðanfyri økið á Gomluræ tt, soleiðis at teir fáa eitt nýtt vinnuøki uppá íalt 75.000 m² (til samanlíkningar er vinnuøkið í vika uml. 50.000 m²).

Síðani var orðaskifti, har tað m.a. kom fram:
- at tað er ikki rætt at leggja eftir dyrkaðum lendi
- at tað kunnu fáast góð bústaðarøkir á Velbastað, men so skal kommunan gera íløgur í vegir, kloakkir og leiðingar, umframt skúla v.m.
- at tað at verja fornminnini í Kirkjubø og á Velbastað eigur at verða raðfest høgt.
- at verandi vegur á Velbastað er ov smalur og nú ber til at breiðka vegin við tunnilsgrótinum.

Tað tykist at verða breið semja um, at grótið eigur at verða nýtt til nýtt vinnuøki við Gomlurætt, nýggj bústaðarøki og at verja fornminnini.

Marin Katrina Frýdal rundaði av og segði m.a., at vit fara at hava ein borgarafund aftur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunnlinum, tey eru:
1. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930 Útstykkingar, fríøkir o.a.
2. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760 Umsókn um at tyrva grótið
3. J&K Petersen, j.nr. 18/00817 Umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
4. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

Tórshavnar kommuna skal taka støðu til tey 4 uppskotini sum eru komin inn.

Tá støða verður tikin til uppskotini, eiga fylgjandi viðurskifti at verða tikin við í metingina:
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at verða til gagns fyri almenningin, vinnuna ella onnur, soleiðis at tilfeingið verður brúkt á skilabesta hátt.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til náttúruna.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til umhvørvið og í tí sambandi eigur ein loysn at verða funnin, har grótið verður flutt sum minst.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Umsóknin krevur, at byggisamtyktin verður broytt.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 4-6.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**<u>Byggi- og umhvørvisdeildin:</u>**
Skulu ætlanin fremjast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:
- Ognarviðurskiftini, økið talan er um er partur av økinum “Havnin á Gomlurætt”, sum landið eigur.
- Byggisamtyktin skal broytast
- Prosjekt skal gerast, sum vísir hvussu økini verða innrættaði við grundstykkjum, vegum, kloakkir, reinsiverk o.a.

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
- Málið hevur verið hjá Náttúrufriðingarnevndini, sum hevur givið loyvi við treytum, sí skjal nr. 18/00817-5.
- Yvirfriðingarnevndin skal viðgera málið
- Landsverk skal viðgera málið í samband við ognarviðurskifti og tí talan er um landshavn/-veg.

**Skjøl**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Umsókn, j.nr. 18/00817-1
- Skriv frá Náttúrufriðingarnevndini, j.nr. 18/00817-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**
Onga beinleiðis fíggjarliga binding fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at geva loyvi til ætlaðu uppfyllingini, fyri at gera undirlendi til nýtt vinnuøki norðanfyri verandi havnaøki á Gomlurætt, treytað av:
at verkætlanin verður nærri lýst, áðrenn endalig støða verður tikin
at neyðug loyvi fáast frá øðrum myndugleikum
at tekniskt prosjekt verður gjørt, áðrenn nakað endaligt loyvi verður givið
at verkætlanin verður uttan kostnað fyri kommununa.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar í kirkjubøar- og velbastaðarnevndini og at leggja málið fyri nevndina aftur á eykafundi skjótast til ber.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. apríl 2018:** Nevndin mælir til at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 314<br><br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 24. apríl 2018**: Kunnað varð um málið.

# 101/18 Fyrispurningur um tyrving av gróti á Velbastað í sambandi við Eystur- og Sandoyartunlar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 222/17 | 17/00760-4 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 21.11.2017 | 9/17 | 17/00760-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 75/18 | 17/00760-4 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 96/18 | 17/00760-4 |
| 5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.04.2018 | 3/18 | 17/00760-4 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.04.2018 | 107/18 | 17/00760-4 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 101/18 | 17/00760-4 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn frá Christian Andreasen, adv., vegna Eystur- og Sandoyartunlar, um loyvi at tyrva grót á Velbastað.

Í umsóknini skrivar umsøkjarin:
Eystur- og Sandoyartunlar hevur gjøgnum longri tíð verið í dialogi við Búnaðarstovuna og við festaran av matr. nr. 52, Velbastað, um loyvi at tyrva grót úr Sandoyartunnlinum í lendi, sum hoyrir til festið.

Festarin hevur givið til kennar, at hann einki hevur ímóti hesum. Fyri festaran verður endaliga úrslitið, at hann fær eitt betur lendur burtur úr, tá tyrvingin er liðug.

Búnaðarstovan hevur givið til kennar, at stovnurin í prinsippinum ikki hevur nakað at viðmerkja, men stovnurin metur, at byggivaldið skal góðkenna hettar.

Eg eri kunnaður um, at Tórshavnar Kommuna hevur verið í samskifti við Búnaðarstovuna um hesi viðurskifti, og at kommunan við skrivi dagf. 23. februar 2017 (tykkara j.nr. 17/00760-2) hevur boðað frá, at klientur mín skal hava byggiloyvi at fremja slíka tyrving.

Annars kann eg upplýsa, at fortreytin fyri at gera nevnda arbeiði sjálvsagt er, at allir relevantir myndugleikar góðtaka hetta, herundir eisini Friðingarnevndin. Upplýsast skal, at friðingarmyndugleikarnir hava givið loyvi til at nevnda tyrving kann fara fram.

Eg viðleggi tekningar yvir økið og eina arbeiðsfrágreiðing harav framgongur, hvussu arbeiði við at tyrva verður útint.

Talan er um tvey økir. Annað er i Dølum, har pláss er fyri at tyrva upp til 450.000 $m^3$ av gróti. Samlaða økið er 64.500 $m^2$ til víddar. Hitt økið, sum liggur tætt við fyrra økið, nevnist við Breiða. Á hesum stað er pláss fyri at tyrva umleið 220.000 $m^3$ av gróti. Hetta øki er umleið 33.000 $m^2$ til víddar.

Samlaða nøgdin av gróti, sum kemur úr Sandoyartunlinum, er tó nakað lægri enn hesar báðar mongdirnar tilsamans.

Sum advokatur fyri P/f Eystur- og Sandoyartunlar skal eg við hesum søkja um loyvi frá Tórshavnar Kommunu um at felagið fær loyvi at tyrva nevndu nøgdir á nevndu økjum.

Annars skal eg viðmerkja, at felagið hevur havt fund við Tórshavnar Kommunu tann 31. august 2017, har spurningurin um møguligar aðrar loysnir bleiv umrøddur.

Tað er at viðmerkja, at tyrvingin ikki fer í gongd fyrr enn arbeiðið við Sandoyartunlinum byrjar, og at ein játtan av hesi umsókn ikki nýtist at útihýsa møguleikanum fyri at tyrva grót á øðrum stað, um partarnir í góðari tíð áðrenn verkætlanin byrjar semjast um hettar. Hinvegin er tað av sera stórum týdningi, at klientur mín kennir treytirnar fyri verkætlanini og hevur síni viðurskifti við myndugleikar í lagi. Deponeringin av gróti er ein sera týðandi spurningur at fáa avgreitt í sambandi við hesa verkætlan. Tað er tí av stórum týdningi, at klientur mín fær hesi viðurskifti avklárað, og tí verður biðið um, at Tórshavnar Kommuna gevur sítt loyvi at tyrva grót á nevndu støðum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður til 2 onnur mál um grótið frá Sandoyartunlinum, tað er:

1) Mál j.nr. 17/02930. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 13. september at taka upp samráðingar við tunnilsfelagið um at fáa grótið úr tunlinum og at umsitingin kannar hvat grótið kann brúkast til. Býráðið samtykti tann 26. oktober 2017 at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

2) Mál j.nr. 17/017/03303. Uppskot frá Hans Vilhelm Lützen og Bjørn Patursson, um at fylla grót út á sjógv millum sjóarmálan í Kirkjubø og út til hólman, tó so at hólmurin verður leysur. Norðanfyri verður nýtt øki á 65.000 m² og sunnanfyri eitt øki á 62.000 m².

**Lógir, ásetingar o.a.**
Búnaðarstovan hevur áður spurt kommununa um tað krevur loyvi frá kommununi til at tyrva grót, og hevur kommunan svara aftur við skrivi j.nr. 17/00760-2, at tað krevur loyvi frá kommununi at tyrva grót.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Økið, har ætlanin er at leggja út grót út, liggur í umráðispartinum “K, landbúnaður" í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað, har ásetingarnar eru:

*1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.*
*2. Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.*
*3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.*
*4. Útstykking má ikki fara fram.*

Talan er um áleið 500.000 m$^3$ av gróti sum kemur upp á land við Gomluræt, og gevur hetta møguleika til at fremja verkætlanir sum kunnu verða alment gagnligar fyri borgarar í kommununi. Tí er tað umráðandi at málið verður viðgjørt væl og virðiliga, áðrenn endaliga støða verður tikin til loysn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sí málini omanfyri, j.nr. 17/02930 og j.nr. 17/017/03303.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki kannað

**Umhvørvisárin**
Ikki kannað

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
j.nr. 17/00760-7 Umsókn frá Christian Andreasen adv.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvi mæla til, at kommunan tekur upp samráðingar við tunnilsfelagið um møguleikan fyri at Tórshavnar kommuna kann fáa grótið til verkætlanir, áðrenn endaliga støða verður tikin til aðrar loysnir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 21. november 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunlinum, tey eru:

1. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930 Útstykkingar, fríøkir o.a.
2. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760 Umsókn um at tyrva grótið
3. J&K Petersen, j.nr. 18/00817 Umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
4. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

Tórshavnar kommuna skal taka støðu til tey 4 uppskotini sum eru komin inn.

Tá støða verður tikin til uppskotini, eiga fylgjandi viðurskifti at verða tikin við í metingina:

- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at verða til gagns fyri almenningin, vinnuna ella onnur, soleiðis at tilfeingið verður brúkt á skilabesta hátt.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til náttúruna.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til umhvørvið og í tí sambandi eigur ein loysn at verða funnin, har grótið verður flutt sum minst.

**Borgarafundur var hildin á Velbastað 20.03.2018**
Annika Olsen legði fyri við m.a. at siga, at grótið er eitt stórt tilfangi, tað kann nýtast til planering, vegagerð, ítróttarøki, ídnaðarøki og bakkaverjur.

Teitur Samuelsen greiddi frá teirra ætlan at tyrva grótið í tveimum økjum, við sunnaru omankoyring frá Landsvegnum til Velbastað, at brúka til dyrkingarlendi.

Bjørn Paturson greiddi frá teirra ætlan, at fylla landið uppaftur, sum náttúran hevur tikið frá Kirkjubø millum Kirkjubøshólman og landið "Kirkjubøfløtan" har fáast kunnu 65.000 + 62.000 fermetrar hvør síni megin hólman.

Søren Yde frá Holscher Nordberg Architects løgdu fram eitt hugskotskatalog, við uppskotum um hvat grótið kann brúkast til. Herundir nýggj bústaðarøki og ymisk grøn øki í náttúruni.

Stein Olvur Petersen greiddi frá teirra ætlan at fylla upp norðanfyri økið á Gomlurætt, soleiðis at teir fáa eitt nýtt vinnuøki uppá íalt 75.000 $m^2$ (til samanlíkningar er vinnuøkið í vika uml. 50.000 $m^2$).

Síðani var orðaskifti, har tað m.a. kom fram:

- at tað er ikki rætt at leggja eftir dyrkaðum lendi
- at tað kunnu fáast góð bústaðarøkir á Velbastað, men so skal kommunan gera íløgur í vegir, kloakkir og leiðingar, umframt skúla v.m.
- at tað at verja fornminnini í Kirkjubø og á Velbastað eigur at verða raðfest høgt.
- at verandi vegur á Velbastað er ov smalur og nú ber til at breiðka vegin við tunnilsgrótinum.

Tað tykist at verða breið semja um, at grótið eigur at verða nýtt til nýtt vinnuøki við Gomlurætt, nýggj bústaðarøki og at verja fornminnini.

Marin Katrina Frýdal rundaði av og segði m.a., at vit fara at hava ein borgarafund aftur.

**Viðmerkingar frá Byggi- og umhvørvisdeildini:**
Skal grótið tyrvast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:

- loyvi frá Búnaðarstovuni
- loyvi frá friðingarmyndugleikanum
- loyvi frá kommununi, sum byggimyndugleiki

Økið omanfyri landsvegin er 64.500 $m^2$ til víddar og har er ætlanin at tyrva íalt 450.000 $m^3$, sum svarar til eina hædd í miðal uppá uml. 7 m.
Økið niðanfyri landsvegin er 33.000 $m^2$ til víddar og har er ætlanin at tyrva íalt 220.000 $m^3$, sum svarar til eina hædd í miðal uppá uml. 6,7 m.

Talan er sostatt um eitt rættuliga stórt inntriv í náttúruna á staðnum, bæði tí at talan er um stórar víddir sum verða gjørdar sléttar og tí at talan er um rættuliga nógva uppfyllu.

**Viðmerkingar frá Teknisku deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at loyva nakað av uppfylling niðanfyri/vestanfyri landsvegin, treytað av:
at verkætlanin verður nærri lýst, áðrenn endalig støða verður tikin
at neyðug loyvi fáast frá øðrum myndugleikum
at tekniskt prosjekt verður gjørt, áðrenn nakað endaligt loyvi verður givið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar í kirkjubøar- og velbastaðarnevndini og at leggja málið fyri nevndina aftur á eykafundi skjótast til ber.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. apríl 2018:** Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

## 102/18 Grótið frá Sandoyartunlinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2017 | 181/17 | 17/02930-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 18.09.2017 | 6/17 | 17/02930-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 224/17 | 17/02930-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 251/17 | 17/02930-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2017 | 221/17 | 17/02930-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2018 | 21/18 | 17/02930-1 |
| 7 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 21.11.2017 | 10/17 | 17/02930-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 38/18 | 17/02930-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 46/18 | 17/02930-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 74/18 | 17/02930-1 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 95/18 | 17/02930-1 |
| 12 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.04.2018 | 4/18 | 17/02930-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.04.2018 | 108/18 | 17/02930-1 |
| 14 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 102/18 | 17/02930-1 |

**Málslýsing:**
Tunnilin:
Sandoyartunnilin verður 10,9 km langur og 9,5 m breiður, lægsta punkt er 155 metrar undir havbotninum og mesta hallið verður 5 prosent. Sandoyartunnilin kemur upp í Traðardali millum Skopun og Sand, og streymoyarmegin kemur hann upp á Gomlurætt.

Jarðfrøðiligar undankanningar eru gjørdar, projekteringin er byrjað og eftir tíðarætlanini byrjar arbeiðið í 2018. Byggitíðin er sett til 5 ár, soleiðis at tunnilin verður liðugur í 2023.
Mett ferðsla pr. samdøgur er 310 bilar

Roknað verður við at nøgdin av gróti sum kemur úr tunnlinum verður áleið ein mió m3, harav uml helvtin, ella uml. 500.000 m3, kemur upp á land við Gomlurætt.

**Avgerast skal hvat alt grótið skal brúkast til.**

Búnaðarstovan:
Búnaðarstovan hevur spurt kommununa um tað krevur loyvi frá kommununi at taka ímóti gróti frá tunnlinum, at leggja út á lendi á Velbastað, hetta er okkara j.nr. 17/00760.

Kommunan hevur svarað, at sambært almennu byggisamtyktini kap. 4 §26, um ásetingar fyri 4. grundumráði, so eru broytingar í 4.gr. t.d...velting og moldbreiðsla...o.l., har landsløg verða broytt, umfatað av almennu byggisamtyktini og krevja tí loyvi frá kommununi.

Í eini viðgerð skal kommunan taka atlit til um aðrar ætlanir eru í umráðnum viðvíkjandi bygging, vegagerð, um økið er ætlað til byggilendi nú ella seinni, hvat náttúruvirði er í økinum og ymiskt annað. Tí eiga nágreiniligar árinskanningar/umhvørviskanningar at verða gjørdar av økinum, áðrenn nøkur støða verður tikin.

Um so er at grót skal verða lagt út, er tað eisini av stórum týdningi, at arbeiðið verður viðvíkjandi landslagi væl tilpassað verandi lendi og ikki sær út sum nakað ónatúrligt í økinum.

Tá talan er um 4. grundumráði, so skulu friðingarmyndugleikarnir eisini hava málið til viðgerðar.

Møguleikar:
Talan er um sera stórar nøgdir av gróti og tí er tað umráðandi at grótið verður brúkt til nakað skilagott og at hetta verður væl planlagt og projekt gjørt. Hildið verður, at gróti er væl egnað til fyllu og planering í sambandi við verkætlanir, har nógv grót skal brúkast.

Tá talan er um so nógv grót, so er best at finna eina loysn sum ikki krevur at grótið skal flytast alt ov langt, tá tað ikki vil verða umhvørvisliga burðadygt. Heldur ikki eigur gróti at verða flutt fleiri ferðir, tá tað ikki er fíggjarliga burðadygt.

Ein loysn kundi verið at lagt inn eitt heilt nýtt bústaðarøki á Velbastað, sum kann innihalda sethús, raðhús, íbúðarbygging, miðstaðarøki, ítróttarøki o.a.. Økið vestanfyri Kirkjubøarvegin, sum liggur millum kotu 110 og 140, er væl egnað til bústaðarøki. Hetta vendir vestureftir, hevur gott útsýni, tað er skjótt til Havnar og øki liggur tætt til tunnilsmunnan. Øki liggur í 4.grundumráði og verður tí neyðugt at broyta byggisamtyktina.

Harafturat kann partur av grótinum helst nýtast til at tryggja bakkaverjuna í Kirkjubø og á Velbastað.

Tann 31. august 2017 hevði EST fund við Tórshavnar kommunu har teir upplýstu, at teir fara at koma við eini umsókn til kommununa um grótið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at kommunan tekur upp samráðingar við tunnilsfelagið um at fáa grótið úr tunlinum.
Eisini verður mælt til at umsitingin kannar, um grótið kann brúkast til bakkaverju og til eina útstykking og at býarskipanardeildin ger uppskot til nýtt bústaðarøki, at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 18. september 2017:** Borgarstjórin heitir á nevndina um at koma við góðum hugskotum. Samstundis tekur nevndin undir við at partar av grótinum kann brúkast sum verja framman fyri kirkjuna.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2017:** Samtykt at taka upp samráðingar við Tunnilsfelagið og at umsitingin greinar nærri, hvørjir møguleikar eru fyri nýtslu av grótinum og at leggja málið fyri nevndina aftur skjótast møguligt.

Marin Katrina Frýdal og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 21. november 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 21. november 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við Tunnilsfelagið hin 15/01-2018.
Umboðini fyri kommununa greiddu frá, at kommunan ynskir at kanna um tað er skilagott at brúka grótið til bakkaverju, útstykkingar, og/ella annað alment gagnligt endamál, áðrenn avgerð verður tikin til hvar grótið skal.

Tosað varð um møguleikan at gera útstykkingar á Velbastað, brimverju í Kirkjubø v.m., ella at leggja grótið í depot, sum privat og onnur so kunnu brúka av seinni.

Umboðini fyri tunnilsfelagið vístu á, at arbeiðið við at gera tunnilin byrjar tíðliga í 2019 og at tunnilsfelagið ynskir at fáa fyribils loyvi til at tyrva hjá bóndanum, meðan arbeitt verður at finna møguligar aðrar loysnir.

Teir skjóta upp, at kommunan útskrivar treytað byggiloyvi og at tunnilsfelagið bindur seg til at verða við til aðrar loysnir, sum kunnu fremjast.

Nýggjur fundur er avtalaður at verða mánadagin 19. februar 2018 hjá kommununi.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at kommunan fær serkøna hjálp til at gera uppskot til hvørjir møguleikar eru, herundir bakkaverju, møguligar útstykkingar og annað, og at játta kr. 150.000 av kt. 1313 til endamálið, at skipa fyri einum borgarafundi og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðina av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur umbiðið ráðgeva at gera uppskot til hvørjir møguleikar eru, herundir bakkaverju, møguligar útstykkingar og annað. Hetta verður lagt fram á fundinum.

Nýggj umsókn frá J&K Petersen um loyvi til at byggja undirlendi til framleiðsluøki á Gomlurætt, j.nr. 18/00817. Ætlanin er at brúka grótið frá Sandoyar tunlinum til at fylla út norðan fyri verandi ferjulegu á Gomlurætt. Roknað verður við at brúka uml. 60% av teimum 600.000 $m^3$ av gróti sum koma úr tunlinum, soleiðis at tað fáast uml. 75.000 $m^2$ av nýggjum vinnuøki. J&K vilja gera og gjalda fyri alt arbeiðið og skulu so koma at eiga økið, sum eisini kann seljast.

Eftir fundin í byggi- og býarskipanarnevndini, tá meira tilfar eisini fyriliggur, er ætlanin at skipa fyri einum borgarafundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Framlagt.

**Ískoyti:**

Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunlinum, tey eru:

1. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930 Útstykkingar, fríøkir o.a.
2. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760 Umsókn um at tyrva grótið
3. J&K Petersen, j.nr. 18/00817 Umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
4. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

Tórshavnar kommuna skal taka støðu til tey 4 uppskotini sum eru komin inn.

Tá støða verður tikin til uppskotini, eiga fylgjandi viðurskifti at verða tikin við í metingina:

- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at verða til gagns fyri almenningin, vinnuna ella onnur, soleiðis at tilfeingið verður brúkt á skilabesta hátt.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til náttúruna.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til umhvørvið og í tí sambandi eigur ein loysn at verða funnin, har grótið verður flutt sum minst.

**Borgarafundur varð hildin á Velbastað 20.03.2018**
Annika Olsen legði fyri við m.a. at siga, at grótið er eitt stórt tilfangi, tað kann nýtast til planering, vegagerð, ítróttarøki, ídnaðarøki og bakkaverjur.

Teitur Samuelsen greiddi frá teirra ætlan at tyrva grótið í tveimum økjum, við sunnaru omankoyring frá Landsvegnum til Velbastað, at brúka til dyrkingarlendi.

Bjørn Paturson greiddi frá teirra ætlan, at fylla landið uppaftur, sum náttúran hevur tikið frá Kirkjubø millum Kirkjubøshólman og landið "Kirkjubøfløtan" har fáast kunnu 65.000 + 62.000 fermetrar hvør síni megin hólman.

Søren Yde frá Holscher Nordberg Architects løgdu fram eitt hugskotskatalog, við uppskotum um hvat grótið kann brúkast til. Herundir nýggj bústaðarøki og ymisk grøn øki í náttúruni.

Stein Olvur Petersen greiddi frá teirra ætlan at fylla upp norðanfyri økið á Gomlurætt, soleiðis at teir fáa eitt nýtt vinnuøki uppá íalt 75.000 m² (til samanlíkningar er vinnuøkið í vika uml. 50.000 m²).

Síðani var orðaskifti, har tað m.a. kom fram:

- at tað er ikki rætt at leggja eftir dyrkaðum lendi
- at tað kunnu fáast góð bústaðarøkir á Velbastað, men so skal kommunan gera íløgur í vegir, kloakkir og leiðingar, umframt skúla v.m.
- at tað at verja fornminnini í Kirkjubø og á Velbastað eigur at verða raðfest høgt.
- at verandi vegur á Velbastað er ov smalur og nú ber til at breiðka vegin við tunnilsgrótinum.

Tað tykist at verða breið semja um, at grótið eigur at verða nýtt til nýtt vinnuøki við Gomlurætt, nýggj bústaðarøki og at verja fornminnini.

Marin Katrina Frýdal rundaði av og segði m.a., at vit fara at hava ein borgarafund aftur.

**Viðmerkingar frá deildum:**

**Byggi- og umhvørvisdeildin:**
Skulu útstykkingar gerast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:

- Útstykkingarætlan skal gerast, sum vísir hvørji øki skulu nýtast, hvussu økini verða innrættaði við grundstykkjum, fríøkjum, stovnum o.a., umframt hvar vegir, kloakkir, reinsiverk o.a. kemur at verða.
- Kommunan skal ogna sær lendi sum skal brúkast til útstykkingarnar.
- Byggisamtyktir skulu gerast fyri økini
- Tekniskt útstykkingarprojekt skal gerast, soleiðis at øll loyvir kunnu fáast til vega og arbeiðini bjóðast út.
- Avtalast skal hvussu útstykkingarnar verða framdar, herundir hvør skal standa sum byggiharri, hvør skal gera arbeiðið og hvussu hetta verður fíggjað.

Skulu grøn øki gerast í náttúruni, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:
- Ætlanir skal gerast, sum vísir hvørji øki skulu nýtast, hvussu økini verða innrættaði.
- Kommunan skal ogna sær lendi sum skal brúkast.
- Møguliga skulu byggisamtyktir broytast ella gerast fyri økini.
- Projekt skal gerast, soleiðis at øll loyvir kunnu fáast til vega og arbeiðini bjóðast út.
- Avtalast skal hvussu arbeiðið verður skipað og hvussu tað verður fíggjað.

**Viðmerkingar frá Teknisku deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til, at arbeitt verður víðari við ætlanini at brúka ein part av grótinum til at gera útstykkingar til nýggj bústaðarøki o.a. á Velbastað/Kirkjubø og at taka upp samráðingar við Tunnilsfelagið fyri at tryggja, at kommunan kann fáa part av grótinum til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar í kirkjubøar- og velbastaðarnevndini og at leggja málið fyri nevndina aftur á eykafundi skjótast til ber.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. apríl 2018:** Nevndin mælir frá at nýta grótið til útstykkingar á Velbastað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

## 103/18 Hugskot/uppskot um nýtslu av tilfari úr Sandoyartunlinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 77/18 | 17/03303-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 98/18 | 17/03303-2 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 16.04.2018 | 5/18 | 17/03303-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.04.2018 | 109/18 | 17/03303-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 103/18 | 17/03303-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Uppskot er komið inn um hvussu ein partar av tilfarinum úr Sandoyartunlinum kundi verið nýtt til at fylla upp út fyri Kirkjubø.

Tað hevur verið landfast millum hólman og land og nú møguleiki er at fáa grót, er upplagt at tað lendið, havið hevur máa burtur, verður tikið aftur og lagt sum eitt prýði fyri Kirkjubø og tey nógvu ferðafólk sum har koma og har Føroya mætastu fornminnir eru.

Støða er ikki tikin til hvat økið skal brúkast til, men nærliggjandi er at brúk er fyri øki til vaksandi ferðavinnuna bæði til lands og á sjónum vestanfyri. Fleiri bygningar og gøtur eru burturmáaðar og fornfrøðingar vita um steinsettar gongugøtur sum peika beina kós út móti hólmanum.

Ætlanin er at lata hólman verið leysan, tí hólmurin er blivin serstakur við tað at fuglur, terna, æða o.a. fuglur eigur har.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Á landi, har fylt verður ímóti, liggur økið í umráðispartinum H, G, D og H1 í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað og Kirkjubø.

Økini eru løgd út sum
H, Frílendi
G, Neyst og bátapláss
D, Havnaøki
H1, Friðað øki

Neyðugt er at broyta byggisamtyktina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Talan er um at fylla upp út til- og eitt sindur runt um hólman. Vestanfyri verður eitt nýtt øki uppá uml. 65.000 m² og eystanfyri uml. 62.000 m²

Tað er ikki upplýst hvussu nógv grót skal brúkast.

Hetta arbeiði krevur, at stórt grót verður lagt uttast sum brimverja.

<u>Borgarafundur var hildin á Velbastað 20.03.2018</u>
Annika Olsen legði fyri við m.a. at siga, at grótið er eitt stórt tilfangi, tað kann nýtast til planering, vegagerð, ítróttarøki, ídnaðarøki og bakkaverjur.

Teitur Samuelsen greiddi frá teirra ætlan at tyrva grótið í tveimum økjum, við sunnaru omankoyring frá Landsvegnum til Velbastað, at brúka til dyrkingarlendi.

Bjørn Paturson greiddi frá teirra ætlan, at fylla landið uppaftur sum náttúran hevur tikið frá Kirkjubø millum Kirkjubøshólman og landið “Kirkjubøfløtan” har fáast kunnu 65.000 + 62.000 fermetrar hvør síni megin hólman.

Søren Yde frá Holscher Nordberg Architects løgdu fram eitt hugskotskatalog, við uppskotum um hvat grótið kann brúkast til.Herundir nýggj bústaðarøki og ymisk grøn øki í náttúruni.

Stein Olvur Petersen greiddi frá teirra ætlan at fylla upp norðanfyri økið á Gomlurætt, soleiðis at teir fáa eitt nýtt vinnuøki uppá íalt 75.000 $m^2$ (til samanlíkningar er vinnuøkið í vika uml. 50.000 $m^2$).

Síðani var orðaskifti, har tað m.a. kom fram:
- at tað er ikki rætt at leggja eftir dyrkaðum lendi
- at tað kunnu fáast góð bústaðarøkir á Velbastað, men so skal kommunan gera íløgur í vegir, kloakkir og leiðingar, umframt skúla v.m.
- at tað at verja fornminnini í Kirkjubø og á Velbastað eigur at verða raðfest høgt.
- at verandi vegur á Velbastað er ov smalur og nú ber til at breiðka vegin við tunnilsgrótinum.

Tað tykist at verða breið semja um, at grótið eigur at verða nýtt til nýtt vinnuøki við Gomlurætt, nýggj bústaðarøki og at verja fornminnini.

Marin Katrina Frýdal rundaði av og segði m.a., at vit fara at hava ein borgarafund aftur.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Kommunan hevur 4 mál um grótið úr Sandoyartunlinum, tey eru:
5. Tórshavnar kommuna, j.nr. 17/02930 Útstykkingar, fríøkir o.a.
6. Tunnilsfelagið, j.nr. 17/00760 Umsókn um at tyrva grótið
7. J&K Petersen, j.nr. 18/00817 Umsókn um vinnuøki á Gomlurætt
8. Bjørn Paturson o.fl., j.nr. 17/03303 Kirkjubøfløtan og fornminnir

Tórshavnar kommuna skal taka støðu til tey 4 uppskotini sum eru komin inn.

Tá støða verður tikin til uppskotini, eiga fylgjandi viðurskifti at verða tikin við í metingina:
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at verða til gagns fyri almenningin, vinnuna ella onnur, soleiðis at tilfeingið verður brúkt á skilabesta hátt.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til náttúruna.
- Ætlanin eigur so vítt gjørligt at taka atlit til umhvørvið og í tí sambandi eigur ein loysn at verða funnin, har grótið verður flutt sum minst.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Umsóknin krevur, at byggisamtyktin verður broytt.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1-2

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
<u>Byggi- og umhvørvisdeildini:</u>

Skal ætlanin fremjast, so skulu hesi viðurskifti koma upp á pláss:
- Ognarviðurskiftini, økið talan er um, er í dag sjógvur, men inni við land eru 2 eigarar, tað er Sóknarkirkjan og Føroya Jarðargrunnur
- Friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi.
- Byggisamtyktin skal broytast
- Prosjekt skal gerast, sum vísir hvussu økið verður fylt upp, hvussu ætlanin er at skipa økið, siglingarrennur o.a.

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Friðingarmyndugleikarnir skulu viðgera málið
Landsverk skal viðgera málið, í sambandi við at landsvegur liggur har.

**Skjøl**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Uppskot, j.nr. 17/03303-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**
Fíggjarligu viðurskiftini eru ikki lýst

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini, býarverkfrøðingurin og virkandi býararkitekturin mæla til at kommunan svarar uppskotstillaranum, at áðrenn støða verður tikin til málið, má verkætlanin lýsast nærri við tekningum og frágreiðingum, herundir eisini fíggjarligu viðurskiftini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar í kirkjubøar- og velbastaðarnevndini og at leggja málið fyri nevndina aftur á eykafundi skjótast til ber.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 16. apríl 2018:** Nevndin mælir frá at brúka grótið til uppfylling í Kirkjubø, men at mæla til at bakkaverjan verður gjørd sum skjótast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

# 104/18 Kanning um økt samstarv millum Kommunalu Brennistøðina og IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 22.03.2018 | 17/18 | 18/01200-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 103/18 | 18/01200-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 104/18 | 18/01200-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunala Brennistøðin (KB) hjá Tórshavnar kommunu og IRF samstarva um ymiskt á burturkastsøkinum, eitt nú pappír og papp, skrottviðgerð av bilum, flogøsku, spillolju v.m. Sum tað seinasta hava KB og IRF eisini gjørt samstarvsavtalu um tyrving og rottangaevju.

Samstarvið millum KB og IRF virkar væl, og metir umsitingin hjá Tórshavnar kommunu, at nógvir fyrimunir og 'synergieffekter' eru við samstarvinum ímillum hesar báðar partar.

Umsitingin í Tórshavnar kommunu og IRF ynskja tískil at kanna møguleikarnar fyri enn meiri samstarvi á burturkastsøkinum. Eisini ynskir umsitingin at kanna eina møguliga samanlegging millum KB og IRF, og hvat hetta inniber við atliti til fíggjarlig viðurskiftir, framtíðar karmar á burturkastsøkinum og leiklut/ávirkan hjá Tórshavnar kommunu í einum øktum samstarvi/samanlegging við IRF.

Ætlanin er, at umsitingin hjá Tórshavnar kommunu og IRF saman við ráðgeva lýsa nevndu viðurskiftini og leggja fyri nevnd aftur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at umsitingin í Tórshavnar kommunu saman við IRF og ráðgeva kannar møguleikarnar fyri meira samstarvi, herundir møguligari samanlegging av Kommunalu Brennistøðini og IRF, at leggja fyri nevndina aftur.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 22. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Kunnað varð um málið og beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Kunnað varð um málið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2018 | Blað nr.: 330<br><br>Formansins merki: |

**FUNDURIN LOKIN KL. 20.45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |